ÁRSROKNSKAPUR 2020

Fimm grønar orkukeldur í elskipanini í 2020

www.sev.fo

Innihalds-yvirlit

Frágreiðing frá nevndini	4
Bygnaður	16
Fimm grønar orkukeldur í elskipanini í 2020	18
Vindmyllurnar í Porkeri eitt frambrot	24
Sólorkan gav eitt vet meiri enn væntað	28
Biogassverkið gott ískoyti á grønu kósini	32
Sjóvarfalsverk framleitt streym inn á netið	34
Sjóvindmyllulund eystan fyri Nólsoynna	38
Stuttar søgur frá SEV	42
Korona ávirkaði trivnaðin og arbeiðsavrikið ymiskt	50
Heilsa, Trygd og Umhvørvi	58
Ársfrágreiðing og ársroknskapur 2020	66
Leiðsluátekning	69
Átekning frá óheftum grannskoðara	70
Høvuðs- og lyklatøl	72
Útrokning av lyklatølum	72
Leiðslufrágreiðing	74
Nýttur roknskaparháttur	84
Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember	91
Fíggjarstøða 31. desember	92
Peningastreymsuppgerð	94
Notur	96
Virkisbýti, framleiðsla og net	108
Rakstrarbýti, framleiðsla og net	114

Ársfrágreiðing og ársroknskapur 2020
Ársaðalfundur 23. apríl 2021.

Myndir: SEV, Faroephoto, Sansir, Klara Johannesen, Minesto, Eyðna J. M. Joensen, Kári Durhuus, Lbf, Articon, Fotostudio, SMJ, Niels Jacob Eysturberg og Mads á Heyggi.

Sniðgeving og uppseting: Sansir
Prent: Estra

Frágreiðing frá nevndini til eigararnar á aðalfundinum hin 23. apríl 2021

Ein gjøgnumgongd av árinum 2020 er valla møgulig uttan at nevna koronufarsóttina, sum í størri og minni mun hevur herjað allan heim.

Á grækarismessu í fjør, tá ið landið lat aftur og fór niður í ferð, fyri at verja land og fólk móti koronufarsóttini, hevði SEV longu tikið neyðug stig til at verja elskipanina og harvið tryggjað veitingartrygdina.

SEV, ið varðar av samfelagsberandi tænastum, er ein hornasteinur undir føroyska samfelagnum. Ta ábyrgdina og tað álitið taka vit í allarstørsta álvara.

Tí hevur SEV ikki bara fylgt almennu tilmælunum, men hevur havt skerpaði tiltøk og atlit fyri at tryggja veitingartrygdina í landinum, og starvsfólk hava uttan at himprast tikið undir við og virkað í samsvari við herdu koronutiltøkini á SEV.

Virksemið hjá SEV síðani seinasta ársaðalfund verður lýst nærri í hesi frágreiðing, har nevndin lýsir tey mál, sum nevndin metir hava størstan áhuga hjá eigarunum. Frágreiðingin verður latin sambært grein 3, stk. 12b og grein 4, stk. 11a í viðtøkum felagsins.

NÝGGJ NEVND

Á eykaaðalfundi í SEV fríggjadagin 19. februar 2021 varð nevndin mannað av nýggjum soleiðis:

Kári Johansen, umboðandi Tórshavn, Haraldur S. Hammer, Norðstreymoy, Sonni L. Petersen, Eysturoy, Sune Jacobsen, Vágar, Oddmar á Lakjuni, Norðoyggjar, Poul Klementsen, Sandoy og Niclas Hentze, umboðandi Suðuroy.

Nevndin skipaði seg eftir fundin. Formaður er Kári Johansen og næstformaður er Haraldur S. Hammer.

Á eykaaðalfundinum hin 19. februar í ár varð einmælt samtykt, at bygnaðurin í orkufelagsskapinum SEV skal eftirmetast, og um hildið verður neyðugt, skal ítøkiligt tilmæli gerast um ábøtur á verandi bygnað. Møguligt uppskot um nýggjan bygnað verður lagt fram á eykaaðalfundi seinri í ár.

5 borgarstjórar og nevndarformaðurin fyri SEV manna eftirmetingarbólk, sum sjálvur tilevnar arbeiðssetningin og tekur sær tann uttansyndis førleika, sum neyðugur er, eisini innan úr felagnum, fyri at røkka skilabesta úrslitinum.

Hesir manna bólkin

Heðin Mortensen, Tórshavnar kommuna, Karl H. Johansen, Klaksvíkar kommuna, Torbjørn Jacobsen, Runavíkar kommuna, Bjarni Prior, Vága kommuna, Kristin Michelsen, Tvøroyrar kommuna, Kári Johansen, nevndarformaður í SEV.

POLITISKA GONGDIN

Sitandi samgonga hevur sett sær fyri at endurskoða elskipanina; hetta varð kunngjørt í samgonguskjalinum frá september 2019.

24. februar 2020 skipaði SEV fyri evnisdegi fyri Helga Abrahamsen, landsstýrismanni í umhvørvis- og vinnumálum. Evnisdagurin viðgjørdi elskipanina og grønu kósina. Saman við landsstýrismanninum luttóku eisini viðkomandi starvsfólk í ráðnum og á Umhvørvisstovuni.

Í juli 2020 legði landsstýrismaðurin saman við einum arbeiðsbólki hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum (UVMR) fram fyri kommununum og SEV fatanina hjá landsstýrismanninum av, hvussu elskipanin skuldi umskipast vísandi til orðingina í samgonguskjalinum "Arbeitt verður við at skilja elnetið hjá SEV frá hinum virkisøkinum, soleiðis at fult gjøgnumskygni verður í kostnaðinum av netpartinum. Fult gjøgnumskygni skal vera grundarlag undir, at privatar fyritøkur skulu hava møguleika at leiga og at framleiða seg inn á elnetið, og síðani selja".

Kommunurnar, sum eigarar av SEV, viðgjørdu beinavegin støðuna og gjørdu vart við sína ónøgd. Sjónarmiðið er, at møguligar broytingar yvirskipað skulu gagna brúkaranum og skunda undir málið um at fáa grønari orku. Kommunufelagið og SEV vóru á fundi við Bárð á Steig Nielsen, løgmann og Helga Abrahamsen, landsstýrismann hin 17. september 2020 um, hvussu arbeiðast skuldi frameftir.

"Vit standa sum samfelag framman fyri stórum umhvørvisligum avbjóðingum, umframt hækkandi oljuprísi, og hendan avbjóðingin krevur eina dagføring og/ella umskipan av øllum orkuøkinum - ikki bert av elskipanini"

Hin 24. september 2020 vóru Kommunufelagið og SEV á fundi við Helga Abrahamsen, landsstýrismann um arbeiðssetningin, sum arbeiðsbólkurin hevði fingið frá ráðnum. Semja var um at víðka arbeiðssetningin til eisini at fevna um loysnir við støði í verandi deildarbýtinum á SEV og við støði í sundurskiljing innan ein samtaksleist.

Innan rammuna av víðkaða arbeiðssetninginum hevur SEV samskift við arbeiðsbólkin hjá UVMR um elorkuskipanina, m.a. um hvørjir trupulleikar, avmarkingar, forðingar og fyrimunir eru í verandi skipan, og hvussu skipanin kann betrast.

Arbeiðið við at skapa størri gjøgnumskygni í veitingini frá SEV er í gongd. Um stutta tíð kann støða takast til, um nýggj prísskipan skal setast í verk. Talan kann blíva um skipan, har prísurin til dømis broytist dag fyri dag ella tíma fyri tíma í mun til ítøkiligu kostnaðirnar í elveitingini.

Ein slík skipan skal eggja brúkarunum at brúka grøna og bíligari elorku, og geva brúkarum og vinnulívinum størri gjøgnumskygni og rásarúm viðvíkjandi nýtslu og kostnaði av elorku. Ikki minst miðar ein slík skipan ímóti at gagnnýta útbúnaðin hjá SEV best møguligt, og soleiðis lækka tørvin á øktum mátti.

Vit standa sum samfelag framman fyri stórum umhvørvisligum avbjóðingum, umframt hækkandi oljuprísi, og hendan avbjóðingin krevur eina dagføring og/ella umskipan av øllum orkuøkinum - ikki bert av elskipanini.

SEV er av teirri fatan, at umframt eina endurskoðan av elskipanini, eigur dentur at verða lagdur á eina dagføring av øllum orkuøkinum í Føroyum. Tað er tó altumráðandi at hava sær fyri eyga, at elskipanin í Føroyum altíð er soleiðis skipað, at hon er til størst gagn fyri føroyska samfelagið, brúkaran og grønu kósina.

“ Á orkuportalinum fær kundin innlit í egna nýtslu og egið nýtslumynstur”

BRÚKARIN

Sum áður staðfest, er alneyðugt fyri grøna orkuskiftið, at vinnulívið og stovnar, eins væl og privati brúkarin, taka undir við burðardyggum loysnum, m.a. tá ið tað snýr seg um upphiting og flutning. Nýggjastu tølini vísa, at tiltøkini hjá landinum við MVG-frítøku fyri keyp av hitapumpum og elbilum o.ø. – saman við lægri elprísum til nevndu nýtslubólkar – gera mun.

Politiska skipanin eigur at hava í huga, at omanfyri nevndu stuðulsskipanir kunnu gera seg inn á eitt nú kappingarførið hjá P/F Fjarhitafelagnum, sum longu er ein grøn hitaloysn.

Vit meta, at tað er óheppið, at samgongan hevur víðkað stuðulsskipanina við mvg-frítøku til eisini at umfata hybrid og plug-in hybrid bilar. Uppruna endamálið við stuðulsskipanini er at skunda undir skiftið frá olju til elrikin akfør, ikki at stuðla bilasølu sum heild.

Prísskipan fyri almennu løðistøðirnar hjá SEV kom í gildi 5. oktober 2020. Prísirnir eru samansettir av ávikavist kilowattímaprísi og minuttprísi í mun til brúk av løðistøðini. Munur er á løðikostnaðinum um dagin og náttina, hetta partvís fyri at javna nýtsluna út á samdøgrið og partvís fyri at geva teimum, sum ikki kunnu løða heima, ein bíligari løðimøguleika.

Dentur verður lagdur á brúkarasamskifti, og seinastu árini hevur verið kunnað væl meira og oftari á heimasíðuni og øðrum pallum, har brúkarin ferðast. Somuleiðis er lagt upp til, at brúkarin samskiftir beinleiðis við SEV og fær skjótt svar umvegis sosialar miðlar.

Nýggja heimasíðan hjá SEV, sum varð verksett í desember, er eisini merkt av hesum. Partur av nýggju heimasíðuni er ein ‘orkuportalur’, har kundar hava møguleika fyri tættari samstarvi við SEV. Á orkuportalinum fær kundin innlit í egna nýtslu og egið nýtslumynstur, og serliga fyri vinnukundar og stovnar verður portalurin eitt hent amboð til betri yvirlit yvir og stýring av elnýtsluni. Møguligt fer at verða hjá kundum at rita inn á henda orkuportal umvegis almennu talgildu møguleikunum á Vanganum og við Samleikanum.

Orkuportalurin sum amboð til stýring av elnýtsluni fer serstakliga at geva meining fyri privat-, og vinnukundar og stovnar, tá komið er á mál við arbeiðnum at greina kostnaðirnar í elskipanini og harnæst verkseting av skipan við broytiligum prísum.

Elskipanin hevur tað best, um tey, sum reka hana, gera tað í tøttum samstarvi við kundan við atliti til brúkaraatferð, fyri at sleppa undan óneyðugum kostnaðarmiklum útbyggingum, sum aftur ávirka prísin.

VINDORKAN

Fyri fyrstu ferð síðan vindmyllulundin í Húsahaga varð verksett í 2014, er nýggj vindmyllulund reist í Føroyum. Tær 7 Enercon E44 vindmyllurnar eru staðsettar í Porkerishaga. Verkætlanin, sum hevur gingið eftir ætlan, bæði í mun til tíð og kostnað, varð handað P/F Vindfelagnum í Neshaga 11. februar 2021. Royndarkoyringin byrjaði í november 2020, og higartil hevur hilnast heilt væl.

Lyklatøl 2020

VATNORKA (GWt)
109
2019: 104 GWt

VINDORKA (GWt)
47
2019: 53 GWt

OLJA (GWt)
249
2019: 230 GWt

SÓLORKA (MWt)
169
2019: 0,1

BIOGASS (GWt)
1,4
2019: 0

SJÓVARFALSORKA (KWt)
17,5
2019: 0

LØÐISTØÐIR (stk.)
12
2019: 12

Sjálv vindmyllulundin er tó bert ein partur av samlaðu verkætlanini, sum eisini fevnir um battarískipan á 6 MW og ein synkronkompensator. Hetta fyri at fáa sum mest burtur úr óstøðugu vindorkuni. Mátturin í battarískipanini er líka stórur sum mátturin í vindmyllunum, og tað merkir, at battaríini einsamøll kunnu bera streymveitingina upp til ein hálvan tíma, um myllurnar brádliga steðga. Hesin hálvi tímin munar sera væl, meðan aðrar framleiðslueindir verða settar í gongd at taka yvir framleiðsluna um neyðugt. Hesi tøkniligu framtøk hava samanumtikið við sær, at elveitingin í Suðuroynni javnan kann vera 100 prosent grøn. Bygging av koplingsstøðini við nevndu útgerð er farin í gongd, og bygningurin skal eftir ætlan standa liðugur í vár. Skipanin verður tikin í nýtslu fyrst í komandi ári.

Líknandi verkætlan er ikki roynd áður, og talan er tískil um slóðbrótandi verkætlan, sum hevur vakt áhuga uttanlands, og sum vit skulu læra av, fyri at nýta somu samanseting í meginøkinum.

Arbeitt verður framhaldandi við at fremja 18 MW vindmylluætlanina á Eiði. Neyðugt hevur verið at gera broytingar í staðsetingunum av myllunum. Viðurskiftini við lendiseigarnar eru nú so gott sum greið. Eftir er, at Eiðis kommuna veitir byggiloyvi og Yvirfriðingarnevndin játtar umsóknini. Arbeiðið at útvega neyðug loyvi og neyðugar góðkenningar hevur tó verið somikið drúgt, at talan verður ikki um at reisa myllurnar fyrr enn á sumri 2022.

Verandi útbjóðingarleistur hjá myndugleikanum, sum nýttur verður í sambandi við vindorkuútboð, er ikki optimalur, og SEV arbeiðir saman við myndugleikanum at betra um útbjóðingarleistin til komandi vindorkuútboð.

Aftara rað: *Oddmar á Lakjuni, umboðandi Norðoyggjar, Sune Jacobsen, Vágar, Heri Mortensen, deildarstjóri, Sonni L. Petersen, Eysturoy, Poul Klementsen, Sandoy, Niclas Hentze, Suðuroy.*
Fremra rað: *Bogi Bendtsen, deildarstjóri, Hákun Djurhuus, stjóri, Kári Johansen, formaður, umboðandi Tórshavn, Haraldur S. Hammer, næstformaður, umboðandi Norðstreymoy, Jón Nielsen, deildarstjóri*

ÍLØGUR

331

MILLIÓNIR KRÓNUR

Íløgurnar javnt býttar millum framleiðslu og net

Tað er tó ikki bert útbjóðingarleisturin, sum er óheppin. Mannagongdir, sum eru niðurfestar í elveitingarlógina, verða ikki altíð hildnar, og tað er ørkymlandi.

Seinasta dømi um hetta er Open-door umsókn um loyvi til at framleiða vindorku á Gellingarkletti í Hoyvíkshaga, sum Umhvørvisstovan fekk í januar í ár. Heldur enn at ráðføra seg við SEV um umsóknina, avgjørdi myndugleikin at viðgera umsóknina, uttan at kenna tøkniligu og fíggjarligu avleiðingarnar av hesum, og síðan at lýsa vindútboð. Hetta viðførir eina óneyðuga eykarokning til brúkaran, samstundis sum at veitingartrygdin verður sett í váða, tí at skipanin verður sett undir trýst.

SEV hevur gjørt vart við vansarnar við at loyva fleiri vindmyllum inn á netið, áðrenn skipanin er til reiðar til tess. Eisini hevur SEV gjørt vart við, at sjálv framferðin ikki lýkur ásetingarnar í elveitingarlógini, men myndugleikin hevur ikki latið við seg koma.

Við tað at SEV stendur til svars yvirfyri samfelagnum hvat veitingartrygd, elgóðsku og elprísi viðvíkir, og vit eru sannførd um, at ætlaða útboðið er ábyrgdarleyst, kenna vit okkum noydd at umhugsa at fara víðari við hesum máli, um so er at málið ikki tekur aðra vend.

Í Flatnahaga kann Magn fara undir at seta upp 6 Enercon E82 vindmyllur. Sp/f Vindrøkt kærdi tilsøgnina frá Orku til P/F Magn um loyvi til at reisa 18 MW av vindorkumátti í Flatnahaga, men Vinnukærunevndin hevur staðfest tilsøgnina.

Í Neshaga hava fleiri av myllunum fingið skaða við kortslutningi í generatorunum, og hava tær tí staðið stillar í longri tíð. Nú framleiða allar uttan ein aftur. Talan er um størri umvælingar, og SEV samskiftir við Enercon um at fáa framt ábøtur, soleiðis at skaðarnir ikki endurtaka seg.

Enercon hevur avtalu við Mest um at røkja myllurnar í Føroyum. Hjá SEV eru vit fegin um, at tænastan er blivin betri, við tað, at skúlaði fólk altíð eru í landinum, til reiðar at traðka til, eisini tá smábrek eru á myllunum, og harumframt er tað jaligt, at grøna kósin á henda hátt hevur avleitt virksemi við sær til gagns fyri føroyskt vinnulív.

SEV er farið undir at gera kanningar av møguleikanum at staðseta eina 96-120 MW sjóvindmyllulund í Føroyum við eini mettari úrtøku á 420-520 GWt. Til samanberingar er vindmyllulundin í Húsahaga 12 MW.

Kanningarnar umfata dýpdir, botn-, aldu- og vindviðurskifti, umframt umhvørvisárinsmetingar. Umsókn er send myndugleikunum um loyvi til at fara undir hetta kanningararbeiðið. Eisini skulu kanningar gerast í mun til íbinding og flutning av orkuni, ið kemur frá eini sjóvindmyllulund, umframt hvørji tiltøk skulu gerast fyri at tryggja framhaldandi støðufesti í elskipanini. Metti kostnaðurin fyri verkætlanina er smáar tvær mia. kr. Ætlanin er at fíggja verkætlanina í samstarvi við føroyskt vinnulív og grunnar.

Í sambandi við avrokningina millum P/F Vindfelagið í Húsahaga og SEV, sum er regulerað í prísavtalu, ið er góðkend av Elveitingareftirlitinum, hevur SEV gjørt vart við, at feilur er í tekstinum í prísavtaluni, soleiðis at skilja, at prísavtalan ikki endurspeglar alt tað búskaparliga grundarlagið, sum var í útboðnum. SEV samskiftir við myndugleikan um málið.

PUMPUSKIPAN Í VESTMANNA

Hóast SEV enn ikki hevur fingið svar upp á umsókn um loyvi til eina pumpuskipan í Vestmannaøkinum millum Heygadal og Mýrarnar, so hevur støðugt verið arbeitt við hesum.

Nú fyriliggur eitt endaligt skipanaruppskot. Næsta stig er eitt projektuppskot, og farið verður undir at gera hetta, so skjótt sum loyvi frá myndugleikanum fyriliggur. Talan er um eina rættuliga stóra og slóð-

TØKT GJALDFØRI

527

MILLIÓNIR KRÓNUR

Miðað verður ímóti at endurfíggja partar av skuldini innan árslok 2021, tó í seinasta lagi november 2022

brótandi verkætlan, sum verður krumtappurin í nýggju grønu elskipanini. Hendan verkætlanin er avgerandi fyri at meira vindorka kann fáast inn á elskipanina.

Ein seinkað pumpuskipan kann lættliga gerast ein fløskuhálsur á grønu kósini. Tí er tað altavgerandi, at myndugleikin nú viðger og avgreiðir umsóknina.

ONNUR GRØN ÁTØK

Nú eitt ár eftir, at royndarverkætlanin við sólorku í Sumba varð verksett, kann staðfestast, at skipanin roynist væl. Talan er um eitt 262 kW anlegg, staðsett á fótbóltsvøllinum á Krossinum í Sumba. Ikki óvæntað, er úrtøkan munandi minni um heystið og serliga veturin enn um summarið. Besta úrtøkan fekst í mai, juni og juli. Tilsamans framleiddi sólorkulundin í Sumba 169.000 kWt í 2020, sum svarar til árligu miðalnýtsluna hjá á leið 35 húsarhaldum.

Í Vestmannasundi halda royndirnar við sjóvarfalstøknini hjá svensku fyritøkuni Minesto fram. 'Havfrúgvin', sum annar 100 kW drekin er nevndur, hevur verið royndarkoyrd í fleiri umførum í sundinum. Ætlandi kemur seinni drekin til landið fyrra hálvár 2021, tá farið eisini verður undir meira varandi 'koyring'.

Minesto og SEV fara saman við øðrum undir størri verkætlan innan sjóvarfalsorku, har ætlanin er at flota 4 størri drekar á 1,2 MW í Hestfirði. Til hesa verkætlan er umsókn send ES European Green Deal Call grunninum.

Sjóvarfalsorka er forsøgin orka, í mun til eitt nú sól og vind. Hetta ger sjóvarfalsorku til eitt rættuliga áhugavert møguligt ískoyti til samansetingina av grønum orkukeldum í Føroyum.

Biogassverkið á Skarðshjalla er farið undir framleiðslu. Á verkinum er ein gassmotorur, ið framleiðir el, og veitir el til biogassframleiðsluna; avlopið verður latið inn á elnetið. Í 2020 framleiddi biogassverkið 1,39 GWt inn á netið hjá SEV. Hetta svarar til 0,34% av samlaðu framleiðsluni og streym til ársnýtsluna hjá gott og væl 371 húsarhaldum.

P/F Fjarhitafelagið, sum SEV eigur helvt um helvt við Tórshavnar kommunu, leggur komandi tvey árini høvuðsleiðingina lidna millum miðbýin og vesturbýin. Tað verður eitt munadygt stig fyri inntøkugrundarlagið hjá felagnum.

Landstreymsskipanir hava verið umrøddar á fleiri aðalfundum hjá SEV og ætlanin var, at SEV skuldi skipa fyri einum almennum temadegi um hetta evni. Orsakað av Covid-19 ásetingunum er hetta tó seinkað nakað og ætlandi kemur temadagurin á skrá nú til várs.

"Ein seinkað pumpuskipan kann lættliga gerast ein fløskuhálsur á grønu kósini. Tí er tað altavgerandi, at myndugleikin nú viðger og avgreiðir umsóknina"

Samstarvað er við Umhvørvisstovuna og Dansk Energi um at greina búskaparligu treytirnar fyri smærri og størri elframleiðsluverk hjá triðja parti, og serliga um tey viðurskiftini, sum fevna um eginnýtslu. Eginnýtsla kemur fyri, tá ið framleiðslueindin verður íbundin innanfyri elmálaran. Núverandi búskapartreytir hjá SEV innihalda ikki hendan møguleikan, og neyðugt er tí at greina hetta nærri. Harumframt hevur Umhvørvisstovan givið eitt loyvi til eginnýtslu við treytum, ið SEV ikki kann góðtaka, og tí hevur SEV kært hetta mál til Vinnukærunevndina.

SEV er eisini við í trý ára norðurlendskari verkætlan um avlopsorku og flexnýtslu, sum Umhvørvisstovan samskipar fyri Norðurlendska Ráðharraráðið.

AÐRAR ÚTBYGGINGAR

Stóra verkætlanin við stød 3 á Sundsverkinum er at enda komin. Arbeiðið hevur gingið væl, og ætlanin var at hátíðarhalda yvirtøkuna við tiltaki tann 29. apríl í fjør, har almenningurin fekk høvi at vitja Sundsverkið, men støðan við Koronu loyvdi ikki hesum. Samlaði kostnaðurin er uppgjørdur til 758 milliónir krónur. Tá er ein nýggj koplingsstød fyri umleið 60 milliónir krónur íroknað. Sostatt helt verkætlanin seg væl innanfyri fíggjarligu karmarnar. Verkið roynist væl, og Føroyar hava fingið alneyðugan tryggan mátt í tøkum tíma.

Nýggju krøvini til brennioljur til skiparakstur, sum vórðu sett í gildi 1. januar 2020, verða eisini galdandi fyri oljusløg, sum SEV brúkar til elframleiðsluna. Elfelagið hevur tó fingið undantak frá nýggju krøvunum galdandi til 1. apríl 2021. Søkt er um leinging av undantaki. Skerpaða kravið setir eyka trýst á elprísin, tá ið tað verður sett í gildi.

Í Vestmanna er nýggj koplingsstød bygd, sum verður tikin í nýtslu fyrsta ársfjórðing í 2021. Somuleiðis var nýggja 20 kV koplingsstøðin á Sundi liðug og tikin í nýtslu í 2020.

Arbeiðið at leggja 60 kV kaðlar frá Strond til koplingsstøðina undir Fossum og víðari til koplingarstøðina Innan Eið gongur eftir ætlan. Kaðalleggingin frá Strond og ígjøgnum Klaksvíkina er liðug, og somuleiðis av Innan Eið og ígjøgnum Norðoyartunnilin.

Arbeiðið at leggja 20 kV kaðlar millum Tvøroyri og Vág er í gongd. Eftir ætlan verður hetta arbeiðið liðugt á leið um 2 ár. Kaðalleggingin millum Hvalba og Trongisvág er liðug.

At kaðalleggja og byggja trafostøðir í Eysturoyartunlinum er eisini gjørt. Tilsamans eru bygdar 11 trafostøðir í tunlinum, og 34 km av kaðlum eru lagdir ígjøgnum tunnilin.

Umvælingararbeiðið av skrivstovubygninginum á Landavegi 92 er stórt sæð liðugt. Kostnaðurin av samlaðu ætlanini verður væntandi uml. 39 milliónir krónur. Umframt eina totala dagføring av

bygninginum, er hitaskipanin løgd um til fjarhita, sólpanelir eru á tekjuni, og neyðstreymsanlegg er sett upp.

SEV eftirmetir regluliga bygnað og virksemi sítt, og avgjørt er at dagføra og effektivisera bygnaðin á framleiðslu- og netøkinum. Hetta inniber m.a., at kontrollrúmið er flutt av Fossáverkinum í Vestmanna til fyrisitingarbygningin á Landavegnum í Havn. Manningin á verkinum á Strond í Klaksvík er flutt á Fossáverkið, og verkið á Strond verður, umframt framvegis at vera virkið, karmur um savn. Fossáverkið er heimstaður fyri nýggja deild: Deildin fyri grønu orkuverkini, sum varðar av øllum vatnorku- og vindorkuverkunum í meginøkinum.

NETIÐ OG STREYMSLIT

Netið verður støðugt dagført og útbygt. Afturat útbyggingunum við koplingsstøðum, verður alt størri partur av elnetinum kaðallagdur fyri at styrkja veitingartrygdina, tryggja eina støðuga elveiting og fyribyrgja streymslitum.

Trupult er tó at sleppa heilt undan einstøkum streymslitum. Í 2020 vóru 18 størri og smærri streymslit, harímillum 5 sonevnd black out í meginøkinum - í februar, í september og trý í november. Hetta eru væl fleiri black out, enn vit annars eru von við í nýggjari tíð.

Seinasta black out var í sambandi við illveðrið 21. november, meðan black out'ini 4. og 16. november bæði høvdu sín uppruna á koplingsstøðini á Válinum í Vestmanna. Black out í februar og september vóru orsakað av ávikavist tekniskum breki í sambandi við royndarkoyring á Sundsverkinum, og menniskjaligum mistaki hjá undirveitara hjá SEV.

Sum áður nevnt, verður nýggj koplingsstøð í Vestmanna tikin í nýtslu fyrsta ársfjórðing í 2021, og loysir av gomlu koplingsstøðina á Válinum.

Elskipanin í Suðuroy er ikki tengd at meginøkinum og verður sostatt ikki ávirkað av streymslitum í meginøkinum. Í 2020 vóru fýra streymslit í Suðuroy. Talan var um eitt kaðalbrek og trý linjubrek, tað seinasta í sambandi við illveðrið 21. november.

ANNAÐ NEVNDARARBEIÐI

Á aðalfundinum á heysti 2016 var spurningurin um nevndarsamsýning hjá SEV umrøddur. Nevndin arbeiðir við hesum máli, og ætlandi skuldi verið komið á mál til eykaaðalfundin í november 2018. Landsumsitingin, ið er góðkennandi myndugleiki hesum viðvíkjandi, arbeiðir við somu spurningum í løtuni. Tí er hóskandi at bíða eftir niðurstøðuni hjá umsitingini, so at nevndin kann hava hetta arbeiðið í huga, tá nevndin heldur fram at viðgera hetta málið um nevndarsamsýning.

Undanfarna nevnd hevur arbeitt við spurninginum um, hvussu nevndarvalið fer fram. Tey hildu, at tað styrkir nevndararbeiðið, um ikki allir nevndarlimirnir standa fyri vali í senn. Tað hevur meira enn so hent seg, at allir sjey nevndarlimirnir eru nývaldir, og er hetta óheppið.

Fyri at optimera nevndararbeiðið, hevur undanfarna nevndin í samráð við uttanhýsis ráðgeva mátað og eftirmett egið arbeiði og arbeiðslag. Harumframt hevur undanfarna nevndin hildið strategidagar og arbeitt við framtíðar skipan av eløkinum.

"Sjóvarfalsorka er forsøgin orka, í mun til eitt nú sól og vind. Hetta ger sjóvarfalsorku til eitt rættuliga áhugavert møguligt ískoyti"

ROKNSKAPARÚRSLIT 2020

Úrslitið hjá SEV í 2020 er 49,8 milliónir krónur eftir skatt. Hetta úrslit er í lakara lagi í mun til virksemi felagsins. Tó skal sigast, at við avbjóðingunum við Koronu, sum hava verið í ár, er úrslitið nøktandi.

Oljan er framhaldandi ein stór útreiðsla hjá SEV, og oljunýtslan tilsamans verður umleið 165 milliónir krónur í 2020. Hetta er í søgu felagsins mesta oljunýtslan í einum ári, bæði í nøgd og í kostnaði. Seinkaður, nýggjur grønur framleiðslumáttur, eitt ár har elframleiðslan við vindi og vatni hevur verið undir miðal og ein stór øking í nýtsluni hava saman elvt til øktu oljunýtsluna.

Lyklatalið fyri skuldina í mun til innløgu (á fakmáli stytt NIBD/EBITDA) verður 6,2 ferðir, sum er 0,2 oman fyri mest "loyvda" sambært innanhýsis áseting hjá felagnum. Hetta er undir markinum í lániavtalunum. Tá ið fíggjarætlanin fyri 2020 bleiv gjørd, var longu greitt, at farið fór at verða út um innanhýsis markið, og at arbeiðast skuldi fyri, at viðurskiftini komu aftur á beint í 2021. Sambært fíggjarætlanina fyri 2021 heldur hendan ætlanin.

FÍGGJARÆTLANIN 2021

Fíggjarætlanin í 2021 er løgd til rættis uttan prísbroytingar. Hon gevur eitt ætlað yvirskot á 61,7 milliónir krónur fyri skatt og 50,6 mió. kr. eftir skatt. Tá er ikki lagt upp fyri øktum útreiðslum til olju við lægri svávulinnihaldi enn tann oljan hevur, sum SEV nýtir í dag.

Hetta er eitt nøktandi úrslit, og lyklatalið (NIBD/EBITDA) verður 6,0 ferðir.

Komandi úrslitini hjá felagnum skulu liggja á hesum støði, nú stórar útbyggingar til gagns fyri veitingartrygdina, veitingarskylduna og grønu kósina eru á skránni, samstundis sum munandi eginfígging skal útvegast.

Elfelagið hevur fingið til vega nýggja fígging í sambandi við vindmylluútboðini. Sambært avtalu við fíggjarveitararnar er minstakravið til eginpeningspartin lækkað úr 37,5% niður í 35% í sambandi við, at SEV vann vindmylluútboðið á Eiði.

Endurfígging av stórum parti av verandi fígging og nýggj projektfígging til eina komandi pumpuskipan skal útvegast sum skjótast, og miðað verður ímóti at fáa hetta liðugt avgreitt í seinasta lagi við ársenda 2021.

NÝHUGSAN OG NÝSKAPAN

Nevndin heldur alla orsøk vera til at halda fram á grønu leiðini við góðum treysti. Nú 100 ár eftir, at fyrsta vatnorkuverkið í Botni í Suðuroy varð verksett og 75 ár síðan SEV varð stovnað, flytir føroyska elnetið nú brúkaranum elorku framleidda úr fimm ymiskum orkukeldum, harav fýra eru burðardyggar, ávikavist vatn, vindur, sól og biogass. Fyrstu kWt eru eisini komnir úr sjóvarfalli.

Tað skal til eina og hvørja tíð vera fullkomiliga greitt, hvar ábyrgdin av veitingartrygdini, veitingarskylduni og elgóðskuni liggur. Høvuðsendamálið við elskipanini eigur at verða trygg, bílig og burðardygg elorka til brúkaran, vinnulívið og alt tað føroyska samfelagið. Land og kommunur eiga at finna felags stev fram í móti at náa málinum at hava 100% grøna elframleiðslu á landi í 2030.

Kári Johansen
nevndarformaður, 19. mars 2021

Bygnaður

Allar kommunur í Føroyum eiga SEV, og umboð fyri kommunurnar manna nevndina í SEV.

Sjey limir eru í nevndini. Vága, Streymoyar, Eysturoyar, Norðoya og Sandoyar sýslur eiga ein lim í part, og Suðuroyggin og Tórshavnar Kommuna hava hvør sín nevndarlim.

Stjórin í SEV, Hákun Djurhuus, hevur dagligu fyristøðu felagsins, og myndar dagligu leiðsluna saman við trimum deildarstjórum.

Bogi Bendtsen er deildarstjóri fyri fyrisitingini, Jón Nielsen deildarstjóri fyri elnetinum, og Heri Mortensen er deildarstjóri fyri elframleiðsluni.

Stjórin og deildarstjórarnir hava, hvør á sínum øki, skyldu til at at ansa eftir, at fyrisiting, umsiting av virkjum og virkisarbeiði Elfelagsins verða gjørd á besta hátt. Teir hava eisini ábyrgd av, at gjørt verður eftir teimum lógum og reglum, sum hitt almenna fyrisetur.

Fimm grønar orku-keldur í elskipanini í 2020

2020 var fyrsta árið, elorka frá fimm ymiskum varandi orkukeldum var framleidd í føroysku elskipanini. Kortini stavaðu bert 38,7 prosent av samlaðu elframleiðsluni frá grønari orku. Orsøkin er óvanliga høgur eftirspurningur, seinkingar á grønu kósini og eitt vindorkuár undir miðal

Samanumtikið var 2020 eitt hampiliga gott vatnorkuár og eitt vindorkuár undir miðal við brekum í fleiri vindmyllum. Samstundis hendi tað gleðiliga, at elorka á fyrsta sinni var framleidd burtur úr fimm varandi orkukeldum – úr vatni, vindi, sól, biogassi og sjóvarfalli. Kortini kom grøna elframleiðslan bert upp á 38,7 prosent av elframleiðsluni tilsamans.

- Hetta lýsir væl, hvussu nógv ymisk viðurskifti skulu spæla saman, tá talan er um at flyta føroysku orkunýtsluna á landi frá olju til 100 prosent grøna orku. Tá ið tað gongur væl á einum øki, kann tað samstundis ganga verri onkra aðrastaðni í okkara kompleksu skipan, sigur Hákun Djurhuus, stjóri í SEV.

Hann vísir á, at seinnu árini hevur avbjóðingin verið at nøkta óvanliga stóra eftirspurningin eftir elorku, sum stavar frá nógva virkseminum í samfelagnum, samstundis sum seinkingar hava verið í grønu útbyggingunum.

- Tað kann ikki undirstrikast nóg væl, hvussu týdningarmikið tað er fyri Føroya land, at myndugleikarnir skipa karmarnar rundan um grønu útbyggingarnar komandi árini við tí fyri eyga, at tað er bæði skjótt og trygt at byggja grønar okukeldur inn í føroysku elskipanina, staðfestir Hákun Djurhuus.

SEV-stjórin sipar til, at føroyska samfelagið í 2021 aftur missir eitt ár við grønum útbyggingum, hóast bæði SEV og MAGN eru til reiðar at fara í gongd ávikavist á Eiði og í Flatnahaga. Á báðum støðum hava m.a. atgongd til lendi og kærumál seinkað verkætlanunum.

GRØNU TØLINI FARA SKEIVA VEGIN

Í 2015 stavaðu 60 prosent av elframleiðsluni frá grønum orkukeldum, og 40 prosent av samlaðu



Sólorkulundin í Sumba

Vindorka og vatnorka í Suðuroy

Biogassverkið, Førka

elorkuni vóru framleidd á oljuriknu verkunum. Tað er higartil besta árið við grønari orku. Høgi eftirspurningurin seinnu árini og vantandi útbyggingar á grønu kósini hava vent hesi myndini á høvdið fimm ár seinni.

Hesi fimm árini er elframleiðslan økt 92,4 GWt – úr 314,4 GWt í 2015 upp í 406,8 GWt í 2020. Bara seinastu tvey árini hevur vøksturin í elnýtsluni verið 55 GWt.

Tað gongur sjón fyri søgn, at ætlaðu vindmyllulundirnar hjá SEV á Eiði og hjá Magn í Flatnahaga høvdu havt munað væl í grønu framleiðslutølunum. Um báðar vindmyllulundirnar vórðu reistar í 2021 og fóru at framleiða í august, so hevði hevði úrtøkan frá hesum vindmyllum seinna hálvár 2021 – varliga mett – verið umleið 50 GWt. Framleiðslan á Sundi hevði beinleiðis minkað við sama tali.

Tó er tað ein stórur bati fyri Suðuroynna, sum er leys av meginøkinum, at vindmyllulundin í Porkeri er tikin í nýtlsu. Í Suðuroy økist grøna orkan 21 GWt í 2021, og tað eru samstundis 21 GWt, sum verða spardir í olju á Vágsverkinum.

Um støði verður tikið í 2020-tølum fyri alt landið, so hevði býtið millum grøna og termiska orku í 2021 verið 51 prosent varandi orka og 49 prosent termisk orka – treytað av, at tað hevði eydnast at fingið báðar vindmyllulundir í meginøkinum í rakstur seinna hálvár 2021. Í hesum roknistykkinum hevði talan verið um bert hálvt ár við munandi øktari vindframleiðslu, sum hevði spart føroyska samfelagnum oljuútreiðslur fyri 50 GWt – t.e. 10.500 tons av tungolju.

"Tá ið tað gongur væl á einum øki, kann tað samstundis ganga verri onkra aðrastaðni í okkara kompleksu skipan"

Havandi í huga, at ongar grønar útbyggingar verða í meginøkinum í 2021, og at vøksturin í elnýtsluni samstundis heldur fram, fer elframleiðslan við olju á Sundsverkinum í 2021 framhaldandi at vera á sama støði sum í 2020. SEV væntar tó eitt vet betri úrtøku úr bæði vindi og vatni í 2021, tí at hesar báðar orkukeldurnar royndust lutfalsliga illa í 2020. Sostatt verður roknað við, at elframleiðslan á Sundi verður umleið 215 GWt í 2021 sammett við 218 GWt í 2020.



Samlaða framleiðslan í 2020

- Samanumtikið, tá ið Suðuroyggin er íroknað, verður býtið í samlaðu elframleiðslan í 2021 væntandi 45 prosent varandi orka og 55 prosent termisk orka. Og tá eru vit á sama støði sum í 2005. Tað er tí harmiligt, at vit ikki hava fingið gongd á grønu útbyggingarnar í meginøkinum enn, staðfestir Heri Mortensen. deildarstjóri fyri elframleiðsluni hjá SEV.

ELFRAMLEIÐSLAN 2020

Í 2020 stavaðu 38,7 prosent av samlaðu elframleiðsluni frá varandi orkukeldum, og sostatt komu 61,3 prosent frá oljuriknu elverkunum.

Meðan vatnorkuframleiðslan øktist fimm prosent í mun til 2019, minkaði vindorkuframleiðslan 10 prosent. Laka úrtøkan úr vindorku stóðst serliga av, at fleiri vindmyllur bæði í Neshaga og í Húsahaga vóru raktar av generatorbrekum, sum krevja umfatandi umvælingar. Eitt serligt generatortoymi hjá ENERCON í Svøríki tekur sær av umvælingunum, men arbeiðið hevur partvíst verið darvað av koronuavmarkingum.

BIOGASS OG SÓL ERU NÝGGJAR ORKUKELDUR.

Biogassverkið, Förka, sum kom í gongd í september 2020, hevur roynst væl, og hetta tíðarskeiðið hevur biogassið umboðað eitt prosent av samlaðu elframleiðsluni. Tað svarar til nýtsluna hjá umleið 1200 húskjum.

Sólorkuverkið í Sumba, sum fór undir royndarframleiðslu móti ársenda 2019, var í rakstri alt árið 2020. Verkið hevur roynst væl við einari framleiðslu, sum

"Tað kann ikki undirstrikast nóg væl, hvussu týdningarmikið tað er fyri Føroya land, at myndugleikarnir skipa karmarnar rundan um grønu útbyggingarnar komandi árini við tí fyri eyga, at tað er bæði skjótt og trygt at byggja grønar okukeldur inn í føroysku elskipanina"

liggur beint oman fyri tað, ið var væntað – 169.000 kWt. Tað svarar til árligu elnýtsluna hjá 35 sethúsum.

Sjóvarfallið var fimta varandi orkukeldan í 2020. Talan var um royndarkoyringar við sjóvarfalsdrekanum hjá Minesto í Vestmannasundi móti ársenda 2020, har sjóvarfalsdrekin framleiddi beinleiðis inn elnetið.



Ein prototypa av sjóvarfalsdrekanum

VATNIÐ OG VINDURIN

Elframleiðslan úr vatni royndist betur enn í 2019 við 108,6 GWt, sammett við 103,5 GWt í 2019. Tað er ein vøkstur á fimm prosent. Tó hevur framleiðslan úr vatni sum heild hilnast eitt vet verri, eftir at vatnorkan setti met tvey ár á rað í 2014 og 2015.

26,7 prosent av samlaðu elframleiðsluni vóru framleidd úr vatni í 2020. Í 2019 var hetta talið 26,8 prosent.

Framleiðslan úr vindi í meginøkinum hilnaðist illa í 2020. Tekniskir trupulleikar tóku seg upp í vindmyllunum bæði í Neshaga og í Húsahaga. Úrtøkan í Húsahaga var 30,6 GWt, og tað er lakasta heila árið, síðan vindmyllurnar í høvuðsstaðnum vórðu settar í rakstur í oktober 2014. Miðalframleiðslan í Húsahaga árini 2015 til 2019 var 34,9 GWt.

Í Neshaga hava stórir trupulleikar staðist av generatorbrekum í trimum av fimm vindmyllum, sum hava staðið stillar stóran part av 2020. Úrtøkan gjørdist sostatt bert 60 prosent av miðalframleiðsluni árini 2015-2019.

Tó skal sigast, at framgongd var staðfest í vindorkuframleiðsluni í Vestmanna hjá P/F Vindrøkt, sum framleiddi 8,3 prosent meira elorku í 2020 sammett við 2019.

METHØGUR EFTIRSPURNINGUR

Føroyingar brúka streym sum ongantíð fyrr. Samlaða elframleiðslan fór fyri fyrstu ferð upp um 400 GWt í 2020, tá ið elframleiðslan tilsamans var 406,8 GWt, sum er ein vøkstur á 5,4 prosent samanborið við 2019, tá elframleiðslan tilsamans var 386 GWt.

Seinastu 20 árini er elframleiðslan nærum tvífaldað. Í 2000 kom framleiðslan upp á 213 GWt, og í 2020 vórðu slakir 407 GWt framleiddir. Í 2010 var framleiðslan 280 GWt.

Tá vindorkuframleiðslan svíkur, og vatnorkuframleiðslan er undir miðal, samstundis sum eftirspurningurin eftir elorku er sera stórur, er eyðsæð, at tað áliggur Sundsverkinum at framleiða orkuna, sum manglar úr varandi orkukeldum.

Sundsverkið fór í 2020 fyri fyrstu ferð upp um 200 GWt við eini framleiðslu á 218,5 GWt, sum er 15 prosent meira enn í 2019. Vøksturin í framleiðsluni á Sundsverkinum frá 2018 til 2019 var 25 prosent – úr 151 GWt upp í 189 GWt. Talan er um sløk 45 prosent í øktari framleiðslu á Sundsverkinum seinastu tvey árini.

Síðan 2018, tá samlaða elframleiðslan var 352 GWt, og fram til árslok 2020 hevur vøksturin í elnýtsluni verið 55 GWt – t.e. 15,6 prosent í tvey ár.



Vindmyllurnar í Porkeri eitt frambrot

Tær sjey nýggju vindmyllurnar í Porkerishaga kunnu stundum framleiða stívliga 60 prosent av samlaða eltørvinum í Suðuroynni. Málið er við nýggjari tøkni at koma upp á nærum 100 prosent av eltørvinum í oynni

Sune Jacobsen, nevndarlimur, Hans Jákup Johannesen, næstformaður og John Zachariassen, nevndarformaður í SEV.

- Framkomin tøkni hevur væntandi við sær, at nýggju vindmyllurnar í Suðuroynni, sum longu í ávís tíðarbil hava megnað at framleitt stívliga 60 prosent av eltørvinum í oynni, stundum fara at nøkta 100 prosent av tørvinum í Suðuroynni, sigur Heri Mortensen, deildarstjóri fyri elframleiðsluni hjá SEV.

Nýggja tøknin, ið fevnir um eina stóra battarískipan og ein synkronkompensator, sum hava til endamáls at goyma og javna elorkuna út á netið, verður væntandi liðug at seta upp á heysti 2021. Battarískipanin í Porkeri verður væl størri enn battarískipanin í Húsahaga, sum javnar elorkuna út á netið eftir sekundum og minuttum. Mátturin í battarískipanini í Porkeri verður líka stórur sum mátturin í sjálvari vindmyllulundini, og tí kann nýggja battarískipanin virka sum tiltaksverk upp til ein hálvan tíma í senn í staðin fyri motorarnar á Vágsverkinum, um vindorkan brádliga minkar. Henda skipanin økir veitingartrygdina við grønari orku í Suðuroynni.

- Eins og battarískipanin í Húsahaga var ein serstøk loysn, er aftur her talan um eina sergjørda loysn til føroysku elskipanina, sum er ment víðari frá battarískipanini í Húsahaga. So eg loyvi mær at siga, at talan er um enn eitt frambrot, sigur Terji Nielsen, menningarleiðari í SEV.

Vindmyllulundin í Porkeri økir burðardyggu elframleiðsluna í Suðuroynni munandi, og elorkan, sum suðringar brúka, verður nú framleidd úr ávikavist vatni, vindi, sól og olju. Nýggju vindmyllurnar eru mettar at framleiða 2 GWt um árið, um øll orkan verður fingin inn á elnetið. Tað svarar til miðalnýtsluna hjá 4.000 húskjum, og oljunýtslan á Vágsverkinum fer at minka umleið 4.400 tons um árið.

AVBJÓÐANDI VERKÆTLAN

Tað var ein stór avbjóðing, tá SEV í 2016 fór í holt við at kanna møguleikan fyri vindmyllum í Porkerishaga. Veðurtíðindini boða ofta frá nógvum vindi á staðnum, og fyrsta avbjóðingin var at kanna vindviðurskiftini. Næsta stigið var at finna rætta staðið í haganum til vindmyllurnar, og triðja stigið var at projektera og seta tær sjey vindmyllurnar upp.

"Higartil hava úrslitini og royndirnar verið sera góð. Vindmyllurnar hava roynst væl, men hinvegin hevur eisini verið neyðugt at havt motarar á Vágsverkinum koyrandi samstundis fyri at tryggja okkum ímóti sveiggjum í elframleiðsluni"

Vindmátimasturin í Porkerishaga

Deildarstjórin fyri framleiðlsuni hjá SEV metir, at samanumtikið hava hesi trý stigini í tilgongdini at fáa meira grøna orku í Suðuroynni hepnast rættiliga væl, tá hugsað verður um ivasomu arbeiðsviðurskiftini á staðnum, har veðrið ofta hevur tarnað arbeiðsgongdunum.

Vindmyllurnar í Porkerishaga hava síðani fyrstu royndarkoyringarnar í november 2020 í ávís tíðarskeið framleitt meira enn 60 prosent av eltørvinum í oynni.

- Higartil hava úrslitini og royndirnar verið sera góð. Vindmyllurnar hava roynst væl, men hinvegin hevur eisini verið neyðugt at havt motarar á Vágsverkinum koyrandi samstundis fyri at tryggja okkum ímóti sveiggjum í elframleiðsluni, tá so nógv vindorka fer inni á elnetið í senn, sigur Heri Mortensen.

Hann vísir á, at í royndog veru fer eitt slóðbrótandi arbeiði fram í Porkerishaganum, har vindmyllurnar longu nú stundum hava framleitt meira enn 60 prosent av elorkutørvinum, og har tað við nýggjari tøkni verður møguligt at nærkast 100 prosentum.
- Tað er ikki roynt nakrastaðni áður. Vit vóna, at henda stóra battarískipanin saman við einari framkomnari stýrisskipan verður klár í oktober 2021, sigur deildarstjórin fyri elframleiðsluni hjá SEV.

ÚTLENDSKT FELAG GAV UPP

Fyrstu ábendingarnar um, at tað fór at vera ein avbjóðing at seta vindmyllur upp í Porkerishaga komu beinanvegin. Eitt útlendskt felag skuldi seta ta fyrstu vindmastrina upp, men megnaði ikki uppgávuna, og so kom stígur í. Úrslitið gjørdist, at serliga masturtoymið hjá SEV tók uppgávuna á seg. Sjálv vindmasturin var tá komin til landið, men restina av arbeiðinum noyddist toymið hjá SEV at loysa á staðnum, og amboðini máttu teir at kalla sjálvir gera sær.

Hetta var somuleiðis nógv tann hægsta masturin, sum masturtoymið hjá SEV hevur sett upp - heilar 80 metrar høg. Vanliga hæddin á vindmastrum er 20-30 metrar.

- Ein tann størsta avbjóðingin var at finna røttu staðsetingina, og úrslitini frá fyrstu vindmastrini vóru ikki nóg góð. Tí varð avgjørt at seta upp eina vindmastur aftrat. Vit høvdu brúk fyri at fáa meira vitan um vindviðurskiftini í økinum. Miðal vindferðin í Porkerishaga er oman fyri 10 metrar um sekundið, og tá er í vindmylluhøpi talan um nógvan vind, sigur Brian Joensen, verkætlanarleiðari hjá SEV.

Sjálvt arbeiðið at gera klárt til vindmyllurnar, sum Articon stóð fyri, byrjaði í januar 2020, og tíðarætlanin hevur hildið.

SUÐUROYGGIN Á ODDA Í GRØNARI ORKU

Vindmyllulundin í Porkerishaga fer at flyta Suðuroynna heilt fram í oddin, tá ræður um grøna orku í Føroyum. Harðbalnu umstøðurnar krevja tó sín prís, tá grønar orkukeldur skulu fáast til vega. Vanliga verður roknað við eini livitíð fyri vindmyllur á 20 ár, men orsakað av veðurumstøðunum í Porkerishaga, er livitíðin sett til 18 ár. Hetta tí vindmyllurnar verða útsettar fyri einum størri trýsti frá veðrinum enn til dømis vindmyllurnar í Húsahaga.

Fyri Terja Nielsen, menningarleiðara hjá SEV, er nýggja vindmyllulundin alt stríðið vert, tí hon er slóðbrótandi og veitir avgerandi vitan, sum SEV hevur stórliga brúk fyri á grønu kósini.

"Úrslitið gjørdist, at serliga masturtoymið hjá SEV tók uppgávuna á seg. Sjálv vindmasturin var tá komin til landið, men restina av arbeiðinum noyddist toymið hjá SEV at loysa á staðnum, og amboðini máttu teir at kalla sjálvir gera sær"

Linjufólk hjá SEV

- Nú kenna vit væl til vindmyllutøkni sum so, og vit síggja eisini, at vindorkan í Føroyum er sera óstøðug. Tí eru vit noydd at byggja stabiliserandi tøkni afturat. Tað ber tí tøkniliga ikki til at seta fleiri vindmyllur upp í einum og so siga, at trupulleikin við grønari orku er loystur, sum vit ofta hoyra fólk mæla til, sigur Terji Nielsen.

Hann vísir á, at áhaldandi avbjóðingin er at tryggja føroysku elskipanina ímóti sveiggjum, so hvørt fleiri óstøðugar orkukeldur verða bygdar inn í skipanina.

- Vit eru noydd at taka eitt stig í senn og læra skipanirnar at kenna, so hvørt vit seta vindorku upp. Tað eru altíð tillagingar at gera, alt eftir hvar vit seta vindmyllurnar upp. Og hetta hava vit sjálvandi eisini verið noydd at gera í Suðuroynni. Somuleiðis mugu tillagingar gerast í meginøkinum, tá vit seta vindmyllur upp har, so at tað heila koyrir, sum tað skal, sigur Terji Nielsen, menningarleiðari í SEV.



FAKTA

Tær sjey vindmyllurnar í Porkerishaga av slagnum ENERCON E-44 hava ein framleiðslumátt á tilsamans 6,3 MW. Tær eru 45 metrar høgar, og veingjabreiðið er 44 metrar. 100 tons av stáli og 900 kubikk av betongi eru brúkt til fundamentini.

Battarískipan og synkronkompensatorur eru partur av verkætlanini, og tilsamans er talan um eina íløgu á 70-80 milliónir krónur.

Sólorkan gav meiri enn væntað

FRAMLEIÐSLA

169

MWt

Árliga framleiðslan svarar til elnýtsluna hjá 35 vanligum húskjum

Sólorkulundin í Sumba hevði sítt fyrsta fulla rakstrarár í 2020. Sólorkulundin gav eitt vet meira elorku til føroysku elskipanina, enn væntað var. Knappiliga 169.000 kWt fingust burtur úr sólorkuni í 2020, tað svarar til árligu elnýtsluna hjá 35 sethúsum

Sunnast í Føroyum í ein útsynning í 2019 stóð fótbóltsvøllurin á Krossinum sum eitt ekkó av einari farnari tíð. Fótbóltsvøllurin, sum einaferð var savningarstaðið í bygdini, lá undir í runu, meðan fánaðu lýsingarskeltini bønliga skimaðust eftir uppmerksemi.

Fótbólturin, sum einaferð var ein kapping millum bygdir, var langt síðani vorðin big business, og unglingarnir, sum fyrr savnaðust á Krossinum, eru í dag partur av felagsliðum, sum berjast um fíggjarligan vinning og pláss í Betri-deildini.

Men við einari lættari umskriving av orðafellinum "maður kemur í mans stað", so samdust sumbingar um, at tíðin var komin til at sleppa fótbóltinum í bygdini og lata Krossin koma til heiður og æru við at gerast fyrsta sólorkulundin í Føroyum. 2020 var fyrsta árið, har sólpanelini í Sumba skimaðust eftir sínum plássi í grøna orkuskiftinum.

SÓLIN – TÁ REGN OG VINDUR HVÍLA

Endamálið við sólorkulundini í Sumba var veruliga at royna sólorkutøkni í Føroyum fyri at kanna eftir, um samband var millum teori og praksis. Grafarnir hjá SEV hava øll árini vístast, at vatn- og vindorkan er munandi lakari um summarið, og higartil hevur úrslitið verið, at í bestu summartíð hava motorverkini verið álitið.

Sólorkulundin á fótbóltsvøllinum á Krossinum

Terji Nielsen, menningarleiðari hjá SEV, vísti á, at teoriin segði SEV, at sólorkan kann gerast eitt gott íkast til grøna orkuframleiðslu í Føroyum.

- Sólorkan sum heild er ein áhugaverd orkukelda, haðani tað er møguligt at fáa 5-7 prosent av árligu elframleiðsluni, sum er mett til 600 GWt í 2030. Eitt sera gott ískoyti á grønu kósini – serliga um summarið, greiddi Terji Nielsen frá, stutt eftir at sólorkulundin var sett í rakstur.

Nú fyrsta árið er farið afturum og væl tað, so vísir tað seg, at sambandið millum teori og praksis heldur. Sólorkuverkið í Sumba hevur verið í rakstri alt árið 2020, og tað hevur roynst væl við einari framleiðslu beint oman fyri tað, sum upprunaliga væntað – smáar 169.000 kWt um árið. Tað svarar til árligu elnýtsluna hjá 35 sethúsum.

Verður hetta sett upp ímóti mettu úrtøkuni burtur úr sólargeislunum á Krossinum, so er ljósið, myndaliga talað, tendrað hjá trimum húsum fleiri enn væntað. Metta úrtøkan - býtt á sethús - var 32 sethús.

EITT GRØNT OG LIVANDI PUTLISPÆL

Sólorkulundin hevur fyrsta árið í rakstri knýtt bandið millum teori og praksis. Tað er tó helst nakað tíðliga at siga nakað endaligt um, hvat kann væntast av miðalúrtøkuni frá sólorku yvir fleiri ár. Sólorkan skrivar seg tískil inn í tað stóra grøna putlispælið hjá SEV, sum flytur seg, meðan tað verður lagt.

Okkurt árið setir vindorkan met, eitt annað ár fæst munandi meira burtur úr vatnorkuni, og í Vestmannasundi flýgur ein dreki í 8-tølum fyri eisini at vísa sítt virði. Fleiri grønar og spennandi orkukeldur, sum allar hava tað til felags, at tær broytast við náttúruni.

- Hóast vit temja vindin, byrgja vatnið inni, heysta sólina og reka við rákinum, so eru tað enn náttúrukreftirnar, sum gera av, hvussu nógv orka kemur burturúr. Og enn er tað oljan, sum tekur um endan, tá ið á stendur við grønari orku, sigur Terji Nielsen.

Hann vísir á, at jú meira verður lagt av putlispælinum, jú betri og sterkari verða varandi orkukeldurnar og førleikin at temja og gagnnýta tær. 5-7 prosent av sólorku um árið í 2030 gera stóran mun í samlaða putlispælinum, tá vindurin leggur seg, himmalin klárnar og havastólarnir verða tiknir út á terassurnar.

Fánaðu lýsingaskeltini á Krossinum í Sumba hava fingið eitt nýtt lívsinnihald. Tíðin, tá lýsingarnar bardust um eyguni hjá áskoðarunum sunnast í Føroyum, er av, og í dag eru tær vitni til, at sólin gevur sítt íkast til 100 prosent grøna elorku á landi í Føroyum í 2030.

"Endamálið við sólorkulundini í Sumba var veruliga at royna sólorkutøkni í Føroyum fyri at kanna eftir, um samband var millum teori og praksis"

SÓLORKA Í 2020

169

MWt

Tað svarar til árligu elnýtsluna hjá 35 sethúsum.



Biogassverkið gott ískoyti á grønu kósini

Nýggja biogassverkið, FÖRKA, læt SEV elorku í 2020, sum svarar til nýtsluna hjá 1200 sethúsum í síðsta ársfjórðingi. Tað svarar til eitt prosent av samlaðu elframleiðsluni í tíðarskeiðnum



Biogassverkið, FÖRKA, sum Bakkafrost eigur, hevur longu gjørt mun á grønu kósini. Verkið fór í gongd í september 2020, og tíðarskeiðið september-desember 2020 framleiddi FÖRKA 1357 MWt til SEV. Tað er eitt prosent av samlaðu elframleiðsluni í tíðarskeiðnum, ið svarar til elnýtsluna hjá 1200 húskjum. Leggja vit hetta út á alt árið 2020, so stóð FÖRKA fyri 0,3 prosentum av elframleiðsluni tilsamans.

Harumframt fekk Fjarhitafelagið, sum SEV eigur helvt um helvt saman við Tórshavnar kommunu, gagn av nýggja virkinum. FÖRKA veitti Fjarhitafelagnum 732 MWt í síðsta ársfjórðingi 2020. Tað svarar til hita og heitt vatn hjá umleið 122 húsarhaldum. Málið er, at Fjarhitafelagið fær 1,3 MWt av grønari hitaframleiðlsu um samdøgrið frá FÖRKA – svarandi til hita og heitt vatn til 400 sethús.

"FÖRKA fær hita og elorku burtur úr eitt nú mykju, slógvi og burturkasti frá laksavinnuni"

FÖRKA fær hita og elorku burtur úr eitt nú mykju, slógvi og burturkasti frá laksavinnuni. Talan er um lívfrøðiligt burturkast, sum fer ígjøgnum eina tilgongd á virkinum, har lívfrøðiliga gassið frá burturkastinum verður brúkt til ein gassmotor, ið gevur Fjarhitafelagnum hita, og sum veitir elmegi til SEV.

GÓÐ BYRJAN

Avlopið frá lívfrøðiligu tilgongdini kemur útaftur sum tøð til landbúnaðin, og tað hevur við sær, at innflutningurin av kunsttøðum kann minka í komandi árum.

- Byrjanin hjá virkinum hevur gingið betur enn væntað, og vit hava tikið meiri biomassa inn, enn vit upprunaliga høvdu roknað við. Frameftir ber til at taka ímóti nógvum øðrum lívrunnum burturkasti, t.d.frá bryggjarí og bakaríum, sum kann vera við til at menna framleiðsluna, sigur Fróði Mortensen, stjóri í FÖRKA.

Hákun Djurhuus, stjóri í SEV, fegnast um góðu gongdina, sum er eitt gott ískoyti á grønu kósini.

- Tess fleiri ymiskar orkukeldur vit fáa bygt inn í orkuframleiðsluna, tess fleiri bein hava vit sum eitt grønt samfelag at standa á. Og skjótari røkka vit málinum um 100 prosent grøna elorku á landi, sigur Hákun Djurhuus, stjóri í SEV.

Hans Christian Dam, stjóri í Fjarhitafelagnum, fegnast eisini um, at biogassverkið er knýtt upp í fjarhitaskipanina.

- Hetta er fyrsti grøni hitin, sum ikki stavar frá brennistøðini á Hjalla ella frá avlopshita frá Sundsverkinum. Og vit ætla at halda fram at byggja bæði vindorku og sjóvarhita inn í skipanina, sigur Hans Christian Dam, stjóri í Fjarhitafelagnum.

Sjóvarfalsorkuverk framleitt streym inn á netið

Seint á heysti 2020 náddu SEV og svenska hátøknifyritøkan, Minesto, einum søguligum varða, tá ið streymur frá sjóvarfalsorku fyri fyrstu ferð varð latin inn á føroyska elkervið. Talan er um íverkseting og royndir við sjóvarfalsdrekanum í Vestmannasundi

METT SJÓVARFALSORKA

150

MW

Tá mest eftirspurningur er eftir elorku í Føroyum, er framleiðslan oman fyri 60 MW.

Nógvar avbjóðingar hava verið við sjóvarfalsverkinum í Vestmannasundi, men tað hevur støðugt gingið framá. Nógv bendir á, at talan verður um eina sólskinssøgu innan varandi orkuframleiðslu, nú flestu forðingar eru fingnar av vegnum.

– Hetta er ein søgulig løta og eitt risa fet framá fyri Minesto og menningina av okkara serstøku tøkni. Vit eru serliga fegin um framleiðslustøðið á skipanini. Nú gleða vit okkum til at halda fram við arbeiðinum í Vestmannasundi og okkara framtíðarsamstarvi við SEV, segði Dr. Martin Edlund, forstjóri í Minesto, tá elorka frá sjóvarfalli fyri fyrstu ferð var latin inn í føroysku elskipanina í november 2020.

Eftir at undirstøðukervið við fundamenti á havbotninum, sjókaðli og transformarastøð á landi var liðugt sett upp, setti Minesto eisini sjóvarfalsdrekan út, og síðst í november 2020 var farið undir royndarframleiðslu við sjóvarfalsorkuverkinum. Sonevnda DG100 skipanin fevnir um ein dreka, tjóður og botnfesti. Botnfestið ger tað møguligt hjá drekanum at flyta seg í sjónum í einum áttatali.

Royndarkoyringin av DG100 orkuverkinum merkir, at Minesto við serstøku Deep Green-tøknini nú kann framleiða burðardygga elorku úr sjóvarfallinum í Vestmannasundi inn á føroyska elkervið.

Nevndarformaðurin í Minesto, Jonas Millqvist, fegnast somuleiðis um úrslitið.

– Hetta er eitt virðismikið fet fram móti at fáa staðfest tøknina hjá Minesto í burðardyggari orkuvinnu á sama støði sum eitt nú sjóvindmyllur. Vit flyta okkum nú frá einstøkum til størri uppsetingar eftir sama leisti, sum varð nýttur innan vindorku, sigur nevndarformaðurin í svensku tøknifyritøkuni.

Sjóvarfalsverkætlanin er tvey-ára verkætlan

Fyrsta sjóvarfalsorkuverkið i Føroyum hevur fingið navnið Havfrúgvin

"Í mun til vind-, vatn- og sólorku, sum eru tongdar at veðrinum og harvið eru óstøðugar orkukeldur, ber altíð neyvt til at siga, nær og hvussu hart rákið er og verður kring oyggjarnar"

SJÓVARFALSORKA ER FORSØGIN ORKA

Orka framleidd úr sjóvarfalli er serstakliga áhugaverd. Talan er um støðugastu varandi orkukeldu á okkara leiðum. Í mun til vind-, vatn- og sólorku, sum eru tongdar at veðrinum og harvið eru óstøðugar orkukeldur, ber altíð neyvt til at siga, nær og hvussu hart rákið er og verður kring oyggjarnar. Sostatt er talan um stórt nýbrot innan orkuframleiðslu.

Altjóða viðurkendir serfrøðingar meta, at mátturin í sjóvarfallinum um allan heim svarar til 80 GW. Sjóvarfalsorkan kring Føroyar verður mett til 1 GW. Væntandi fer at bera til at gagnnýta 15-20 prosent av føroysku sjóvarfalsorkuni, ið svara til 150-200 MW. Til samanberingar kann nevnast, at tá mesti eftirspurningur er eftir elorku í Føroyum, er samlaða framleiðslan nakað oman fyri 60 MW. Av tí sama, er potentialið í hesi orkukelduni ómetaliga stórt. Ymiskt er, hvussu tað rekur á ymsu firðunum, so um sjóvarfalsturbinurnar verða spjaddar kring oyggjarnar, ber til at hava sjóvarfall sum ein støðugan part av varandi orkukeldunum í framtíðini.

Fyrsta sjóvarfalsorkuverkið i Vestmannasundi hevur fingið navnið Havfrúgvin. Tað var Bárður á Steig Nielsen, løgmaður, sum skeyt upp at nýta navnið Havfrúgvin, tá hann vitjaði á staðnum á sumri 2020. Hetta hildu umboð fyri Minesto og leiðslan í SEV vera eitt frálíkt hugskot, tí navnið Havfrúgvin stavar frá fyrsta 4-mannafarinum, sum varð smíðað í Vestmanna í 1906. Góð 20 ár seinni fingu vestmenningar fyrsta 5-mannafarið til kappróður, ið eisini fekk navnið Havfrúgvin.

TÝÐANDI STUÐUL FRÁ ES

Í 2019 læt ES 2,5 milliónir evrur – svarandi til slakar 19 milliónir krónur – í stuðli til sjóvarfalsverkætlanina í Vestmannasundi.

– Hetta eru sera góð tíðindi fyri Minesto og samstarv okkara við SEV um sjóvarfalsorku í Føroyum. ES vísir enn einaferð, at tey hava álit á okkara slóðbrótandi tøkni og ætlanum um at íverkseta tøknina, segði Dr. Martin Edlund, forstjóri í Minesto tá við heimasíðuna hjá SEV.

Tær 2,5 milliónir evrurnar frá ES vóru latnar til arbeiðið at seta tveir Deep Green-drekar út í Vestmannasund fyri síðani at fáa til vega orkuna, sum drekarnir framleiða úr sjóvarfallinum. SEV og Minesto hava formliga samstarvað um sjóvarfalsorkuna síðani november 2018.

Fyribils sær væl út við royndunum, og alt eftir hvussu tøknin hjá Minesto roynist, kann sjóvarfalsorka gerast ein virðismikil, bíligur og tryggur partur av samansetingini av orkukeldunum í elorkuframleiðsluni í Føroyum.

"Hetta er ein søgulig løta og eitt risa fet framá fyri Minesto og menningina av okkara serstøku tøkni"

FAKTA

Tað var í 2018, at SEV og Minesto, sum er millum fremstu mennarar av havorkutøkni, byrjaðu at fyrireika sjóvarfalsverkætlanina í Vestmannasundi.

Fyritøkan Minesto varð sett á stovn í 2007 av svensku loftframleiðslufyritøkuni, Saab. Síðani tá hevur Minesto havt sera hepna hond við at menna einastandandi tøkniskipanina, nevnd Deep Green-tøknin.

Umleið 50 fólk starvast hjá Minesto við høgum tøkniligum førleika og víðfevndum royndum at menna nýggja tøkni. Toymið hjá Minesto telur royndar verkfrøðingar við ógvuliga ymiskari bakrund, ið fevna um tøkniligu økini hjá fyritøkuni. Talan er m.a. um at sniðgeva eftirlitsskipanir, vætumátt (hydrodynamik), simulering og menning av mekaniskum konstruktiónum.

Millum starvsfólkini hjá Minesto eru fólk, sum áður hava starvast í hátøkniligum fyritøkum sum Saab Aircraft, Volvo Truck Corporation og Bofors Missile Systems.

Minesto samstarvar við alheimsfyritøkur og granskingarstovnar við fremstu vitan um og framleiðslu av framkomnari tøkni av ymsum slagi.

Umframt í Svøríki hevur fyritøkan virksemi í Wales, Norðurírlandi og Taiwan. Høvuðssætið liggur í svenska býnum, Göteborg. Høvuðseigararnir í fyritøkuni eru BGA Invest og Midroc New Technology. Minesto partabrævið er skrásett á Nasdaq First North Growth Market í Stockholm.

Sjóvindmyllulund eystan fyri Nólsoynna

Føroya fyrsta sjóvindmyllulund verður møguliga veruleiki um nøkur ár. Eitt øki eystan fyri Nólsoynna skal kannast nærri til endamálið. Ein sjóvindmyllulund kann framleiða eins nógvan burðardyggan streym sum fimm vindmyllulundir á landi

SEV fer undir at kanna møguleikan fyri at staðseta eina 96-120 MW sjóvindmyllulund í Føroyum við eini mettari úrtøku á 420-520 GWt. Til samanberingar er vindmyllulundin í Húsahaga 12 MW.

– Tað er av alstórum týdningi at fáa ferð á grønu útbyggingarnar, um vit skulu gera okkum nakra vón um at gerast leys av oljuni í 2030. Í løtuni eru stórar avbjóðingar við útbyggingum á landi, og tí fara vit nú undir at kanna møguleikarnar fyri vindorkuútbygging úti á sjóøki, sigur Terji Nielsen, menningarleiðari hjá SEV.

Æltanin er at staðseta fyrstu sjóvindmyllulundina eystan fyri Nólsoynna, og har eru kanningar settar í verk, sum fevna um dýpdar-, botn-, aldu- og vindviðurskifti, umframt at umhvørvisárinsmetingar eisini verða gjørdar.

Umsókn er send myndugleikunum um loyvi til at fara undir hetta arbeiðið. Eisini skulu kanningar gerast av íbinding og flutningi av orkuni, ið kemur frá eini sjóvindmyllulund. Somuleiðis verða metingar gjørdar, hvørji tiltøk skulu gerast fyri at tryggja framhaldandi støðufesti í elskipanini.

STÓR ÍLØGA

Fígging er sjálvandi ein avgerandi fortreyt fyri einhvørjari verkætlan, og fyribils metti kostnaðurin av sjóvindmyllulundini fer at liggja millum 1,4 og 1,9 milliardir krónur.

Smáar tvær milliardir krónur er ein stór íløga, men SEV metir, at fíggingin kann fáast til vega ígjøgnum eitt breitt samstarv millum fleiri føroyskar fyritøkur. Eitt nú verandi orkuveitarar, aðrar størri fyritøkur og íleggjarar.

Ein so stór útbyggingarverkætlan hevur nógv avleitt virksemi við sær, og samstarv um verkætlanina hevði verið til gagns fyri allar partar.

"Smáar tvær milliardir krónur er ein stór íløga, men SEV metir, at fíggingin kann fáast til vega ígjøgnum eitt breitt samstarv millum fleiri føroyskar fyritøkur"

Tilgjørd mynd: Sæð úr Hoyvík



– Vit vita, at vindorka roynist væl sum burðardygg orkukelda í Føroyum. Ein trupulleiki seinastu árini hevur tó verið at koma á mál við ætlaðu vindorkuútbyggingunum ymsastaðni á landi í Føroyum. Ein sjóvindmyllulund kundi verið ein góð loysn á grønu kósini – eins væl og til økt vinnuvirksemi, sigur menningarleiðarin hjá SEV.

NETÚTBYGGING OG PUMPUSKIPAN

Ein pumpuskipan í Vestmanna er ein onnur avgerandi fortreyt fyri eini so stórari vindmyllulund.

Tilgjørd mynd: Sæð úr Nólsoy

"Vit vita, at vindorka roynist væl sum burðardygg orkukelda í Føroyum. Ein trupulleiki seinastu árini hevur tó verið at koma á mál við ætlaðu vindorkuútbyggingunum ymsastaðni á landi í Føroyum"

Yvirskotsorka frá vindi, sum annars hevði farið til spillis, skal brúkast at reka pumpuskipanina. Tað vil siga, at vindorka, sum ikki verður brúkt í elskipanini eitt ávíst tíðarbil, tí nóg mikið av óstøðugum vindi er partur av elframleiðsluni ta løtuna, skal brúkast at pumpa vatn úr byrgingini í Heygadali í Vestmanna niðan aftur á Mýrarnar. Hetta er ein háttur at goyma orkuna t.d. til minni vindur aftur er í skipanini.

Harafturat skal pumpuskipanin sum partur av vatnorkuni í framtíðini vera við til at skapa kjarnan og støðufestið í elskipanini, sum í løtuni fæst frá oljuverkunum, sum er trygg orka til at stabilisera elskipanina. Somuleiðis verður neyðugt at gera tillagingar á netinum, soleiðis at orkan kann fáast til høldar í elskipanini.

– Vit hava góðar vónir um, at hetta letur seg gera um okkara leiðir, men skal ein slík verkætlan rúmast í elskipanini, er neyðugt, at ferð eisini kemur á umleggingina av upphiting og flutningi í samfelagnum, sigur Terji Nielsen.

UM LOYVI FÆST TIL AT GERA INNLEIÐANDI

kanningararbeiði av eini sjóvindmyllulund í 2021, kann projektering fara fram í 2022, uppseting, kaðallegging og annað í 2023 og 2024, og møguliga kann farast undir elframleiðslu frá eini sjóvindmyllulund í 2025.

Stutt um 2020

Grønasti januar nakrantíð

Januar 2020 var í elorkuhøpi higartil grønasta ársbyrjan. 63 prosent av elframleiðsluni komu frá varandi orkukeldum

Lýggja veðrið og nógva avfallið í januar 2020 hevði við sær, at elframleiðslan úr vatnorku var methøg. Tilsamans stóðu varandi orkukeldur fyri 63 prosentum, meðan 37 prosent av elframleiðsluni komu frá olju. Býtið millum vatn og vind var ávikavist 49 og 14 prosent.

Skjøtil varð settur á vindmyllulundina í Porkeri

Fyrstu vikuna í 2020 varð farið undir at grava út fyri vindmyllulundini í Porkeri

Árið 2020 byrjaði við, at gravimaskinur fóru í holt við atkomuvegin til nýggju vindmyllulundina í Porkeri. Næsta stigið varð at gera klárt til eitt nú betongfundamentini. Articon stóð fyri arbeiðinum at gera atkomuveg og at gera økið byggibúgvið til at seta vindmyllurnar upp.

Talan er um sjey vindmyllur á tilsamans 6,3 MW. Ein battarískipan og ein synkronkompensatorur eru knýtt at vindmyllulundini, og hesar skipanir skulu javna elorkuna frá vindmyllunum út á elnetið.

Battarískipanin í Porkeri hevur eins stóran mátt og vindmyllulundin sjálv, og tí er hon fyrsta av sínum slag. Støddin á battarískipanini hevur við sær, at hon eisini stundum kann virka sum tiltaksverk í staðin fyri motorarnar á Vágsverkinum.

Gott og væl 18 GW tímar vórðu framleiddir úr vatnorku, og tað var nærum helvtin av samlaðu elframleiðsluni. Hetta er mesta framleiðsla úr vatnorku síðani januar 2014, tá ið 17,5 GW tímar vóru framleiddir úr vatnorku, og heili 90 prosent meira enn í januar í 2019, tá turt og kalt veður tarnaði vatnorkuframleiðsluni.

Hóast elframleiðslan úr varandi orku var methøg, var framleiðslan úr vindorku 7,3 prosent minni enn í januar í 2019. Orsøkin var, at vindferðin ofta var ov høg í januar 2020. Verjuútgerðin í myllunum koplar myllurnar úr, tá ov nógvur vindur er. Fer vindferðin upp um 28 m/sek., byrjar skipanin at vera á varðhaldi, og fer vindferðin upp um 34 m/sek., steðga myllurnar. Miðal vindferðin í Húsahaga í januar 2020 var 14,4 m/sek., og mesta vindferðin var 57,4 m/sek.

SEV læsti hurðarnar fyri koronu

SEV setti beinanvegin ymisk tiltøk í verk fyri at verja elveitingina, tá koronufarsóttin fór at gera um seg í mars 2020

SEV læsti beinanvegin hurðarnar, tá korona í mars 2020 gjørdist ein hóttan í føroyska samfelagnum. Einans vitjandi, veitarar o.o., sum høvdu alneyðug ørindi hjá SEV, fingu atgongd eftir avtalu.

Harumframt vóru starvsfólk biðin um at arbeiða heima í mest møguligan mun. Har hetta ikki var ein møguleiki, eitt nú á elverkunum, vóru broytingar gjørdar í arbeiðsbýti og vaktarskipanum fyri at tryggja elveitingina. SEV avgjørdi eisini at avlýsa alla ferðing og skeiðsvirksemi, og kantinurnar vóru stongdar. Harumframt var alt fundarvirksemi avgreitt elektroniskt.

Eisini varð fylgt neyvt við á fíggjarligu síðuni, fyri at tryggja, at búskapurin hjá SEV altíð er á haldgóðum støði.

- SEV veitir samfelagsberandi tænastur, sum eru grundarlagið undir nærum øllum virksemi í samfelagnum. Hesa uppgávuna taka vit í størsta álvara, og tí fylgja vit ikki bert almennu vegleiðingunum, men hava sett herd tiltøk í verk bæði innanhýsis og uttanhýsis", staðfesti Hákun Djurhuus, stjóri í SEV.

Niels Hansson, KT-leiðari

Munadygg KT-skipan kom væl við í koronutíðini

Framkomna KT-skipanin hjá SEV lætti væl um arbeiðsgongdirnar, tá ið koronuhóttanin var í hæddini

KT-skipanin hjá SEV hevur verið í einari støðugari menning seinnu árini, sum bæði hevur økt um trygdina og møguleikarnar hjá starvsfólkunum at arbeiða heimanífrá. Hetta kom sera væl við, tá ið korona fór at gera um seg í Føroyum, og starvsfólkini noyddust at arbeiða og fundast nógv á alnetinum.

Fyri nøkrum árum síðani vóru allar KT-tænastur hjá SEV samlaðar á einum tryggum staði á Sundsverkinum. Talan er um meira enn 60 servarar av ymiskum slag, sum standa í hølum, har manning er á vakt alt samdøgrið. Ein eyka trygd er, at allar upplýsingar eisini verða avritaðar og goymdar á øðrum staði uttan fyri SEV, og sostatt hevur SEV altíð eitt fullkomið avrit av øllum upplýsingum í teimum ymisku skipanunum. Harafturat er Sundsverkið útgjørt við allari nýmótans sløkkiútgerð.

Ein annar partur av KT-trygdini er, at øll starvsfólk áhaldandi hava fingið venjing í skynsomum atburði á alnetinum. Einki hol skal vera í KT-skipanini, og starvsfólk, sum eru tilvitað um KT-trygd, eru ein munagóður háttur at fyribyrgja holum í KT-skipanum. Áhaldandi upplýsing um KT-trygd og støðugt eftirlit við KT-førleikunum og tilvitskuni hjá starvsfólkahópinum verður rópt "Awareness", ið er ein altjóða viðurkendur arbeiðsháttur, sum KT-leiðslan í SEV eisini brúkar.

Sera nógv sløktu ljósið á Earth Hour 2020

Munandi fleiri føroyingar enn vanligt sløktu ljósið 28. mars 2020, tá ið árliga tiltakið Earth Hour, ella tími jarðarinnar, var hildið

Seinastu árini hevur verið staðfestur ein lítil munur í eftirspurninginum eftir elorku frá SEV henda tíman, Earth Hour hevur verið, har húsarhald og fyritøkur hava sløkt ljós og onnur tól, umframt at kommunur hava sløkt gøtuljósini.

Í 2019 fall elframleiðslan 1,65 MW hendan tíman millum 20.30 og 21.30, men í 2020 minkaði framleiðslan heili 4,78 MW. Umroknað til kWt svarar hetta til elnýtsluna hjá einum miðal føroyskum húsarhaldi í eitt heilt ár. Elframleiðslan í Føroyum í tíma jarðarinnar 2020 var 36 MW, og av teimum vóru 86 prosent burðardygg orka, harav ávikavist 79 prosent vatnorka og 7 prosent vindorka. Oljan stóð fyri 14 prosentum.

Earth Hour byrjaði upprunaliga sum ein áminning á fólk um at geva náttúruni gætur og m.a. minka elnýtsluna fyri at verja umhvørvið. Síðani tiltakið byrjaði í 2007, er framleiðslan av elorku kring heimin vorðin munandi burðardyggari, men tiltakið er tó ikki minni viðkomandi av teirri orsøk.

- Eisini tá elframleiðslan er vorðin 100 prosent burðardygg, verður neyðugt at minna fólk á at nýta el við skili fyri at sleppa undan óneyðugum útbyggingum og sum heild at fara væl við náttúruni, sigur Hákun Djurhuus, stjóri á SEV.

Loyvini til sjóvarfalsverkætlan komu eftir stuttari tíð

Í mars 2020 vóru øll endalig loyvi til royndarverkætlanina við sjóvarfalsorku í Vestmannasundi fingin til vega

Tá føroysku orkumyndugleikarnir í mars 2020 góðkendu árinsmetingina av royndarverkætlanini við sjóvarfalsorku í Vestmannasundi, høvdu svenska fyritøkan, Minesto, og SEV fingið øll neyðug loyvi til ætlanina.

- Føroysku myndugleikarnir og SEV eiga sín stóra lut í hesum avgerandi varðanum. Tá hugsað verður um, hvussu umfatandi og tíðarkrevjandi tilgongdin við loyvum til orkuverkætlanir vanliga er, hevur SEV gjørt eitt megnararbeiði at tryggja øll neyðug loyvi til hesa fyrstu installatiónina umvegis eina skjóta og munadygga tilgongd, sigur Dr. Martin Edlund, forstjóri í Minesto.

SEV gjørdi eina árinsmeting, ið viðger, hvørja ávirkan verkætlanin kann hava á náttúru og umhvørvi. Her er hugt eftir árini á fisk, sjófugl, hval og kóp. Mett verður, at royndarverkætlanin ikki fer at hava stórvegis árin á fisk og sjófugl, men at havsúgdjór helst eru tann viðbreknasti bólkurin. Møgulig átøk, ið kunnu tálma árin á hval og kóp, eru viðgjørd í árinsmetingini.

Umhvørvisstovan setti SEV ávísar treytir í góðkenningini. Eitt nú skal SEV fylgja við, hvussu hvalur og kópur ferðast í Vestmannasundi í verkætlanartíðini, sum er tvey ár.

SEV yvirtók Stød 3 á Sundi

31. mars 2020 var Stød 3 á Sundi, ið er ein av størstu byggiverkætlanunum í Føroyum, liðug og sett í rakstur

Verkætlanin, Stød 3, á Sundi var framd innan fyri játtanarkarmin og uttan týðandi seinkingar. Á lítlari samkomu 31. mars við hóskandi koronufrástøðu og uttan lógvatak skrivaðu umboð fyri Articon og SEV undir yvirtøkuskjalið, og í hesi løtu var Stød 3 formliga latin SEV.

- Vit eru fegin um at vera komin hertil, og at arbeiðið hevur gingið so væl. Arbeiðið er væl úr hondum greitt, til tíðina og væl og virðiliga innan fyri játtanarkarmin, staðfesti John Zachariassen, nevndarformaður í SEV, tá Stød 3 var yvirtikin.

Framtíðar leikluturin hjá Sundsverkinum í føroysku elskipanini svarar til kaðalsambandið, sum londini á evropeiska meginlandinum hava sínámillum, har tey kunnu keypa elorku frá hvørjum øðrum, um tey ikki megna at framleiða nóg mikið til sín sjálvs. Sundsverkið verður sostatt tryggi mátturin, meðan næstu árini verða brúkt til at útbyggja grønu elframleiðsluna fram ímóti málinum um 100 prosent grøna elorku á landi í Føroyum í 2030.

Ætlaða vindmyllulundin á Eiði minkaði

Í august 2020 var avgjørt at minka ætlaðu vindmyllulundina á Eiði, eftir at umhvørvisárinsmetingin varð kærd

Ein kæra av umhvørvisárinsmetingini av ætlaðu vindmyllulundini á Eiði hevði við sær, at arbeiðast ikki kundi víðari við verkætlanini. Greitt var, at vindmyllulundin skuldi minka úr seks myllum niður í fýra myllur.

Kæran snúði seg serliga um staðsetingina av tveimum av sunnastu myllunum. Tí valdi SEV við góðkenning frá Orku at tillaga og minka verkætlanina í fyrsta lagi. Umhvørvisstovan góðkendi endurskoðaðu verkætlanina við fýra vindmyllum, og tí var søkt um byggiloyvi til fýra E-82 ENERCON myllur.

- Koma vit á mál við øllum loyvum og góðkenningum innan rímiliga tíð, fer vónandi at bera til at seta fýra myllur upp í 2022, meðan onnur staðseting verður funnin til tvær tær sunnastu myllurnar, sigur Terji Nielsen, menningarleiðari í SEV.

Hann vísir á, at arbeitt verður við møguligum loysnum í mun til tær báðar síðstu myllurnar, men hetta tekur tíð. Um øll neyðug loyvi eisini verða fingin til vega til hesar báðar myllurnar, so verða tær vónandi eisini settar upp á sumri 2022 á øðrum staði á Eiði ella á øðrum hóskandi staði.

Tilgjørd mynd

500 føroyingar fingu bíligari streym til hitapumpu og elbil

Ein uppgerð frá september 2020 vísti, at 488 grønir málarar vóru settir um alt landið til at máta bíligari streym til elbilar og hitapumpur

SEV byrjaði í apríl 2019 sambært løgtingsheimild at lata elbilum og góðkendum hitapumpum bíligari streym. 50 oyru bíligari fyri hvønn kWt, sum fer til hitapumpu ella elbil.

Treytin fyri at koma inn í hesa skipanina er m.a., at ein serstakur málari, t.e. ein sokallaður grønur málari, varð settur upp at máta streymin til hitapumpu og elbil. Í september 2020 høvdu 488 føroyingar valt at brúka henda møguleikan.

Flestu grønu málararnir vóru settir upp í Suðurstreymoy, har 256 grønir málarar vóru skrásettir. 73 vóru í Eysturoynni, 54 í Norðstreymoy, 45 í Vágum, 32 í Norðoyggjum, 20 í Suðuroy og 8 í Sandoynni.

Hitapumpur vóru í flestu førum orsøk til, at fólk valdu at fáa sær grønan málara. Talið av skrásettum heimaløðistøðum til elbilar var 144 kring alt landið í september 2020.

Kostnaður ásettur fyri almennu løðistøðirnar

Prísskipan fyri almenna løðing av elbilum kom í gildi 5. oktober 2020 eftir fimm ára royndartíð við ókeypis løðing

Fyrstu almennu løðistøðirnar hjá SEV vóru settar upp í desember 2015, og næstu fimm árini vóru ein royndartíð, har tað var ókeypis hjá føroyskum elbilaeigarum at løða bilin á almennari løðistøð.

Royndartíðin var av á heysti 2020, tí 5. oktober var ikki longur møguligt at løða elbilin kostnaðarfrítt á almennu løðistøðunum hjá SEV. Elbilaeigarar skulu tí rinda fyri elorkuna frá almennu løðistøðunum.

Prísurin fyri hvønn kW-tíma er settur at vera 1,95 krónur, og hann er tann sami fyri DC-skjótløðistøðir sum fyri vanligu AC-løðistøðirnar. Umframt kostnað fyri hvønn kilowatttíma er ásettur ein minuttprísur fyri tíðina, sum bilurin er knýttur at løðistøðini. Minuttprísurin er ásettur fyri at tryggja, at fólk ikki lata bilin vera knýttan at løðistøðini óneyðuga leingi og harvið forða øðrum at sleppa framat.

- Almennu løðistøðirnar eru ikki ætlaðar at vera fremsta val at løða elbilar. Teir eiga at vera løddir heima, og løðistøðirnar eru settar upp sum bráðfeingisloysn, tá á stendur, sigur Hákun Djurhuus, stjóri í SEV.

SEV gjørdi stórarbeiði í Eysturoyartunlinum

Montørarnir hjá SEV ferðast á hægstu tindum og í djúpastu dølum. Fýra mánaðir í 2020 arbeiddu teir fast í Eysturoyartunlinum 180 metrar undir vatnskorpuni

Montørarnir hjá SEV ferðast víða, og har tunlar verða gjørdir - har er SEV við. Í Eysturoyartunlinum hevur SEV sett upp 11 transformarastøðir og drigið 34 kilometrar av kaðlum.

- Tunnilin sjálvur brúkar líka nógvan streym sum ein hampiliga stór bygd. Tunnilin er góðar 11 kilometrar langur, og umframt ljós í tunlinum verður streymur eisini brúktur til pumpurnar, ið halda tunnilin turran, og til vifturnar, sum tryggja luftgóðskuna í tunlinum, greiddi Henrik Eskildsen, kaðal- og linjumeistari hjá SEV, frá, tá arbeiðið nærkaðist endanum í november 2020.

Umframt streym til sjálvan tunnilin er nú kaðalsamband millum Sundsverkið og Eysturoynna ígjøgnum tunnilin. Hetta fer at økja um kapasitetin og styrkja sambandið millum Sund og Eysturoynna. Higartil hevur sambandið millum Sundsverkið og Eysturoynna verið umvegis sjókaðlar og loftlinjur.

Sjókaðlar hava avmarkaða livitíð og verða tiknir upp, nú samband er ígjøgnum tunnilin. Loftlinjurnar verða við tíðini eisini tiknar niður, tó ikki beinanvegin.

Nýggjur orkuportalur

Í desember 2020 fekk SEV nýggja heimasíðu við einum orkuportali, har tað ber til hjá brúkarum at fylgja við elnýtsluni

Brúkarin skal hava møguleikan fyri tøttum samskifti við SEV, og nýggja heimsíðan, sum varð løgd út á netið í desember 2020, er ein liður í at røkka hesum máli. Elfelagið hevur seinnu árini arbeitt við at førka seg inn á nútíðar samskiftispallar, har brúkararnir ferðast hvønn dag.

Á nýggja orkuportalinum ber til at fáa yvirlit yvir elnýtsluna, við at brúkarin velur tíðarskeið, sum hann síðani kann sammeta við nýtsluna sama tíðarskeið árið fyri. Brúkarin sær, hvussu grøn nýtslan var, og hann hevur gott yvirlit yvir uppgerðirnar.

SEV vil vera ein natúrligari partur av tilvitskuni hjá brúkarunum. Brúkarin skal altíð í einari handarvending kunna søkja sær ráð, vegleiðing og upplýsing hjá SEV.

SEV fekk fyrstu virknu heimasíðuna 1. november 2005, og síðani tá hevur felagið javnan ment og tillagað sínar heimasíður í samsvari við tøkniliga framburðin.

MEST í myllunum

Vindmylluframleiðarin Enercon skrivaði á heysti í 2019 undir avtalu við MEST um viðlíkahald og eftirlit av Enercon myllunum í Føroyum.

SEV fegnaðist um avtaluna og útlitini til at hava serfrøðingar í landinum, sum við stuttum skotbrái kunnu traðka til, um brek er á myllunum.

Eftir hetta eru fólk hjá MEST blivin skúlaði í hesum viðlíkahaldsarbeiði. Tey hava fingið neyðuga førleikamenning, trygdarvenjing og góðkenning. Koronufarsóttin seinkaði tó hesi upplæring umleið eitt hálvt ár. 2020 hevur tí verið fyrsta árið, har fólk hjá MEST hava havt viðlíkahaldið um hendi.

“Vit eru fegin um, at tænastan er blivin betri”, sigur Heri Mortensen, deildarstjóri fyri framleiðsluna hjá SEV. “Tað er heilt vist ein fyrimunur, at skúlaði fólk altíð eru í landinum, til reiðar at traðka til, eisini tá smábrek eru á myllunum. Áðrenn skuldu vit bíða eftir fólki at koma úr Svøríki og Týsklandi. Harumframt er tað jaligt, at grøna kósin á henda hátt hevur avleitt virksemi við sær til gagns fyri føroyskt vinnulív.”

2020 hevur tó verið eitt vánaligt vindorkuár, við tað at fleiri av myllunum hava havt generatorbrek, sum krevja størri umvælingar, og sum eitt serligt generatortoymi hjá Enercon tekur sær av.



Korona ávirkaði trivnaðin og arbeiðs-avrikið ymiskt

Ymiskt er, í hvønn mun tilmæli og avmarkingar hjá SEV hava ávirkað arbeiðslív og arbeiðs-avrik hjá starvsfólkunum. Hetta vísti ein spurnarkanning, sum var gjørd millum starvsfólkini í september 2020



- Vit hildu tað geva meining at seta sjóneykuna á, hvussu korona ávirkaði starvsfólkahópin hjá SEV. Serliga var dentur lagdur á avrik og trivnaðin hjá starvsfólkunum við atliti at broytingum, forboðum og tilmælum, sigur Bergtóra Høgnadóttir, HR-leiðari hjá SEV. Sí spurnarkanningina á síðu 54-55.

SEV setti fleiri avmarkandi koronutiltøk í verk, tá ið sjúkan tók seg upp í Føroyum. Fleiri skuldu m.a. arbeiða heimanífra, og nýggj vaktarskipan var gjørd á verkunum, so ymisku vakthavandi fólkini ikki komu í samband við onnur. Matriklarnir hjá SEV vóru stongdir, kantinurnar vóru stongdar, og teams var í stóran mun nýtt til fundarvirksemið. Harumframt vóru øll vanlig tilmæli sum at spritta og halda frástøðu sjálvsagt galdandi.

54 av 150 starvsfólkum svaraðu spurnarkanningini. Fleiri svaraðu, at tey ikki høvdu svarað, tí tey annaðhvørt ikki hildu spurningarnar vera nóg viðkomandi, ella tí at koronustøðan hvørki hevði ávirkað arbeiðslívið ella trivnaðin í síni heild. Nøkur starvsfólk upplivdu ikki stórvegis broytingar í arbeiðsdegnum.

TRIVNAÐURIN LUTVÍST ÁVIRKAÐUR

Í kanningini siga 22 starvsfólk, at koronutíðin ávirkaði trivnaðin, 21 svara nei, og 25 siga, at tey hava saknað starvsfelagar. Niðanfyri eru nøkur sitat frá starvsfólkunum.

> *"Eg havi følt meg tryggari í koronutíðini, við at SEV hevur tikið støðuna í álvara."*

> *"Tað kennist sum at liva í eini ostaklokku, har mann er avbyrgdur frá øllum, tí mann ikki vil verða tann, sum ger, at starvsfelagar verða smittaðir, og at arbeiðsplássið legst lamið."*

> *"Í mínum føri hava eg og konan arbeitt heima eina tíð eftir tilmæli frá arbeiðsgevara. Í hesum tíðarskeiði hava børnini eisini verið heima. Tað hevur verið mest sum ógjørligt at skipa sær dagin."*

AVRIKIÐ ÁVIRKAÐ HJÁ HELMINGINUM

29 av teimum 54, sum hava svarað, halda ikki, at broytingarnar í arbeiðsdegnum vóru ávirkaðar av koronustøðuni. Serliga nevna tey orsøkina vera, at færri avbrot vóru, og betur bar til at hugsavna seg. Mong upplivdu tó støður, sum ávirkaðu avrikini. Nøkur dømi eru niðanfyri.

> *"Meðan børnini eisini vóru heima, var tað bæði hugnaligt og krevjandi. Hugnaligt at vera saman. Men tá øll skuldu á netið í senn, var ofta kaos og tannagrísl."*

> *"Eg slapp ikki inn á nakran SEV-matrikkul, og okkurt arbeiði kann ikki loysast "remote".*

> *"Nei, tað hevur ikki beinleiðis ávirkað arbeiðsavrikini, men tað hevur økt um arbeiðsbyrðuna. Serliga koordinering av montørum o.ø, ið eru komin úr útlandinum, hevur kravt nógva tíð."*

> *"Til tíðir sera nógv at gera. Arbeitt mest við 'brandslukning' ella her og nú uppgávum."*

JAVNVÁG MILLUM FAMILJU OG ARBEIÐSLÍV

Miðalaldurin á starvsfólkahópinum hjá SEV er um 50 ár. Tó so, fleiri starvsfólk hava børn undir og í skúlaaldri.

Fleiri teirra siga, at tey stundum hava hildið, at koronutíðin hevur givið eina góða nærveru í familjuni, meðan onnur siga, at tað er trupult at skipa gerandisdagin og fáa nóg mikið frá hondini, serliga ta tíðina dagstovnar og skúlar eisini vóru stongdir.

GOTT VIÐ FUNDUM Á TEAMS

- Neyðin lærir nakna kvinnu at spinna, sigur orðafellið. Ein skjót loysn mátti finnast fyri fundarvirksemið hjá starvsfólkunum. KT-deild okkara gav okkum heilt skjótt amboð og førleikar at brúka teams. Á fundunum hjálptust vit við at læra hvønn annan at brúka hetta amboðið til fundarvirksemið. Flest øll vóru samd um, at korona hevði við sær, at vit lærdu at gagnnýta hetta amboðið væl skjótari enn annars, tí tað var alneyðugt. Sera hugaligt at uppliva, greiðir Bergtóra Høgnadóttir frá.

Fleiri hava vístá, at tey hildu fundarvirksemið á teams rigga væl. Fundirnir vóru ítøkiligari, effektivari, styttri og málrættaðir við færri avbrotum og minni "small talk". Samstundis søgdu fleiri, at tey saknaðu at hittast andlit til andlits, og at teamsfundirnir vóru krevjandi. Heldur ikki øll dittaðu sær at seta spurningar á teams.

Fleiri halda, at teams riggar væl, um talan er um fólk, ein hevur eina relatión til. Starvsfólkini halda eisini, at teams er eitt fínt "supplement" til vanligu andlit-til-andlits fundirnar, men at annað ikki eigur at útiloka hitt.

ARBEIÐI HEIMA

Nógv kjak hevur verið bæði í Føroyum og grannalondum, um møguleikin at arbeiða hemianífrá er ein gongd leið – eisini frameftir. Tí var eisini spurt í kanningini, um starvsfólkini, har tað ber til og gevur meining, hava hug til lutvíst at arbeiða heimanífrá eisini frameftir.

16 av teimum, sum hava svarað, halda tað vera líka mikið, hvar tey arbeiða. 17 siga, at tey ikki høvdu tikið av slíkum tilboði. Ein lítil meiriluti – 21 starvsfólk – sigur, at tey eisini frameftir fegin høvdu arbeitt heima av og á.

Nevnast skal, at ein stórur partur av starvsfólkunum hjá SEV arbeiðir í vaktum á verkunum, og onnur eru montørar, sum arbeiða kring alt landið. Hesi hava ikki møguleika at arbeiða heimanífrá.

Tey, sum fegin vilja arbeiða heimanífrá, fegnast um at brúka minni tíð til ferðing, fáa betri møguleika at hugsavna seg og færri avbrot. Summi halda hinvegin, at arbeiðsdagurin riggar væl betur, tá ein fer frá húsum, og onnur halda, at arbeiðsamboðini ikki altíð eru nóg góð við hús, og tí vilja tey heldur vera á sínum vanliga arbeiðsplássi. Tey gerast t.d. troytt, um tey bert hava farteldu, ella tí at borð og stólur við hús ikki eru nøktandi.

YMISK ÁVIRKAN

Samanumtikið kann sigast, at ymiskt er, hvussu koronutíðin hevur ávirkað trivnaðin og avrikini hjá starvsfólkunum í SEV.

Ymiskar uppgávur og ymiskar menskur. Tað er ymiskt, hvussu hetta hevur ávirkað hin einstaka. Bergtóra Høgnadóttir vísir á, at tað er áhugavert at fáa ein feril av innliti í hesi viðurskifti – og at vita eitt sindur meiri heldur enn at gita og generalisera.

Hon hevur hoyrt og sæð mong bera fram bæði andlit til andlits og í kanningini, at alt tað sosiala er skorið inn á bein. Kantinan er stongd, felags samvera í døgurðasteðgi er burtur, og harumframt eru jólaborðhald, kórsangur, útferðir og starvsfólkadagar eisini tikin av skránni.

- Starvsfólkahópurin er so spjaddur í gerandisdegnum, og tí kann upplivingin stundum vera, at vit mistu sambandið og prátini bæði fakliga og sosialt við hvønn annan. Nøkur nevndu eisini í kanningini – 9 fólk – at tey kendu seg einsamøll hesa tíðina. Starvsfelagar hava ein hóp at siga fyri fleiri okkara, sigur Bergtóra Høgnadóttir, HR-leiðari hjá SEV.

HR-leiðarin fegnast um, at gerandisdagurin so smátt minnir um tíðina undan koronu – nú várar aftur, bæði so og so.

Starvsfólkahópurin 2020

Í 2020 fingu 219 fólk útgjald gjøgnum lønaskipanina hjá SEV. Í hesum talinum er 9(9) fólk, sum hava fingið útgjald í sambandi við nevndararbeiði, 4 (4) tænastumannaeftirlønir, 46 (47) hjálparfólk, avloysarar og fólk í tíðaravmarkaðum starvi umframt tey 160 (161) fólkini í føstum starvi hjá SEV.

BÝTI AV STARVSFÓLKUM



STARVSFÓLK Í FØSTUM STARVI

Stabbamyndin vísir, starvsfólk í føstum starvi við ársenda 2010 - 2020.



STARVSALDUR

Miðalstarvsaldurin er 13,9 (14,4) ár. Í 2020 høvdu 40 (40) av starvsfólkunum starvast hjá SEV í 25 ár ella meira.



ALDUR

Miðalaldurin í starvsfólkahópinum er óbroyttur í mun til 2019. Við árslok 2020 vóru 38 (40) starvsfólk 60 ár og eldri.





September 2020

Spurnar-kanning

millum starvsfólkini.
54 fólk svaraðu.

1 Hava koronutilmælini/reglur og forboð hjá SEV ísv. kononu ávirkað trivnaðin og arbeiðsgleðina hjá tær?



- Ja (22)
- Nei (21)
- Havi saknað starvsfelagar (25)
- Havi trivist væl (10)
- Havi kent meg einsamalla/n (8)
- Havi havt trupult við at skipa dagin (6)
- Kendist demotiverandi og eg fekk ikki tikið meg saman (8)
- Annað (10)

2 Hava tilmælini hjá SEV ávirkað arbeiðsavrikini hjá tær?



- Tilmælini hava ikki ávirkað mítt arbeiðið (29)
- Havi fingið minni frá hondini, tí familjan eisini var heima (8)
- Havi fingið minni frá hondini vegna væntandi sparring (7)
- Havi fingið minni frá hondini, tí tað riggar ikki at sita so leingi framman fyri telduni (2)
- Fysisku karmarnir gjørdu, at tað var trupult at hugsavna seg (5)
- Havi fingið meiri frá hondini í deiliga friðinum. Havi veruliga kunnað hugsavnað meg (7)
- Við tað at færri avbrot hava verið gjøgnum dagin, havi eg fingið meiri frá hondini (6)
- Havi ikki havt neyðugu arbeiðsamboðini (6)
- Havi ikki fingið avgreitt partar av mínum arbeiðið (8)
- Annað (11)

3 Til tín sum hevur arbeitt heima: Hevur tað at arbeiða heimanifrá ávirkað arbeiðsavrik tíni?



- Mær dámar væl at arbeiða heimanífrá – riggar avbera væl (12)
- Hevur verið einsligt (9)
- Kendist, sum arbeiðsdagurin og avrikini vóru avmarkaði (9)
- Bleiv kropsliga móð/ur og illa fyri, tí arbeiðsamboðini vóru ikki nøktandi (4)
- Hevði verið betri, um eg stundum kundi farið fysiskt til arbeiðis, har eg eri von/vanur (11)
- Partar av arbeiðinum eru loystir minst líka væl sum áður, aðrar uppgávur, hava verið ávirkaðar (16)
- Arbeiðsamboðini vóru ikki nóg góð (6)
- Annað (22)

4 Um tú hevði møguleikan, kundi tú hugsað tær at arbeitt heima 1 - 2 dagar um vikuna framyvir?



- Ja (21)
- Nei (17)
- Líkamikið fyri meg (16)

5 Til tín sum hevur fundarvirksemi: Hevur korona ávirkað fundirnar?



- Púra óbroytt (1)
- Ja, betri fundir enn undan koronu (3)
- Ja, verri fundir enn áðrenn koronu (1)
- Fundirinir styttri (2)
- Fundirnir betri skipaðir (5)
- Minni kjak (3)
- Teams riggar avbera væl til flestu fundirnar (8)
- Teams riggar ikki væl sum amboð (0)
- Sakni andlit til andlitsfundirnar (6)
- Frástøðan ávirkar (1)
- Annað (10)

Heilsa, Trygd og Umhvørvi

Grønur roknskapur

HEILSU-, TRYGDAR- OG UMHVØVISPOLITIKKUR

SEV leggur stóran dent á heilsu, trygd og umhvørvi, og hevur tí eina deild, sum burturav tekur sær av heilsu-, trygdar- og umhvørvisviðurskiftum í felagnum.

SEV orðaði hin 17. desember 2008 Heilsu-, Trygdar- og Umhvørvispolitikk (HTU), ið er alment tøkur á heimasíðuni hjá SEV. HTU politikkurin varð dagførdur 26. oktober 2018 og er soljóðandi:

Heilsu-, Trygdar- og Umhvørvispolitikkur

HTU-politikkurin er staðfestur á leiðslustigi, og hann er týðandi arbeiðsamboð, sum øll starvsfólk hjá SEV skulu halda seg til í dagliga arbeiðinum.

Vit gera okkara besta fyri at verja heilsuna og trygdina hjá starvsfólkunum og virka fyri, at okkara virksemi ikki elvir til skaða á starvsfólk ella nakran annan, sum er í nánd av virksemi okkara.

Vit verja umhvørvið, og vit leggja dent á at stimbra nýtsluna av varandi orkukeldum.

Vit velja ta bestu atkomiligu tøknina við atliti at heilsu, trygd, umhvørvi og búskapi og leggja dent á, at starvsfólkini hava bestu førleikar.

Vit nýta alt tilfeingi og tilfar á skilabesta hátt og halda okkara virki reint og ruddiligt, og vit rudda altíð upp eftir okkum.

Vit arbeiða skipað og miðvíst við heilsu, trygd og umhvørvi. Trygdarnevnd, trygdarumboð og starvsfólk verða tikin við uppá ráð, áðrenn avgerðir verða tiknar. Hetta fyri áhaldandi at betra úrslitini á hesum økjum.

Vit hava eina tilbúgving, ið altíð er lagað eftir okkara virksemi.

Vit hava eitt opið samstarv við íognarar og avvarðandi myndugleikar til frama fyri framhaldandi menning innan heilsu-, trygdar- og umhvørvismál.

Vit meta um og velja tilfarsveitarar, arbeiðstakarar og samstarvsfelagar við atliti at teirra atferð innan heilsu, trygd og umhvørvi.

Vit halda lógir og myndugleikakrøv á heilsu-, trygdar- og umhvørvisøkjunum og virka fyri at halda landsins stevnumið og altjóða sett mál á nevndu økjum.

Vit eggja hvørjum øðrum at vera virkin innan heilsu-, trygdar- og umhvørvisarbeiði.

TRYGD

SEV er eitt framkomið virki, sum raðfestir trygd og arbeiðsumhvørvi frammarlaga til gagns fyri okkum øll.

Trygdararbeiði

Í 2020 hevur trygdararbeiðið hjá SEV hevur í størsta mun snúð seg um fyribyrging ísv. koronu. Nevnast kann at ongin er vorðin smittaður av koronu á arbeiðsplássinum í 2020. Á mynd 1 sæst trygdarskipanin hjá SEV.

Persónskaðar

Hóast SEV arbeiðir skipað við trygdini, og visjónin er, at eingir skaðar henda, slepst ikki heilt undan skaðum. Á mynd 2 sæst tal av persónskaðum, sum hava havt við sær óarbeiðsføri í ein ella fleiri dagar umframt skaðadagin. Í 2020 er ein persónskaði fráboðaður Arbeiðseftirlitinum.

Mynd 1. Trygdarskipanin hjá SEV.

TRYGDARNEVND

Rógvi Rasmussen Trygdarumboð	**Eirikur Norðberg** Trygdarumboð	**Otto West** Arbeiðsleiðari	**Jørgin Mørkøre** Arbeiðsleiðari	**Annika F. Berg** HTU-leiðari	**Hákun Djurhuus** Stjóri
Jón Nielsen Deildarstjóri, Net, Rakstrarleiðari	**Heri Mortensen** Deildarstjóri Framleiðsla	**Bogi Bendtsen** Deildarstjóri Fyrisiting			

TRYGDARBÓLKAR

BÝTISVIRKIR SUÐUROKI	BÝTISVIRKIR MIÐØKI	BÝTISVIRKIR NORÐUROKI	SUNDSVERKIÐ	VERKINI Í SUÐUROY	VERKINI Í VESTMANNA
Otto West Arbeiðsleiðari	**Mads á Heyggi** Arbeiðsleiðari	**Henrik Eskildsen** Arbeiðsleiðari	**Jørgen Mørkøre** Arbeiðsleiðari	**Jóanes Norðberg** Arbeiðsleiðari	**Eyðbjørn F. Petersen** Arbeiðsleiðari
Kjartan Bech Trygdarumboð	**Elias Mikkelsen** Trygdarumboð	**Per Holm Andersen** Trygdarumboð	**Róald Johannesen** Trygdarumboð	**Berit Hovsgarð** Trygdarumboð	**Tróndur Emil við Á** Trygdarumboð

BÝTISVIRKIR — FRAMLEIÐSLA

VERKIÐ Á STROND OG ÚTOYGGJAR	FRAMLEIÐSLA, VATN OG ORKA	FYRISITING	VERKFRØÐI	ELTØKNI	INNLEGGING
Sæmund Tausen Arbeiðsleiðari	**Heri Mortensen** Arbeiðsleiðari	**Bogi Bendtsen** Arbeiðsleiðari	**Høgni Hansen** Arbeiðsleiðari	**H. Brian Joensen** Arbeiðsleiðari	**Eyðun Djurholm** Arbeiðsleiðari
Rógvi Rasmussen Trygdarumboð	**Karl Martin Klein** Trygdarumboð	**Pauli Djurholm** Trygdarumboð	**Eirikur Norðberg** Trygdarumboð	**Morten B. Hansen** Trygdarumboð	**Anna Vang** Trygdarumboð

FRAMLEIÐSLA



Mynd 2. Tal av persónskaðum, ið hava havt við sær óarbeiðsføri í ein ella fleiri dagar umframt skaðadagin, og sum eru fráboðaðir Arbeiðseftirlitinum.

UMHVØRVIÐ

Á mynd 3 sæst ein mynd av høvuðsárinunum, virksemið hjá SEV hevur á umhvørvið í sambandi við elframleiðslu. Vinstrumegin á myndini sæst, hvørji evni verða nýtt í framleiðsluni. Ovast og niðast á myndini sæst, hvørji evni ávikavist verða útleidd til luft og sjógv í framleiðsluni. Á høgru síðu sæst, hvørji evni fáast burtur úr framleiðsluni – til dømis kann nevnast el og fjarhiti.

Tann vanliga elframleiðslan fer fram á 13 verkum, sum framleiða eftir tørvi. Av hesum 13 verkunum eru trý stór oljurikin verk – Strond, Sund og Vágsverkið. SEV hevur seks vatnorkuverk – Strond, Eiðisverkið, Fossáverkið, Mýruverkið, Heygaverkið og verkið í Botni. Harumframt fimm smáverk, sum elveita Fugloy, Mykines, Koltur, Skúvoy og Stóru Dímun.

SEV hevur harafturat seks vindmyllur í Neshaga í Eysturoynni, sjey í Porkerishaganum og 13 vindmyllur í Húsahaga omanfyri Tórshavn.

Umhvørvisgóðkenningar

Fyritøkur, virkir ella útbúnaðir, ið eru at finna í fylgiskjalinum til Løgtingslóg um umhvørvisvernd, skulu hava eina umhvørvisgóðkenning. Tey virkir ella útbúnaðir, talan er um hjá elfelagnum SEV, eru Sundsverkið og Vágsverkið, hjá P/F Vindfelagnum í Neshaga, eru vindmyllurnar í Neshaga, Porkeri og á Eiði, og hjá P/F Vindfelagnum í Húsahaga, eru vindmyllurnar í Húsahaga.

Mynd 3. Yvirlit yvir tey høvuðsárin, virksemið hjá SEV hevur á umhvørvið.



Galdandi umhvørvisgóðkenningar	Sett í gildi
Umhvørvisgóðkenning av vindmyllum í Neshaga	14.05.04
Umhvørvisgóðkenning av elverkinum á Sund	28.03.18
Umhvørvisgóðkenning av vindmyllum í Neshaganum	13.01.12
Umhvørvisgóðkenning av elverkinum í Vági	18.11.15
Umhvørvisgóðkenning av vindmyllum í Húsahaga	16.01.13
Umhvørvisgóðkenning av vindmyllunum í Porkeri	05.05.20
Umhvørvisgóðkenning av vindmyllunum á Eiði	10.09.20

Útlát til luftina

Eitt tað størsta árinið á umhvørvið er brenningin av fossilum brennievnum. Størsti parturin av CO_2-útlátinum frá virkseminum hjá SEV stavar frá oljunýtsluni til framleiðslu. Harnæst stavar CO_2-útlátið frá oljunýtsluni til upphiting av bæði bygningum og motorum umframt oljunýtslu til flutning við arbeiðsakførum hjá SEV. Mynd 4 vísir, hvussu stórt útlátið av CO_2 var í 2020 og mynd 5 vísir, hvussu stórt útlátið av CO_2 hevur verið frá 2008 til og við 2020.

Yvirskipaða málið hjá SEV er at gerast 100% grøn á landi í 2030. Mynd 6 vísir býtið í % millum termiska og grøna orku. Tað er úr vatni, vindi, biogassi og sól. Talan er um sólorkuverkið í Sumba og nýggja biogassverkið Førka í Hoyvík. Eisini sæst elframleiðslan í tíðarskeiðnum 2008 - 2020 uppgivin í MWt.

Seinastu árini hevur SEV keypt fleiri elbilar, hetta millum annað fyri at minka um útlátið av CO_2.

Mynd 4

Burturkast

Gjøgnum virksemið hjá SEV verður nógv burturkast framleitt. Ein stórur partur av tí framleidda burturkastinum verður brent og endurnýtt, og eisini verður burturkast sent til serviðgerð, hetta er tað sum kallast serliga dálkandi burturkast – eitt nú kemikaliurestir (Sí mynd 7).

Í sambandi við grevstur verður nógv mold, grót o.a. latið til tyrvingarplássini. Vanliga verður tað sum verður tyrvt roknað sum serliga tyngjandi fyri umhvørvið, men tá ið hetta í flestu førum er ódálkað mold og grót, sum verður endurnýtt, eru hesi tøl ikki tikin við í yvirlitið. Ein onnur orsøk er at tað er torført at fáa savnað øll hesi tøl tí, at tey í fleiri førum eru tengd at ymiskum verkætlanum, har onnur gera hetta arbeiðið fyri okkum.

Á mynd 8 sæst yvirlit yvir burturkast til endurnýtslu frá 2017 til 2020. Størsti parturin av burturkastinum til endurnýtslu er spillolja, sum verður latin IRF. Eisini eru káplar ein stórur partur.

Myndin vísir, at meiri elektronikkur er latin til endurnýtslu í 2020 samanborið við árini frammanundan. Á Høvuðskrivstovuni í Tórshavn er nógv telduútgerð o.a. elektronikkur ruddað burtur.

Mynd 8. Yvirlit yvir burturkast til endurnýtslu frá 2017 til 2020.

Mynd 5.



Mynd 6.



Mynd 7



Mynd 8



Ársfrágreiðing og ársroknskapur 2020

Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2020 hjá Elfelagnum SEV samtakinum.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at samtaks- og ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av samtaksins og móðurfelagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2020 og av úrslitinum av virksemi samtaksins og móðurfelagsins og av peningastreyminum hjá samtakinum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2020.

Leiðslufrágreiðingin rúmar, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Tórshavn, hin 19. mars 2021

Stjórn

Hákun Djurhuus
Stjóri

Fíggjarleiðsla

Bogi Bendtsen
Deildarstjóri fyri fyrisiting

Nevnd

Kári Johansen
Formaður

Haraldur S. Hammer
Næstformaður

Niclas Hentze

Oddmar á Lakjuni

Poul Klementsen

Sonni L. Petersen

Sune Jacobsen

Átekning frá óheftum grannskoðara

TIL KAPITALEIGARARNAR Í ELFELAGNUM SEV

NIÐURSTØÐA

Vit hava grannskoðað konsernroknskapin og ársroknskapin hjá Elfelagnum SEV fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2020 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, eginognaruppgerð og notum fyri bæði konsernina og felagið umframt pengastreymsuppgerð fyri konsernina. Konsernroknskapurin og ársroknskapurin eru gjørdir eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at konsernroknskapurin og ársroknskapurin geva eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2020 hjá konsernini og felagnum, av úrslitinum av virkseminum hjá konsernini og felagnum umframt av pengastreymunum hjá konsernini í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2020 samsvarandi ársroknskaparlógini.

GRUNDARLAG FYRI NIÐURSTØÐUNI

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða konsernroknskapin og ársroknskapin". Vit eru óheft av konsernini samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, og vit hava hildið okkara etisku skyldur, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

ÁBYRGD LEIÐSLUNNAR AV KONSERNROKNSKAPINUM OG ÁRSROKNSKAPINUM

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein konsernroknskap og ársroknskap, ið geva eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at konsernroknskapurin og ársroknskapurin kunnu gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá konsernroknskapurin og ársroknskapurin verða gjørdir, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um konsernin og felagið megna at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera konsernroknskapin og ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka konsernina ella felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

ÁBYRGD GRANNSKOÐARANS AV AT GRANNSKOÐA KONSERNROKNSKAPIN OG ÁRSROKNSKAPIN

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at konsernroknskapurin og ársroknskapurin í síni heild ikki hava týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altið kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í konsernroknskapinum og ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í konsernroknskapinum og ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.
- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.
- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.
- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt konsernroknskapin og ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um konsernin og felagið megna at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í konsernroknskapinum og ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at konsernin og felagið ikki longur megna at halda fram við rakstrinum.
- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í konsernroknskapinum og ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um konsernroknskapurin og ársroknskapurin vísa tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.
- Fáa hóskandi og egnað grannskoðanarprógv fyri fíggjarligu upplýsingunum um fyritøkurnar ella handilsvirksemið í konsernini til tess at røkka eini niðurstøðu um konsernroknskapin. Vit hava ábyrgdina av at leiða, hava eftirlit við og at gera konserngrannskoðanina. Vit hava evstu ábyrgdina av grannskoðanarniðurstøðuni. Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

UMMÆLI AV LEIÐSLUFRÁGREIÐINGINI

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um konsernroknskapin og ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Í sambandi við okkara grannskoðan av konsernroknskapinum og ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við konsernroknskapin og ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnar eftir ársroknskaparlógini eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við konsernroknskapin og ársroknskapin, og at hon er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 19. mars 2021

P/F JANUAR

løggilt grannskoðanarvirki

Hans Laksá	Jógvan Amonsson
Statsaut. revisor	Statsaut. revisor

Høvuðs- og lyklatøl

INNTØKUBÝTI					
Upphæddir í t. DKK	**2020**	**2019**	**2018**	**2017**	**2016**
Rakstrarroknskapur					
Nettosøla	550.432	508.788	427.460	432.277	420.270
Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar	242.796	226.211	197.097	226.255	243.621
Rakstrarúrslit	101.379	112.612	81.960	123.513	150.383
Fíggjarligir postar, netto	-40.167	-37.040	-34.634	-32.948	-48.286
Ársúrslit	**49.809**	**62.379**	**38.084**	**88.974**	**92.754**
Fíggjarstøða					
Fíggjarstøðujavni	3.207.960	2.918.099	2.722.020	2.447.178	2.303.961
Tøkur peningur	223.854	125.123	190.785	247.993	335.498
Eginogn	1.371.553	1.344.822	1.207.723	1.196.397	1.141.003
Langfreistað skuld	**1.638.143**	**1.446.277**	**1.341.582**	**1.133.188**	**1.042.116**
Lyklatøl *)					
Renting av eginogn	3,67%	4,40%	3,20%	7,60%	8,10%
Ognaravkast	3,31%	4,00%	3,20%	5,20%	7,10%
Skuld netto/EBITDA	6,2	6,1	6,2	4,2	3,1
Ognarumferð	0,17	0,17	0,16	0,18	0,18
Eginognarpartur	**42,75%**	**46,10%**	**44,40%**	**48,90%**	**49,50%**

*) Lyklatølini eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings „Anbefalinger & Nøgletal 2010".

ÚTROKNING AV LYKLATØLUM

Høvuðs- og lyklatølini í yvirlitinum eru roknað soleiðis:

Renting av eginogn: Úrslit av vanligum rakstri eftir skatt x 100 / Miðal eginogn

Ognaravkast: Úrslit av primerum rakstri x 100 / Miðalvirði av aktivum

Nettoskuld/EBITDA: Nettoskuld (langfr. skuld – tøkur peningur) / EBITDA

Ognarumferð: Nettosøla / Aktiv tilsamans

Eginognarpartur: Eginogn ultimo x 100 / Aktiv tilsamans

Árið 2020 í stuttum

ÚRSLIT EFTIR SKATT

49,8 MIÓ

MILLIÓNIR KRÓNUR

Leiðslan er nøgd við úrslitið.
Ætlað var við 34 mió. kr.

ÍLØGUR

331 MIÓ

MILLIÓNIR KRÓNUR

Íløgurnar javnt býttar millum framleiðslu og net

TØKT GJALDFØRI

527 MIÓ

MILLIÓNIR KRÓNUR

Miðað verður ímóti at endurfíggja partar av skuldini innan árslok 2021, tó í seinasta lagi november 2022

VØKSTUR NETTOSØLA

11,0 %

PROSENT

EGINOGNARPARTUR

42,8 %

PROSENT

VØKSTUR GWT-SØLA

5,7 %

PROSENT

NETTOSKULD OG EBITDA

6,2

(LUTFALL)

Lutfallið millum nettoskuldina og EBITDA

GRØN ORKA

38,7 %

PROSENT

Talið er nakað lægri enn undanfarin ár

Leiðslufrágreiðing

LEIÐSLUFRÁGREIÐING

ENDAMÁLIÐ HJÁ SEV

Elfelagið SEV er eitt interkommunalt lutafelag, ið hevur til endamáls at fáa til vega elmegi og býta hana millum íbúgvarnar í limakommununum.

VINNULIGAR MEGINREGLUR

Sambært elveitingarlógini § 3, stk. 1 stendur, at kommunur kunnu luttaka í elveitingarvirksemi sambært § 1, stk. 1 uttan mun til ásetingar í § 50, stk. 1 í kommunustýrislógini. Í sambandi við, at elveitingarøkið partvíst bleiv liberaliserað, fingu kommunurnar heimild til at reka elframleiðslu á vinnuligum grundarlagi.

Eftir viðtøkum elfelagsins skal endamálið fremjast sambært vinnuligum meginreglum á búskaparliga tryggum støði og við fyriliti at náttúru og umhvørvi. Eftir elveitingarlógini skal SEV (netvirksemið) fíggjarliga hvíla í sær sjálvum soleiðis, at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur. Í loyvunum hjá SEV fyri einstøku framleiðslueindirnar framgongur, at av roknskapinum skal framganga, hvørt framleiðslueindin hevur yvir- ella undirskot.

KOMMUNURNAR Í FØROYUM EIGA SEV

Allar kommunur í Føroyum eru limir í SEV. Limirnir heftu fram til árslok 2008 bæði fyri skuld felagsins og møguligum rakstrarhalli. Frá 1. januar 2009 hefta kommunurnar einans fyri felagsins skyldum mótvegis starvsfólkunum.

SJÁLVSTØÐUG DÓTTURFELØG

SEV hevur við virknaði frá 1. januar 2016 stovnað sjálvstøðug dótturfeløg at umsita vindmyllulundirnar í ávikavist Neshaga og Húsahaga. Í móðurfelagsroknskapinum viðførir hetta, at keyp av vindorku fer at økjast, samstundis sum kostnaður av tilfari og lønum, avskrivingum og rentum fer at lækka. Úrslitið frá dótturfeløgum verður tikið inn í roknskapin gjøgnum úrslit av kapitalpørtum. Samlaða úrslitið í samtaksroknskapinum hjá SEV ávirkast ikki av hesum. Inniverandi frágreiðing fevnir um samlaða virksemið hjá felagnum í tíðarskeiðnum 1. januar 2020 – 31. desember 2020.

ROKNSKAPARLIGA GONGDIN Í MUN TIL FÍGGJARÆTLANINA 2020

ÚRSLITIÐ FYRI 2020 GJØRDIST 50 MIÓ. KR.

Úrslitið áðrenn skatt gjørdist 61,2 mió. kr. móti ætlað 41,5 mió. kr. Úrslitið eftir skatt gjørdist 49,8 mió. kr. móti ætlað 34,0 mió. kr. Leiðsla felagsins er nøgd við úrslitið.

NETTOSØLAN 7 MIÓ. KR. HÆGRI ENN ÆTLAÐ

Í mars mánaða, tá korona breyt út kring heimin og í Føroyum, vórðu ymisk stig tikin við atliti til at fylgja væl við inntøkum felagsins. Hesar eru grundleggjandi fyri rakstrarkostnað og íløgur og ymisk framlit vóru gjørd og arbeitt var eftir einum av framlitunum alt árið. Lukkutíð eru inntøkur felagsins nakað størri enn ætlað og henda meirinntøka kemur í høvuðsheitum frá hægri íbindingargjøldum enn ætlað. Inntøkan frá føstu gjøldunum er áleið sum ætlað.

KWt-sølan hevur sett met við 370,4 GWt og nettosølan er 553 mió. kr. Økingin í elsøluni er 5,7%. Seinastu árini hevur stór framgongd verið í søluni til kundar innan fiskivinnuna og alivinnuna og aftur í ár hevur stórur vøkstur verið í søluni til serliga kundar innan fiskivinnuna. Hesum var eisini ætlað við. Staðfesti vøksturin til privatkundar felagsins, íroknað sølan umvegis grøna málaran, er ikki eins stórur sum ætlað.

KOSTNAÐURIN TIL OLJU 4 MIÓ. KR. HÆGRI ENN ÆTLAÐ

Góða veðrið í vár og í summar umframt tann stóri vøksturin í eftirspurningi eftir elmegi hevur viðført, at SEV hevur brúkt 7.000 tons meiri tungolju enn ætlað. Hinvegin eru knappliga 1.400 tons færri av gassolju nýtt í framleiðsluni enn ætlað. Harumframt er goymslan, samsvarandi roknskaparreglunum, virðisjavnað í mun til tann til eina og hvørja tíð galdandi marknaðarprísin. Í fíggjarætlanini er ikki ætlað við virðisjavnan.

TILFARS- OG TÆNASTUKOSTNAÐUR 1 MIÓ. KR. HÆGRI ENN ÆTLAÐ

Meirkostnaðurin stavar frá bæði framleiðslu, net og fyrisiting. Innan framleiðsluna er tað serliga Sundsverkið og smærru framleiðsludeildirnar, sum hava eina størru nýtslu enn ætlað. Avbjóðingarnar við korona hava eisini økt um rakstrarkostnaðin.

RAKSTARFØRDUR LØNARKOSTNAÐUR 4 MIÓ. KR. HÆGRI ENN ÆTLAÐ

Í fíggjarætlanini er samlaður lønarkostnaður ætlaður til 88,8 mió. kr. Samlaður lønarkostnaður er 90,1 mió. kr., harav rakstrarført er 83,3 mió. kr. og íløguført 7,0 mió. kr. Í fíggjarætlanini var ætlað við eini rakstrarføring uppá 80,3 mió. kr. soleiðis, at rakstarført er 3,6 mió. kr. meiri enn ætlað. Serliga er tað framleiðsluparturin, sum hevur eina størri rakstrarførda nýtslu enn ætlað. Orsøkin er í høvuðsheitum økta framleiðslan og framleiðslan frá fleiri rakstrarstøðum. Harumframt er ein javning upp á 0,7 mió. kr. av skyldunum til tænastumannaeftirlønirnar. Hesar verða at javna við millum annað í gongdini í marknaðarrentuni og miðallivitíðini hjá fólki. Netparturin hevur eina minni rakstarførslu enn ætlað.

EBITDA 1 MIÓ. KR. LÆGRI ENN ÆTLAÐ

Hægru inntøkur felagsins hava gjørt, at EBITDA talið ikki gjørdist so vánaligt, sum hægri kostnaðurin fyri olju, tilfar og lønir vildi viðført. Tó at EBITDA ikki gjørdist sum ætlað, og at felagið tilvitað hevur afturhildið íløgur undir koronafyrilitinum gjørdist nettoskuldin í mun til EBITDA 6,2 ferðir í mun til ætlað 6,9 ferðir. Sostatt er gongdin í lyklatalinum betur enn upprunaliga ætlað, men meiri í tráð við fyrilitið fyri korona.

Talva 1
RAKSTRARROKNSKAPUR Í MIÓ. KR.

	2020	2019	Broyting mió. kr.
Nettosøla	550,4	508,8	41,6
Oljuútreiðslur	164,5	143,9	20,7
Tilfar og tænastur	59,9	57,5	2,5
Lønir	83,2	81,3	1,9
Útreiðslur tilsamans	**307,6**	**282,6**	**25,1**
Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar	**242,8**	**226,2**	**16,6**
Avskrivingar	141,4	113,6	27,8
Úrslit áðrenn fíggjarpostar	**101,4**	**112,6**	**-11,2**
Rentuútreiðslur netto	40,2	37,0	3,1
Úrslit áðrenn skatt	**61,2**	**75,6**	**-14,4**
Skattur	11,4	13,2	-1,8
Úrslit eftir skatt	**49,8**	**62,4**	**-12,6**

ÍLØGURNAR 139 MIÓ. LÆGRI OG AVSKRIVINGARNAR 14 MIÓ. KR. LÆGRI ENN ÆTLAÐ

Ætlað varð við íløgum fyri 477 mió. kr., meðan hesar eru uppgjørdar til 330 mió. kr. ella 147 mió. kr. minni enn ætlað. Hetta viðførir minni avskrivingar. Orsøkirnar eru, at felagið tilvitað hevur afturhildið íløgur undir koronafyrilitinum og arbeiðið upp á vindmyllulundirnar í meginøkinum eftir ætlan skuldi fremjast í árinum. Hetta gjørdist ikki so, og SEV kemur at fremja útbyggingina á Eiði og henda verður ikki liðug fyrr enn í komandi ári, tvey ár seinri enn av fyrstan tíð ætlað.

RENTUKOSTNAÐURIN 7 MIÓ. KR. LÆGRI ENN ÆTLAÐ

Rentukostnaðurin gjørdist væl lægri enn ætlað, og høvuðsorsøkin er, at kostnaðurin til umfígging av skuld felagsins er tikin við í ætlanini, men umfíggingin er útsett til komandi ár. Felagið hevur tí bert longt bankafíggingina við einum ári.

ROKNSKAPARLIGA GONGDIN Í MUN TIL FRAMSKRIVING 2020

KUNNING TIL EIGARAR

Til eykaaðalfundin á heysti skal felagið mótvegis eigarunum, sambært viðtøkunum § 3, stk. 13b og § 4, stk. 12b, kunna um fíggjargongdina síðani ársaðalfundin, sum var 24. apríl 2020. Kunningin varð gjørd á eykaaðalfundinum 27. november 2020, og vístverður eisini til nærri kunning í frágreiðing til fundin, nevnd “Fíggjargongdin 2020” á heimasíðu felagsins www.sev.fo. Kunningin bygdi á staðfest tøl við endan av september umframt metingar og ætlanir fyri restina av árinum.

ROKNSKAPARLIGA GONGDIN Í 2020

ÚRSLITIÐ FYRI SKATT FYRI 2020 GJØRDIST 61 MIÓ. KR.

Felagið hækkaði elprísin fyri allar kundar felagsins við 0,05 kr. pr. kWt uttan “ídnaðarkundarnar”, har prísurin hækkaði 0,10 kr. pr. kWt fyri at styrkja búskap felagsins. Rakstrarúrslitið fyri skatt fyri árið gjørdist 61,2 mió. kr., sum er ájavnt undanfarna ár. At úrslitið gjørdist ájavnt undanfarna ár skyldast hægri nettosølu – sum stavar frá eini hægri elsølu og hægri elprísum – umframt fleiri íbindingargjøldum og sum vigar upp ímóti hægri rakstrarkostnaði.

Harumframt vóru avskrivingarnar og rentukostnaðir lægri enn undanfarna ár.

NETTOSØLAN 42 MIÓ. KR. HÆGRI
Samlaða nettosølan øktist við 41,6 mió. kr. og inntøkan frá streymsøluni øktist við 52,8 mió. kr. meðan inntøkan frá íbindingargjøldum fall við 12,8 mió. kr. í mun til undanfarna ár. Nettosølan er nú komin upp um ein hálva mia. kr. Sølan av elmegi vaks við knøppum 6%.

Økingin í inntøkuni frá streymsøluni skyldast príshækkingina og hægri elsølu upp á 20 GWt, har framgongdin í søluni til serliga fiskivinnuna er stór. Nærri sundurgreining av nettosøluni er í notu 1 í samtaksroknskapinum. Harumframt verður vístt til leiðslufrágreiðingina í netroknskapinum, har sølan av kWt til teir einstøku kundabólkarnar er sundurgreinað.

KOSTNAÐURIN TIL OLJU 21 MIÓ. KR. HÆGRI
Felagið brúkti góð sjey túsund tons meiri av tungolju í framleiðsluni enn undanfarna ár. Hinvegin brúkti felagið nógv minni av gassolju enn undanfarna ár. Samanlagt viðførdi meirnýtslan av olju ein hægri oljukostnað í mun til undanfarna ár upp á 21 mió. kr. Orsøkin er góða veðrið í vár og summar og tann stóri eftirspurningurin eftir elmegi, sum hevur verið ígjøgnum alt árið. Vístt verður til leiðslufrágreiðingina í framleiðsluroknskapinum.

TILFARS- OG TÆNASTUKOSTNAÐUR ØKTUR VIÐ GÓÐUM 2 MIÓ. KR.
Samlaði kostnaðurin er øktur við 2,5 mió. kr. í mun til undanfarna ár. Framleiðslan hevur ein minni kostnað uppá 1,5 mió. kr., har tað serliga er kostnaðurin fyri kanning og ráðgeving, sum er lækkaður, og sum gera, at samlaði kostnaðurin er lækkaður. Netparturin hevur økt sín kostnað við 2,3 mió. kr. og samanumtikið er orsøkin at flestu kostnaðarbólkar eru hækkaðir í mun til undanfarna ár. Kostnaðarstøði fyri netpartin hevur verið lágt seinastu 3 árini og ikki er tað óvæntað, at hesin er hækkaður í inniverandi ári í mun til undanfarna ár.

Fyrisitingin hevur økt sín kostnað við 1,7 mió. kr. Kostnaðurin til kanning og ráðgeving er lækkaður meðan kostnaðurin til fyrisitingarútreiðslur og tap uppá skuldarar er økt, har felagið sambært egnum mannagongdum hevur økt avsetingina til tap uppá skuldarar, serliga tí upphæddin til skuldarar í javnanum økist við øktari sølu. Vístt verður til nærri sundurgreiningar av kostnaðinum í notu 3 í samtaksroknskapinum.

Talva 2
ÚRSLIT FYRI SELDAN KWT Í KRÓNUM

	2020	2019	Broyting kr.	Broyting %
Miðalinntøka seldan kWt	1,50	1,46	0,04	2,6
Miðalkostnaður seldan kWt	1,36	1,28	0,08	6,3
Úrslit seldan kWt	**0,13**	**0,18**	**-0,04**	**-24,5**

Talva 3
NETTOSØLA, MIÓ. KR

	2020	2019	Broyting mió. kr.	Broyting %
kWt-gjald	522,8	470,0	52,8	11,2
Fast gjald	18,0	17,4	0,7	3,8
Íbinding	11,2	24,0	-12,8	-53,4
Ómaksgjald v.m.	2,2	-0,3	2,4	-919,3
Inntøkur	**554,2**	**511,1**	**43,1**	**8,4**
Keyp av vind- og biogassorku	-3,8	-2,3	-1,5	62,7
Nettosøla	**550,4**	**508,8**	**41,6**	**8,2**

Talva 4
TILFAR OG TÆNASTUVEITINGAR, MIÓ. KR.

	2020	2019	Broyting mió. kr.	Broyting %
Framleiðsla	26,1	27,6	-1,5	-5,4
Net	12,3	10,0	2,3	23,0
Fyrisiting	21,5	19,9	1,7	8,3
Tilsamans	**59,9**	**57,5**	**2,5**	**4,3**

RAKSTRARFØRDUR LØNARKOSTNAÐUR ØKTUR VIÐ 2 MIÓ. KR.
Lønarkostnaðurin er øktur við 1,9 mió. kr. í rakstrinum. Samlaðu lønirnar eru 90,1 mió. kr., harav 7,0 mió. kr. eru íløguførdar. Undanfarna ár var lønarkostnaðurin 89,3 mió. kr., harav 8 mió. kr. vóru íløguførdar, soleiðis at 81,3 mió. kr. vóru rakstrarførdar í 2019. Lønarkostnaðurin til framleiðsluverkini er vaksin við 1,4 mió. kr. grundað á meiri virksemi yvirhøvur. Kostnaðurin til netpartin er vaksin við 2,1 mió. kr. og eisini her er talan um munandi meira virksemi kring alt landið. Lønarkostnaðurin til fyrisitingina er fallin við 1,6 mió. kr. sjálvt um 0,7 mió. kr. eru avsettar til javning av tænastamannaeftirlønum og skyldum av løn til yvirtíð, feriu v.m. Ein av orsøkunum er, at fólk eru farin í onnur størv, meðan nýggj ikki enn eru sett í teirra stað. Eisini hækkar lønarkostnaðurin samsvarandi hækkingum í sáttmálalønum, sum eru galdandi á teimum ymisku økjunum. Vístt verður til nærri sundurgreiningar av kostnaðinum í notu 4 í samtaksroknskapinum.

EBITDA 17 MIÓ. KR. HÆGRI
Úrslitið áðrenn avskrivingar, rentur og skatt er 16,6 mió. kr. hægri enn undanfarna ár. Nettoskuldin sama tíðarskeið vaks við 148 mió. kr. soleiðis, at nettoskuldin í mun til EBITDA nú er 6,2 ferðir í mun til 6,1 ferðir undanfarna ár. Innanhýsis markið er ásett til 6,0 ferðir, meðan lánveitarar loyva felagnum, at nettoskuldin í mun til EBITDA kann verða upp til 9,0 ferðir. Sostatt er felagið væl innanfyri ásettu krøvini frá lánveitarunun, men skal arbeiða fyri at halda innanhýsis markið, og sum ætlandi kemur niður á 6,0 ferðir komandi ár.

Talva 5
LØNARÚTREIÐSLUR, MIÓ. KR.

	2020	2019	Broyting mió. kr.	Broyting %
Framleiðsla	39,9	38,5	1,4	3,6
Net	26,1	24,0	2,1	8,8
Fyrisiting	17,2	18,8	-1,6	-8,4
Javning tænastumannaeftirlønir	*0,6*	*2,8*	*-2,2*	
Tilsamans	**83,2**	**81,3**	**1,9**	**2,3**

Talva 6
ÍLØGUR, MIÓ. KR.

	2020	2019
Framleiðsla	152,9	207,3
Net	152,5	120,3
Fyrisiting	25,7	14,1
Tilsaman	**331,1**	**341,8**

Talva 7
ÍLØGUR, MIÓ. KR.

	2020	2019
Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð	315,5	327,8
Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd	15,6	14,0
Íløgur við ársenda	**331,1**	**341,8**

AVSKRIVINGARNAR 28 MIÓ. KR. HÆGRI
Avskrivingarnar eru næststørsti útreiðslupostur í roknskapinum, eftir oljukostnaðin. At hesin kostnaður er øktur seinastu árini kemur av teimum íløgum, sum felagið hevur gjørt seinastu árini. Avskrivingargrundarlagið er millum annað økt við nýggju stød 3 á Sundsverkinum. Vístt verður til nærri sundurgreiningar av kostnaðinum í notu 7 í samtaksroknskapinum.

RENTUKOSTNAÐURIN ØKTUR VIÐ GÓÐUM 3 MIÓ. KR.
Økingin av rentukostnaðinum stavar frá øktari lántøku í sambandi við íløgur, sum felagið ger. Samlaða bruttoskuldin hevur eina fasta rentu stavandi frá lánsbrøvum við fastari rentu, eins og ein partur av skuldini er avdekkaður við rentutryggingaravtalum fyri rentuna. Í rentukostnaðinum er órealiseraður kostnaður og kurstap og kursvinningur av fremmandum gjaldoyra innroknaður. Hesin kostnaður er tengdur at rentutryggingaravtalunum og gjaldoyraamboðunum, sum felagið nýtir fyri at avdekka váðan innan økið. Vístt verður til nærri sundurgreiningar av kostnaðinum í notu 5.

ÍLØGURNAR GJØRDUST 331 MIÓ. KR.
Aftur í ár hevur felagið gjørt stórar íløgur í bæði net og framleiðslu umframt fyrisiting fyri 331 mió. kr. Undanfarna ár vóru íløgurnar eisini stórar við 342 mió. kr.

Íløgurnar sundurgreinast í framleiðslu, net og fyrisiting, sum talva 6 vísir.

Talvurnar 7-9 vísa gongdina í íløgum, arbeiði í gerð og tilgongd til støðisogn.

Vístt verður eisini til net- og framleiðsluroknskapirnar fyri sundurgreining av íløgunum í 2020.

GJALDFØRIÐ ER GOTT

Eykaaðalfundurin í november mánaði 2020 gav felagnum loyvi til at leingja verandi bankafígging við upp til einum ári soleiðis, at henda skal endurfíggjast í seinasta lagi november 2022.

Gjaldførisbroyting felagsins frá rakstrinum var 219 mió. kr. móti 176 mió. kr. undanfarna ár. Sostatt var sjálvfíggingin til íløgur og avdráttir positiv. Láni-avtalan við fíggjarveitarnar, sum felagið gjørdi í desember 2016 og november 2019 ásetur, at eingin avdráttur skal rindast, men at skuldin skal rindast aftur í einum, tá ið áramálið fyri fíggingina er av. Tøkur peningur felagsins við ársenda er 224 mió. kr. móti 125 mió. kr. undanfarna ár. Harumframt koma óbrúktir trekningsrættir og kassakredittir í peninga-stovnum upp á tilsamans 303 mió. kr.

Sostatt er tøki peningurin, kredittir og óbrúktir trekningsrættir 527 mió. kr. móti 690 mió. kr. undanfarna ár. Størsti parturin av óbrúktu trekning-srættunum skal brúkast til at fíggja íløgur komandi árini. Neyðugt er at hava eitt trygt gjaldføri til dagliga raksturin av felagnum, eins og tað verður mett skilagott at hava eitt munagott gjaldføri við atliti at ótryggleikum á fíggjarmarknaðunum og eisini nú korona herjar kring heimin.

ÚTLIT FYRI RAKSTRARÁRIÐ 2021

Eingin prísbroyting er ætlað fyri 2021. Felagið væntar eitt avlop av rakstrinum í 2021 upp á 61,7 mió. kr. áðrenn skatt. Eftir skatt verður úrslitið væntandi 50,6 mió. kr. Fyritreytin fyri avlopið er, at korona-farsóttin ikki ávirkar framleiðsluna og útflutningin av fiskavørum munandi hjá kundunum hjá felagnum og at koronafarsóttin annars ikki viðførir størri búskaparliga niðurgongd í Føroyum.

Elsølan økist væntandi í 2021 við umleið 2,0%, og harvið økist eisini framleiðslan. Nettoumsetningurin væntast at verða 548,8 mió. kr.

Nýggju IMO2020 krøvini eru komin í gildi. Eins og shippingvinnan, sum brúkar tungolju sum brenni-evni, stendur SEV tí yvir fyri globalum broytingum serliga galdandi fyri tungoljuna, sum eru sera ógvisligar. Hetta er ein stór broyting hvat brenniolju viðvíkur.

Talva 8

ARBEIÐI Í GERÐ, MIÓ. KR.

	2020	2019
Salda við ársbyrjan	829,5	682,1
Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð	315,5	327,8
Arbeiðir førd til avskrivingar sum tilgongd	-870,9	-180,4
Salda við ársenda	**274,1**	**829,5**
Broyting í arbeiði í gerð	-555,3	147,4

Talva 9

TILGONGD TIL STØÐISOGN, MIÓ. KR.

	2020	2019
Arbeiði førd til avskrivingar sum tilgongd	870,9	180,4
Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd á støðisogn	15,6	14,0
Tilgongd við ársenda	**886,4**	**194,4**

Hetta hevur víttfevnandi avleiðingar fyri allan olju-marknaðin. Marknaðurin er í løtuni sera ótryggur upp á veruliga virknaðin av nýggju krøvunum, eisini grundað á virknaðin av korona, og tí er trupult at meta um hesi viðurskifti. Brennievnið, sum SEV brúkar í dag, er 1% LSFO. Felagið hevur fingið eina fyribilsniðurstøðu frá umhvørvismyndugleikunum um at skifta yvir til olju við 0,5% svávulinnihaldi medio 2021, men SEV er í samskifti við myndug-leikarnar um málið. Møguliga verður skifti seinri í 2021 ella 2022. Eitt slík skifti viðførir øktan kostnað av oljuni.

Oljukostnaðurin er á einum høgum støði við 135,2 mió. kr., sum tó er lægri enn kostnaðurin í 2020. SEV væntar at brúka 46.933 tons tungolju í 2021 móti 51.121 tonsum í 2020, sum er lægri enn undanfarna ár. Harafturat kemur gass- og smyrjiolja. Orsøkin er, at ætlað verður við einum miðalári fyri elframleiðslu við vatni, samstundis sum elframleiðslan við vindi fer at økjast í 2021.

Kostnaðurin til tilfar og tænastuveitingar verður ætlaður til 62,8 mió. kr., sum er hægri enn kostnað-urin fyri 2020. Kostnaðurin til lønir hækkar við vanligum lønarhækkingum, einstøkum umflokking-um eins og einstøk fólk væntandi verða sett í nýggj størv. Ætlandi gerst rakstrarførdi kostnaðurin til lønir 80,7 mió. kr., sum er nakað lægri enn kostnað-urin í 2020.

Avskrivingarnar verða ætlaðar til 157,8 mió. kr. móti 141,4 mió. kr. í 2020. Orsøkin til hækkandi avskrivingarkostnaðin eru íløgurnar, ið felagið ger. Nettorentukostnaðurin verður ætlaður til 50,6 mió. kr., sum er hægri enn kostnaðurin fyri 2020. Orsøkin til hækking í kostnaðinum er økt lántøka til íløgurnar, ið felagið ger, og kostnaður fyri endurfígging av verandi skuld og trekningsrættum. Kostnaður til endurfígging av bankafíggingini er innroknaður í fíggjarkostnaðin fyri 2021, meðan kostnaðurin av upptøku av nýggjari skuld til íløgur komandi árini ikki er innroknaður. Orsøkin er óvissa í løtuni um tíðarætlanina fyri ætlaðu verkætlanirnar. Um so er, at hetta arbeiði verður liðugt avgreitt í 2021 kemur hetta at ávirka úrslitið. Avsett er ikki fyri virðisjavning uppá fíggjarligu amboðini.

Ætlandi verða íløgur fyri 307,2 mió. kr. gjørdar, eins og roknað verður við øktari lántøku upp á 90,0 mió. kr. frá verandi trekningsrættum. Væntandi verður langfreistaða skuldin 1.688 mió. kr. við árslok 2021.

Roknað verður við einum tøkum peningi upp á 112,3 mió. kr. við árslok 2021 umframt atgongd til trekningsrætt uppá 342,8 mió. kr. hjá fíggjarveitar-um, ella íalt 455,0 mió. kr. Harvið hevur felagið eitt gott gjaldføri.

Ætlandi verða fíggjarligu lyklatølini nettoskuld í mun til EBITDA 6,0 ferðir og eginpeningsparturin 43,8%. Nærri lýsing av, hvat SEV ger hesum viðvíkjandi sæst í Rakstrar-, fíggjar- og íløguætlan felagsins fyri 2021 á www.sev.fo.

HENDINGAR EFTIR ROKNSKAPARLOK

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki hent, sum ávirkar metingina av ársfrásøgnini.

VÁÐAVIÐURSKIFTI

Váðar hjá felagnum kunnu sundurgreinast í ymiskar bólkar.

MARKNAÐARVÁÐAR

SEV hevur serliga seinastu fýra árini gjørt stórar íløgur í framleiðslueindir og net, og SEV skal framhaldandi gera stórar íløgur eitt nú í pumpugoymsluskipan í Vestmanna, væntandi fyri eina upphædd á leið 1 mia. kr. Grundað á allar íløgurnar sum SEV hevur gjørt, og er í ferð við at gera, kann sigast, at SEV í ein ávísan mun eisini er eitt verkætlanarfelag, har tað er neyðugt at hugsa langskygt og leggja fíggjarætlanir, sum samsvara hesum. Hetta viðførir, at tað er umráðandi at kenna týdningarmiklu kostnaðirnar, eitt nú oljukostnaðin, gjaldoyrakostnaðir og rentukostnaðir.

Møguleikin hjá SEV at heinta øktan kostnað inn í gjøgnum elprísin ella onnur gjøld, partvíst ella heilt, er avmarkaður og møguleikin at hava undirskot ella ikki nøktandi úrslit av rakstrinum, letur seg bara gera í eitt ávíst tíðarskeið. Prísstøðið er í síðsta enda eitt mál fyri eigararnar hjá SEV og harvið politiskt tengt við góðkenning frá Elveitingareftirlitinum, meðan fígging av øktum kostnaði umvegis gjaldføri frá fígging letur seg bara gera í eitt styttri tíðarskeið og avmarkar møguleikarnar fyri ætlaðum íløgum, tá ið fíggjarliga orkan fer til at fíggja øktan kostnað.

Í sambandi við lántøku hyggja fíggjarstovnar eftir roknskaparligu lyklatølunum fyri týdningarmiklastu økini, og kravið til hesi lyklatøl er eitt nú støðufesti. Fyri at fáa kappingarføra fígging til vega er neyðugt at møta ella lúka krøvunum frá fíggjarveitarum um at avdekka týdningarmiklastu váðarnar mótvegis vaksandi kostnaði. SEV er ein áhugaverdur kundi at veita fígging til, og kann sambært ráðgevum tess skrásetast sum ein "investment grade" kundi. Hetta gevur møguleika fyri einari góðari fígging upp á fleiri mátar. Skal SEV framhaldandi fáa góða fígging til vega, er neyðugt at halda hetta "ratingstøði". Tá er neyðugt at hava ein støðugan rakstur við einum nøktandi avkasti, sum ger, at roknskaparligu lyklatølini vera á hædd við lyklatølini hjá feløgunum, sum SEV kappast við um fígingingar.

SEV hevur saman við SEB (Skandinaviska Enskilda Banken), sum er ráðgevari hjá SEV innan fíggjarøkið og váðaøkið (prístryggingarøkið), arbeitt við eini ætlan at avdekka váðan í sambandi við olju- og gjaldoyrakeyp eins og rentu. Í hesum sambandi hevur felagið gjørt eina "prístryggingarstrategi" (hedging-strategi) fyri olju, gjaldoyra og rentu. Prístryggingarstrategi'in er eisini partur av lánsavtalunum, sum felagið fekk til vega í desember 2016.

RENTUVÁÐI

SEV hevur sum strategi at tryggja upp til 100% av skuldini við eini gildistíð longri enn 12 mánaðir til eina fasta rentu. Somuleiðis skal miðalgildistíðin av fastløstu rentuni vera millum 5 og 10 ár. Hetta verður gjørt á tann hátt, at SEV kann arbeiða við avdekkingum av rentuváðanum innanfyri eitt spenn millum 80 og 100% av skuldini til eina og hvørja tíð. Skuldin kann hava eina avtalaða fasta rentu ella eina broytiliga rentu, sum verður avdekkað við eini avtalu um umbýting av broytiligari rentu til fasta rentu (rentuumbýtingaravtalu/rentuswap).

Hesin háttur krevur, at fastrentuskuldin skal viðlíkahaldast soleiðis at skilja, at tá ið fastrentuparturin antin fellur undir 80% ella økist til yvir 100%, skulu tillagingar gerast í rentu-umbýtingaravtalunum (rentuswapsavtalunum). Hetta viðførir, at ávísar rentuumbýtingaravtalur skulu lokast fyri til dømis at umganga, at ein størri partur enn 100% er rentutryggjaður. Hetta viðførir aftur, at virðið av rentuumbýtingaravtaluni skal gerast upp. Eitt jaligt virði lækkar fíggjartørvin hjá SEV, meðan eitt neiligt virði økir fíggjartørvin. Javningin av rentutryggingaravtalunum skal í høvuðsheitum bókast yvir eginogn felagsins. SEV fer at stremba eftir, at hava eina javna samanseting av rentutryggingaravtalum yvir tíð, har málið er at hava eina miðal fasta rentu millum 5 til 10 ár.

SEV hevur í sambandi við nýggju lántøkuna tryggjað sær eina fasta rentu upp á alla sína bruttoskuld við árslok 2016 upp á 1.042 mió. kr. frá lánsbrævafíggingini við eini miðal gildistíð upp á umleið 9,3 ár. Harumframt hevur felagið í desember 2016 gjørt rentuumbýtingaravtalu fyri skuldina, sum ætlandi íkemur, tá felagið ger brúk av bankafíggingini, so hvørt íløgur verða framdar. Hetta er samsvarandi strategi fyri trygging av rentuváða. Sostatt fer ein øking í rentustøðinum generelt ikki at ávirka størsta partin av kostnaðinum fyri skuldina komandi 9 árini.

OLJUPRÍSVÁÐI OG GJALDOYRISVÁÐI

Ein avleiðing av íløguætlanini komandi árini er, at prístryggingar-strategiin fyri olju og gjaldoyra er víðkað til at fevna um 4 ár aftrat inniverandi ári. Hetta er sama tíðarskeið, tá ið lántøkan hjá felagnum væntast at hækka við umleið 600 mió. kr. til umleið 1.600 mió. kr.

SEV hevur avdekkað oljuprísváðan eftir niðanfyri standandi leisti.

	Ár 1	Ár 2	Ár 3	Ár 4	Ár 5
Oljuprístrygging	80%	60%	40%	20%	20%

Hetta viðførir, at tryggingardekkningurin verður stovnaður ár eitt fyri einstøku rakstrarárini. Í ár tvey verður hesin tryggingardekkningur so øktur fyri aftur at endurgeva ein avdekkning upp á 5 ár. Hesin leistur tryggjar eina stigvísa stovnan av tryggingini á einum støði, sum endurgevur eina miðal prísgongd av teimum ymisku árunum. SEV hevur avdekkað váðan við eini fastprístrygging.

Samstundis sum tryggingardekkningurin fyri prísin upp á oljuna er gjørdur, eru teir dollarar, sum skulu nýtast til oljukeypið eisini keyptir upp á termin, fyri harvið at avdekka gjaldoyrisváðan í dollarum.

Við einum hækkandi oljuprísi og hækkandi dollarkursi fer ein slík avdekkan av oljuprísváðanum og gjaldoyraváðanum at hava eina tálmandi ávirkan á kostnaðin, og rakstrarúrslitið gerst meiri støðugt.

GJALDFØRISVÁÐI

SEV hevur sum mannagongd, at áðrenn farið verður í gongd við einstakar verkætlanir, skal fígging til hesar fyriliggja, áðrenn byrjað verður. Við hesum er fígging altíð tøk til verkætlanirnar.

Harumframt skal felagið altíð í minsta lagi hava umleið 100 mió. kr. innistandandi í peningastovnum at taka til, um tað gerst neyðugt. Í sambandi við rakstur er felagið við hesum 100 mió. kr. fórt fyri at svara hvørjum sítt teir næstu umleið 3-6 mánaðirnar, uttan at felagið hevur nakrar inntøkur. Harumframt er ynskiligt, at hava atgongd til kassakredittir, sum stuðla undir gjaldførinum um neyðugt.

KREDITT- OG MÓTPARTSVÁÐAR ÁOGN HJÁ KUNDUM

Felagið ansar støðugt eftir skuldarbindingini hjá kundum mótvegis felagnum. Felagið hevur eina fasta mannagongd fyri, hvussu fylgt verður upp á útistandandi hjá kundum felagsins. Verður ikki rindað til tíðina, fær kundin sendandi áminningar, og hevur kundin ikki rindað innan ávísa tíð, eftir at triðja áminningin er send kundanum, verður elveitingin til kundan slitin. Henda mannagongd avmarkar váðan mótvegis kundum felagsins, tó at felagið kann hava avmarkaðan váða av einstøkum størri kundum.

INNISTANDANDI HJÁ PENINGASTOVNUM

Ansað verður støðugt eftir at býta innistandandi hjá felagnum millum fleiri peningarstovnar, sum hava ávísa búskarparliga styrkju, fyri harvið at avmarka váðan.

LÁNSBRØV

Sum ein møguleika til innistandandi hjá peningastovnum kann felagið keypa donsk stats- ella realkredittlánsbrøv. Fyri at avmarka kursváðan í hesum sambandi verður dentur lagdur á lánsbrøv við stuttari lánitíð.

MARKNAÐARVÁÐI	KREDITT- OG MÓTPARTSVÁÐI	RAKSTRARLIGIR VÁÐAR	STRATEGISKIR OG AÐRIR VÁÐAR
Rentuváði	Áogn hjá kundum	Veitingartrygd	Teir strategisku váðarnir eru meira yvirskipa tengdir at, hvussu felagið skipar sítt virksemi, politisk viðurskifti, umdømi o.s.fr.
Oljuprísváði	Innistandandi hjá bankum	Kunningartøkni (KT)	Nýggj tøkni (disruption)
Gjaldoyraváði	Lánsbrøv	Feilir í innanhýsis mannagongdum	Verkætlanir
Gjaldførisváði	Tryggingar	Feilir av mannaávum	Vitanarstøði og menning
		Heilsa, trygd og umhvørvi	

TRYGGINGAR
SEV hevur saman við ráðgevara tess innan tryggingar Sp/f Íti v/Ali Celebi (fyrr Willis Føroyar) arbeitt við avdekkan av tryggingarváðum soleiðis, at miðað verður eftir, at eingin einstakur skaði og samanlegging av skaðum ikki skal ávirka rakstrarúrslitið hjá SEV við meiri enn 10 mió. kr.

RAKSTRARLIGIR VÁÐAR
Ásannast má, at tað ikki heilt slepst undan rakstrarligum váðum, men hesir váðar kunnu avmarkast til eitt nærri ásett støði, sum kann góðtakast við átøkum, mannagongdum og eftirlitum, sum nevnd og leiðsla seta út í kortið.

VEITINGARTRYGD
Endamálið við elveitingarlógini er millum annað at tryggja, at elveitingin í Føroyum verður løgd til rættis við fyriliti at veitingartrygd, samfelagsbúskapi og umhvørvi. Prísurin fyri elmegina skal ikki verða hægri enn neyðugt við fyriliti fyri veitingartrygd, umhvørvi og øðrum tænastum/skyldum, sum SEV hevur mótvegis kundunum. SEV skal altíð hava ein tryggan og effektivan rakstur, sum røkkur ásettum málum fyri veitingartrygd. Felagið arbeiðir framhaldandi við at varðveita veitingartrygdina og góðskuna av elmegini.

Veitingartrygdin tilsigur, at er neyðugt at taka atlit at illveðri og øðrum óvæntaðum hendingum. Her hevur SEV seinastu mongu árini arbeitt við at kaðalleggja linjur soleiðis, at vandin fyri neiligari ávirkan á hesum økinum er minkaður.

KT OG INNANHÝSIS MANNAGONGDIR
Váðalækkandi virksemi kann verða KT-trygdarpolitikkur og leiðreglur o.a. innan KT. Politikkir fyri mannagongdir, eftirlit og funktiónsskilnað. Eisini er framhaldandi útbúgving og menning av starvsfólkum umráðandi í hesum sambandi.

HEILSA OG TRYGD
Felagið leggur stóran dent á heilsu og trygd. Tilgongdin er ein nullhugsjón, har eingin skal koma til skaða undir arbeiðnum hjá og fyri SEV, eins og SEV ikki skal skaða onnur í sambandi við sítt virksemi. Í hesum sambandi hevur felagið neyvt ásettar politikkir og mannagongdir á økinum, millum annað ISO 45001 á Sundsverkinum.

UMHVØRVIÐ
SEV nýtir tungolju og gassolju í framleiðsluni av elmegi, eins og felagið nýtir fleiri vandamikil evni til reingerð og annað í sambandi við motorarnar. Á umhvørvisøkinum verður stórur dentur lagdur á at fara væl um umhvørvið, og at reglur og krøv á økinum til eina og hvørja tíð verða fylgd. Her kann nevnast, at SEV hevur sett ISO 14001 í verk fyri alt felagið, og at SEV hevur ísett framkomna roykreinsiútgerð á nýggjastu moturunum í Vági og á Støð 3 á Sundi. Harumframt eru tangagarðar gjørdir rundan um oljutangarnar hjá felagnum kring landið.

STRATEGISKIR VÁÐAR
Teir strategisku váðarnir eru meira yvirskipað tengdir at, hvussu felagið skipar sítt virksemi, politisk viðurskifti, umdømi o.s.fr. Strategiski váðin skal avmarkast við eini munagóðari virkisætlan. Arbeitt verður við ætlanum at økja tann partin av framleiðsluni, sum byggir á varandi orkukeldur, so sum vatn, vind, sól og sjóvarfall harumframt nýggju stýriskipanin frá Schneider Electric og smartgrid-loysnum. Fyri at felagið framhaldandi skal hava gott orð á sær, verður áherðsla løgd á opinleika um virksemið og viðurskifti tess og felagið tekur undir við skilagóðum broytingum.

NÝGGJ TØKNI
Nýggj tøkni (disruption) ger seg galdandi alla tíðina, og fylgir SEV væl við teimum møguleikum og hóttanum, sum eru knýttir at hesum.

VERKÆTLANIR
SEV mennir alla tíðina framleiðslu- og netpartin, og í hesum sambandi verða nógvar verkætlanir framdar. Í hesum sambandi er neyðugt við neyvari stýring, og fyri at stýra størri verkætlanum verða bygginevndir stovnsettar, eins og verkætlanarleiðarar verða knýttir at einstøku verkætlanunum.

VITANARSTØÐI OG MENNING
Útbúgving og menning av starvsfólkum eru lyklaorð í at menna felagið og harvið at avmarka strategiskar váðar. Felagið leggur stóran dent á, at hóskandi vitan og arbeiðsroyndir eru á øllum økjum í virkseminum í tann mun, hetta verður mett neyðugt, og skipað verður fyri hóskandi eftirútbúgving av starvsfólkunum. Harumframt hevur SEV áhaldandi leiðarútbúgvingar til leiðararnar fyri betur at stuðla teimum í arbeiðinum hjá SEV.



Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin fyri Elfelagið SEV er gjørdur í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri stór feløg í flokki C.

Ársroknskapurin er gjørdur eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørdur í donskum krónum.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m., verða avrundað til heil túsund. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

Har sum talvur í roknskapinum vísa tøl avrundaði til heilar túsund ella millión krónur, og talvan inniheldur samanburðartøl millum ár, víst sum munur í krónum ella prosentum, eru samanburðartølini roknaði upp á undirliggjandi tølini og síðani avrundað. Tískil kann koma fyri, at smærri munir eru millum avrundaðu tølini, sum víst verða í talvuni, og útroknaði samanburðartølini í talvuni.

ALMENT UM INNROKNING OG VIRÐISÁSETING
Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

UMROKNING AV FREMMANDUM GJALDOYRA
Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

KONSERNROKNSKAPURIN
Konsernroknskapurin fevnir um móðurfelagið Elfelagið SEV og atknýtt feløg, har Elfelagið SEV beinleiðis ella óbeinleiðis eigur meira enn 50% av atkvøðurættindunum ella á annan hátt hevur avgerandi ávirkan. Fyritøkur, har konsernin eigur millum 20% og 50% av atkvøðurættindunum og hevur týðandi, men ikki avgerandi ávirkan, verða roknaðar sum assosieraðar fyritøkur, sí konsernyvirlitið.

Í konsolideringini verða allar konserninnanhýsis inntøkur og útreiðslur, partabrævaognir, innanhýsis millumverandi og vinningsbýti eliminerað. Somuleiðis verður staðfestur og óstaðfestur vinningur og tap frá handlum millum konsolideraðu feløgini elimineraður.

Kapitalpartar í atknýttum feløgum verða javnaðir við lutfalsliga partinum av handilsvirðinum á nettoognum og skyldum hjá atknýttu feløgunum á útveganardegnum.

Rakstrarroknskapurin

NETTOSØLA
Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og eftir at avsláttur í samband við søluna er frádrigin.

VØRUNÝTSLA
Vørunýtsla umfatar kostnaðir til keyp av rávørum og hjálpartilfari frádrigið avsláttur og goymslubroyting í árinum.

AÐRIR UTTANHÝSIS KOSTNAÐIR
Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata keyp av olju, tilfari og øðrum tænastuveitingum umframt annan fyrisitingarkostnað.

SKIPANARBERANDI TÆNASTUR OG BÝTI AV INNTØKUM
Samlaði kostnaðurin hjá elverkunum kemur av kostnaðinum í sambandi við at framleiða elmegi, umframt kostnaðin av skipanarberandi tænastum. Skipanarberandi tænastur umfata tilrættislegging og stýring av tøkum mátti, rullandi mátti, reaktivum mátti, spenningsregulering og frekvensregulering. Kostnaðurin fyri skipanarberandi tænastunar er ein ásett meting av samlaða rakstrarkostnaðinum á Sunds- og Vágsverkinum.

Kostnaðurin fyri skipanarberandi tænastur kring landið annars er grundaður á kostnaðin hjá smáverkunum. Smáverkini fáa rakstrarkostnaðin fyri tilfar og løn endurgoldnan fyri veitingartrygd. Restin sum eginframleiðsla. Elverkið á Strond fær rakstrarkostnaðin fyri tilfar og løn fyri termiska framleiðslu av elmegi endurrindaðan sum veitingartrygd. Restin av kostnaðinum kemur frá eginframleiðslu.

Inntøkur hjá framleiðsluverkum eru ásettar at samsvara við samlaða kostnaðin hjá elverkunum, umframt at ein vinningur av framleiðsluni av primo eginognini er innroknaður. Roknaði vinningurin er ásettur við støði í avkasti av langfreistaðum realkredittlánsbrøvum og virðisrøkt av ognum hjá framleiðslupartinum.

STÝRING AV ELSKIPANINI
Kostnaðurin fyri tilrættisleggingina og stýringina av elskipanini í meginøkinum er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri lønir á Fossáverkinum, frádrigið kostnaðin fyri lønir til vanligan rakstur av verkinum. Kostnaðurin fyri stýringina av elskipanini í Suðuroy verður gjørdur upp á sama hátt, tó grundað á lønirnar á Vágsverkinum.

BÝTI AV INNTØKUM
Sambært elveitingarlógini skal netvirksemið fíggjarliga hvíla í sær sjálvum soleiðis, at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur.

Fyri netpartin merkir hetta, at hesin skal hava eina inntøku svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur soleiðis, at netparturin kann gjalda fyri raksturin umframt, at netparturin skal hava inntøkur til at kunna rinda fyri ætlaðar neyðugar íløgur. Inntøkurnar fyri neyðugu íløgurnar taka støði í kravinum til eginfígging.

Tá farið verður undir at gera íløgur, er neyðugt at hava eina ávísa eginfígging soleiðis, at ikki øll íløgan skal fíggast við lántøku. SEV hevur upprunaliga mett, at ein eginfígging upp á 25% er nøktandi, og hevur í roknskapunum fyri 2016-2020 tikið hædd fyri hesum kravinum í roknskapinum fyri framleiðslupartin og netpartin. Kravið til støddina av eginfíggingini tekur støði í íløgunum á fíggjarætlanini fyri framleiðslupartin og netpartin. Hetta er grundað á at felagið higartil hevur havt ein høgan eginpeningspart.

Kravið til støddina av eginfíggingini tekur støði í íløgunum á fíggjarætlanini fyri framleiðslupartin og netpartin fyri eitt 5-ára tíðarskeið, sum er inniverandi ár og næstu 4 árini. Eginfíggingin fyri inniverandi ár verður roknað soleiðis: peningastreymurin frá rakstur minus kostnað til rentur og avdrátt sett í mun til kravið fyri eginfígging av árligu miðalíløgum næstu 5 árini.

Fyri netpartin merkir hetta, at ársúrslitið verður tillagað soleiðis, at yvirskotið er svarandi til tær útreiðslur, netparturin hevur umframt eina eginfígging í løtuni upp á 25% av árligu miðalíløgunum næstu 5 árini fyri netpartin. Um samlaða úrslitið fyri samtakið er størri enn úrslitið fyri netpartin, verður hesin partur av úrslitinum fluttur til framleiðslupartin.

STARVSFÓLKAKOSTNAÐIR
Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum verða móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

AV- OG NIÐURSKRIVINGAR
Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av immateriellari og materiellari støðisogn.

FÍGGJARPOSTAR
Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

Vinningsbýti frá kapitalpørtum í assosieraðum feløgum verður inntøkuført í tí roknskaparári, sum vinningsbýtið verður samtykt.

Rentukostnaðir og aðrir kostnaðir av lánum til at fíggja framleiðslu av immateriellari og materiellari støðisogn, og sum viðvíkja framleiðslutíðarskeiðinum, verða ikki innroknaðir í útveganarvirðið av støðisognini.

INNTØKUR AV KAPITALPØRTUM Í ATKNÝTTUM FELØGUM
Í rakstrarroknskapi móðurfelagsins verður tann lutfalsligi parturin av úrslitinum eftir skatt hjá atknýtta felagnum innroknaður eftir eliminering av innanhýsis vinningi ella tapi.

Fíggjarstøðan

MATERIELL STØÐISOGN
Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið umfatar útveganarvirðið við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðirnar og restvirðunum hjá ognunum:

	Brúkstíð	Restvirði
Framleiðslu og býtisvirkir	10-50 ár	0 %
Bygningar	50 ár	0 %
Rakstrargøgn	3-5 ár	0 %

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Viðvíkjandi eginframleiddum ognum fevnir útveganarvirðið um kostnaðir av tilfari, lutum, undirveitarum, beinleiðis lønarkostnaði og óbeinleiðis framleiðslukostnaði.

NIÐURSKRIVING AV STØÐISOGN
Hvørt ár verða roknskaparligu virðini á materiellari støðisogn mett fyri at fáa ábending um, hvørt tey eru minkað í virði. Hetta kemur aftrat vanligu avskrivingini.

Eru ábendingar um virðisminking, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurvinningarvirði verður hægra virðið av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðum nettoinntøkum frá nýtsluni av ognini ella ognarbólkinum.

KAPITALPARTAR Í ATKNÝTTUM FELØGUM
Kapitalpartar í atknýttum feløgum verða innroknaðir í fíggjarstøðuna við lutfalsliga partinum av roknskaparliga innara virðinum hjá feløgunum. Innara virðið verður uppgjørt eftir roknskaparháttinum hjá móðurfelagnum, eftir at hædd er tikin fyri óásannaðum konserninnanhýsis vinningi og tapi, umframt frádrátti ella ískoyti av positivum ella negativum goodwill uppgjørt eftir yvirtøkuháttinum.

Nettouppskriving av kapitalpørtum í atknýttum feløgum verður skrásett undir eginognini í tiltaksgrunninum fyri nettouppskriving eftir innanvirðisháttinum, í tann mun roknskaparliga virðið er hægri enn útveganarvirðið. Vinningsbýti frá atknýttum feløgum, ið kann væntast at vera samtykt, áðrenn hendan ársfrásøgnin verður góðkend, verður ikki bundið í innanvirðisgrunninum. Tiltaksgrunnurin verður javnaður við øðrum rørslum í eginognini í atknýttum feløgum.

Keypt ella nýstovnað feløg verða í ársfrásøgnini innroknað frá útveganardegnum. Seld ella avtikin feløg verða innroknað fram til avhendingardagin.

KAPITALPARTAR Í ASSOSIERAÐUM FELØGUM
Kapitalpartar í assosieraðum feløgum verða virðisásettir til útveganarvirði. Er nettorealisatiónsvirðið lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

VØRUGOYMSLUR
Vørugoymslur verða virðisásettar til útveganarvirði eftir FIFOháttinum. Um nettorealisatiónsvirðið av vørugoymslunum er lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

Útveganarvirðið á handilsvørum umframt rávørum og øðrum hjálpartilfari umfatar keypsprís umframt flutningsgjald.

Útveganarvirðið av framleiddum liðugvørum og vørum í gerð umfatar útveganarvirði av rávørum, hjálpartilfari, beinleiðis lønarkostnaðum og óbeinleiðis framleiðslukostnaðum. Óbeinleiðis framleiðslukostnaðir umfata óbeinleiðis tilfar og løn umframt viðlíkahald og avskrivingar av maskinum, virkisbygningum og útgerð, ið verður nýtt í framleiðsluni. Harumframt umfatar posturin kostnaðir til at leiða og fyrisita framleiðsluna, umframt ognarførdan menningarkostnað, ið viðvíkur vøruni.

ÁOGN
Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

TÍÐARAVMARKINGAR
Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata staðfestar kostnaðir, sum viðvíkja komandi roknskaparári.

TØKUR PENINGUR
Tøkur peningur umfatar tøkan pening og stuttfreistaði virðisbrøv, við einari lánitíð á 3 mánaðir sum uttan forðingar kunnu umsetast til tøkan pening, og har tað bara er ótýðandi váði fyri virðisbroytingum.

PARTAFELAGSSKATTUR OG ÚTSETTUR SKATTUR
Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum. Skyldugur skattur og skattaáogn verða víst mótroknað í tann mun, at hetta er í samsvari við lógina, og at postarnir væntandi verða avroknaðir netto ella samstundis.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum. Hetta verður uppgjørt við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini, ella hvussu skyldan ætlandi verður afturgoldin.

Útsett skattaáogn herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum hallum verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

Broytingar í útsetta skattinum, sum standast av broytingum í skattasatsum, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin.

AÐRAR AVSETTAR SKYLDUR
Avsettar skyldur umfata væntaðar kostnaðir av ábyrgdarskyldum, tap upp á arbeiði í gerð, umskipanir v.m. Avsettar skyldur verða innroknaðar, tá felagið hevur eina rættarliga ella ítøkiliga skyldu orsakað av einari hending, sum hevur verið, og tað er sannlíkt, at skyldan verður avgreidd við, at brúkt verður av fíggjarligu ognunum hjá felagnum.

Avsettar skyldur verða virðisásettar til nettorealisatiónsvirði ella til dagsvirði, tá tað er væntandi, at skyldan skal avgreiðast í fjarari framtíð.

AVLEIDD FÍGGJARLIG AMBOÐ
Felagið nýtir avleidd fíggjarlig amboð til at tryggja gjaldoyraváða, oljuprísváða og rentuváða.

Avleidd fíggjarlig amboð verða upprunaliga innroknað til dagsprís, og beinleiðis transaktiónskostnaðir verða innroknaðir í raksturin. Aftaná upprunaligu innrokningina verða avleidd fíggjarlig amboð innroknað til dagsprís, og broytingar í virðinum verða innroknaðar sum greitt frá í tí

fylgjandi. Felagið hevur ikki handilslig avleidd fíggjarlig amboð.

Handilslig avleidd fíggjarlig amboð verða roknað sum stuttfreistað ogn ella skuld. Dagsvirðið av einari trygging verður roknað sum langfreistað ogn ella skuld, um tryggingartíðarskeiðið er longri enn 12 mánaðir og, sum stuttfreistað ogn ella skuld, um tryggingartíðarskeiðið er styttri enn 12 mánaðir.

GJALDFØRISTRYGGING
Broytingar í dagsprísi á avleiddum tryggingaramboði nýtt til gjaldføristrygging verða innroknaðar beinleiðis í eginognina í tann mun, tryggingin er effektiv. Í tann mun at tryggingin er óeffektiv, verða broytingar í dagsprísi innroknaðar í vinning ella tap.

Um tryggingaramboðið ikki longur lýkur treytirnar fyri innrokning av trygging, gongur út ella verður selt, verður uppsagt ella nýtt, heldur innrokningin uppat. Akkumuleraður vinningur ella tap innroknað í eginognina verður verandi har, inntil ætlaða transaktiónin fer fram. Tá tryggjaða upphæddin viðvíkur eini ikki-fíggjarligari ogn, verður upphæddin innroknað í eginognina flutt til bókaða virðið á ognini. Í øðrum førum verður upphæddin innroknað í eginognina flutt til vinning ella tap í tí tíðarskeiði, sum tryggjaða ognin hevur við sær vinning ella tap.

SKULD
Í sambandi við lántøku verður fíggjarlig skuld innroknað til útveganarvirðið, svarandi til móttiknu upphæddina eftir frádrignan handilskostnað. Eftirfylgjandi tíðarskeið verður fíggjarlig skuld innroknað til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til kapitaliseraða virðið við effektivu rentuni soleiðis, at munurin millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið, verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Skuld til realkredittstovnar og peningastovnar verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til restskuldina, tá talan er um kontantlán. Viðvíkjandi lánsbrævalánum verður amortiserað útveganarvirði roknað sum kontantvirði á lánsupptøkudegnum, javnað við gjørdum avskrivingum í avdráttartíðarskeiðnum av kursjavningini av láninum á upptøkudegnum.

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

TÍÐARAVMARKINGAR
Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir skuld, umfata inngjøld sum viðvíkja inntøkum komandi árini.

PENINGASTREYMSUPPGERÐ
Peningastreymsuppgerðin verður uppsett eftir óbeinleiðis háttinum og vísir peningastreymar frá rakstri, íløgum, fígging, broyting í peningastreymum og tøkum peningi við ársbyrjan og enda.

Peningastreymar frá rakstri eru tillagaðir fyri ikki likvidar rakstrarpostar, broyting í rakstrarkapitali og goldnum skatt.

Peningastreymar frá íløgum umfata keyp og sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn mótroknað broytingum í áogn og skuld viðvíkjandi nevndu postum.

Pengingastreymar frá fígging umfata fígging frá eigara, goldnum vinningsbýti til eigara og upptøku av láni og avdráttir av langfreistaðari skuld, umframt trekk upp á kassakredittar.

Tøkur peningur við ársbyrjan og enda er kassapeningur og innistandandi í peningastovnum.

Høvuðs- og lyklatølini í yvirlitinum eru roknað soleiðis:

Renting av eginogn	Úrslit av vanligum rakstri eftir skatt x 100 / Miðal eginogn
Ognaravkast	Úrslit av primerum rakstri x 100 / Miðalvirði av aktivum
Nettoskuld/EBITDA	Nettoskuld (langfr. skuld – tøkur peningur) / EBITDA
Ognarumferð	Nettosøla / Aktiv tilsamans
Eginognarpartur	Eginogn ultimo x 100 / Aktiv tilsamans

LYKLATØL

Lyklatøl eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings „Anbefalinger & Nøgletal 2010“.



Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember

Upphæddir í t.DKK		SAMTAK		MÓÐURFELAG	
Nota		2020	2019	2020	2019
1	Nettosøla	550.432	508.788	534.187	489.393
2	Oljuútreiðslur	-164.546	-143.855	-164.546	-143.855
3, 5	Tilfar og tænastuveitingar	-59.922	-57.457	-53.939	-51.146
	Bruttoúrslit	**325.963**	**307.476**	**315.702**	**294.392**
4	Starvsfólkakostnaðir	-83.167	-81.265	-83.074	-81.180
	Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar	**242.796**	**226.211**	**232.628**	**213.212**
	Av- og niðurskrivingar av materiellari støðisogn	-141.418	-113.599	-131.050	-103.232
	Úrslit áðrenn fíggjarpostar	**101.379**	**112.612**	**101.577**	**109.981**
6, 9	Inntøkur frá kapitalpørtum í dóttirfeløgum	0	0	-1.557	587
6	Aðrir fíggjarligir kostnaðir	-40.167	-37.040	-38.433	-35.146
	Úrslit áðrenn skatt	**61.212**	**75.572**	**61.587**	**75.422**
7	Skattur av ársúrsliti	-11.403	-13.194	-11.779	-13.043
	Ársúrslit	**49.809**	**62.379**	**49.809**	**62.379**
	Uppskot til býti av ársúrsliti				
	Flutt úrslit	49.809	62.379	49.809	62.379
	Býti tilsamans	**49.809**	**62.379**	**49.809**	**62.379**

Fíggjarstøða 31. desember

OGN í t.DKK		SAMTAK		MÓÐURFELAG	
Nota		2020	2019	2020	2019
	Støðisogn				
8	Framleiðsluvirkir	1.610.655	970.181	1.524.708	873.867
8	Býtisvirkir	790.530	713.952	790.530	713.952
8	Bygningar og jarðarøkir	84.247	52.661	84.247	52.661
8	Rakstrargøgn	39.938	43.563	39.938	43.563
8	Íløguarbeiði í gerð	274.141	829.483	200.071	825.442
	Materiell støðisogn tilsamans	**2.799.510**	**2.609.839**	**2.639.494**	**2.509.484**
9	Kapitalpartar í assosieraðum og atknýttum virkjum	2.750	2.750	33.000	36.704
10	Lán veitt dóttirfeløgum	0	0	69.809	78.428
11	Avleidd fíggjarlig amboð	14.989	22.111	14.989	22.111
	Fíggjarlig støðisogn tilsamans	**17.739**	**24.861**	**117.798**	**137.243**
	Støðisogn tilsamans	**2.817.250**	**2.634.700**	**2.757.292**	**2.646.727**
	Ogn í umferð				
	Olja	20.045	17.403	20.045	17.403
	Tilfar	17.087	21.870	17.087	21.870
	Vørugoymslur tilsamans	**37.133**	**39.273**	**37.133**	**39.273**
12	Vøru- og tænastuáogn	109.222	106.894	109.222	106.894
	Millumrokning	0	0	58.405	0
	Tíðaravmarkingar	20.503	12.109	16.538	9.133
	Áogn tilsamans	**129.724**	**119.003**	**184.164**	**116.027**
	Tøkur peningur	223.854	125.123	223.854	125.123
	Ogn í umferð tilsamans	**390.711**	**283.398**	**445.150**	**280.423**
	Ogn tilsamans	**3.207.960**	**2.918.099**	**3.202.443**	**2.927.150**

Fíggjarstøða 31. desember

SKYLDUR í t.DKK		SAMTAK		MÓÐURFELAG	
Nota		2020	2019	2020	2019
	Eginogn				
13	Innskot	4.140	4.140	4.140	4.140
	Grunnur til avleidd fíggjaramboð	-44.317	-21.240	-42.170	-21.240
	Grunnur til uppskriving eftir innaravirðishátti	0	0	1.250	4.954
	Flutt úrslit	1.411.730	1.361.922	1.408.333	1.356.968
	Eginogn tilsamans	**1.371.553**	**1.344.822**	**1.371.553**	**1.344.822**
	Avsettar skyldur				
	Avsett til eftirløn og líknandi skyldur	20.155	19.598	20.155	19.598
7	Útsettur skattur	3.480	2.540	2.734	1.419
	Avsettar skyldur tilsamans	**23.635**	**22.139**	**22.890**	**21.017**
	Skuld				
14	Skuld til peningastovnar	1.638.143	1.446.277	1.638.143	1.446.277
	Langfreistað skuld tilsamans	**1.638.143**	**1.446.277**	**1.638.143**	**1.446.277**
14	Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld	870	870	870	870
	Skuld til peningastovnar	0	7	0	7
	Tíðaravmarkingar	1.239	1.199	1.239	1.199
	Vøru- og tænastuskuld	47.415	34.241	47.415	34.241
	Millumrokning	0	0	0	10.576
11	Avleidd fíggjarlig amboð	93.167	42.160	91.020	42.160
	Onnur skuld	31.938	26.383	29.313	25.980
	Stuttfreistað skuld tilsamans	**174.629**	**104.861**	**169.857**	**115.034**
	Skuld tilsamans	**1.812.772**	**1.551.138**	**1.808.000**	**1.561.311**
	Skyldur tilsamans	**3.207.960**	**2.918.099**	**3.202.443**	**2.927.150**
15	**Veðsetingar og trygdarveitingar**				
16	**Eventualpostar**				

Peningastreymsuppgerð

Nota	Upphæddir í t. DKK	SAMTAK 2020	SAMTAK 2019
	Ársúrslit	**49.809**	**62.379**
17	Reguleringar	192.988	163.833
	Broyting í rakstrarpeningi:		
	Vørugoymslur	2.140	4.721
	Áogn	-10.722	-18.529
	Vøru- og tænastuskuld	13.174	-20.884
	Onnur rakstrarskuld	6.151	13.998
	Peningastreymar frá rakstri áðrenn fíggjarligar postar	**253.540**	**205.516**
	Goldin rentukostnaður og líknandi kostnaður	-34.128	-29.423
	Peningastreymar frá rakstrinum	**219.411**	**176.093**
	Keyp av materiellari støðisogn	-886.431	-194.399
	Broyting arbeiði í gerð	555.342	-147.357
	Peningastreymar frá íløgum	**-331.089**	**-341.756**
	Lántøka	210.415	100.000
	Broyting í stuttfreistaðari bankaskuld	-7	1
	Peningastreymar frá fígging	**210.408**	**100.001**
	Samlaðir peningastreymar í árinum	**98.731**	**-65.662**
	Tøkur peningur við ársbyrjan	125.123	190.785
	Tøkur peningur við árslok	**223.854**	**125.123**
	Loyvt trekk á kassakreditt	302.758	564.913
	Tilsamans	**526.612**	**690.036**

Ársfrágreiðing og
ársroknskapur 2020

Notur

Notur 1–3

1. NETTOSØLA	SAMTAK		MÓÐURFELAG	
Upphæddir í t. DKK	**2020**	**2019**	**2020**	**2019**
kWt gjald o.a.	522.833	469.997	522.833	469.997
Fast gjald	18.039	17.381	18.039	17.381
Íbinding	11.187	24.014	11.187	24.014
Ómaksgjøld, áminning, onnur søla og javning til kWt-sølu	2.178	-266	1.328	-266
Keyp av vindorku v.m.	-3.805	-2.338	-19.199	-21.733
Tilsamans	**550.432**	**508.788**	**534.187**	**489.393**

2. OLJUÚTREIÐSLUR	SAMTAK		MÓÐURFELAG	
Upphæddir í t. DKK	**2020**	**2019**	**2020**	**2019**
Gassolja	5.117	26.520	5.117	26.520
Tungolja	149.710	109.585	149.710	109.585
Smyrjiolja	9.720	7.749	9.720	7.749
Tilsamans	**164.546**	**143.855**	**164.546**	**143.855**

3. TILFAR OG TÆNASTUVEITINGAR	SAMTAK		MÓÐURFELAG	
Upphæddir í t. DKK	**2020**	**2019**	**2020**	**2019**
Linjur	3.561	2.851	3.561	2.851
Byrging, rør og tunlar	219	83	219	75
Tangar og umhvørvi	710	206	710	206
Maskinur	10.125	10.481	5.289	5.482
El og teknikk	663	462	663	462
Bygningar og lendi	2.541	2.533	2.295	2.350
Aðalfundur og nevnd	294	501	294	501
Kanning og ráðgeving	4.839	10.552	4.778	9.999
Kunningartøkni	8.699	7.370	8.699	7.370
Leiðsla og skrivstovuhald	2.922	2.664	2.922	2.664
Tap upp á skuldarar	1.237	-538	1.237	-538
Aðrar rakstrarútreiðslur	1.669	890	1.666	888
Aðrar fyrisitingarútreiðslur	22.445	19.403	21.608	18.837
Tilsamans	**59.922**	**57.457**	**53.939**	**51.146**

Notur 4–7

4. STARVSFÓLKAÚTREIÐSLUR	SAMTAK		MÓÐURFELAG	
Upphæddir í t. DKK	**2020**	**2019**	**2020**	**2019**
Lønir	71.255	70.278	71.163	70.192
Pensjónir	8.362	7.681	8.362	7.681
Almenn gjøld	3.550	3.306	3.550	3.306
Tilsamans	**83.167**	**81.265**	**83.074**	**81.180**
Í starvsfólkaútreiðslunum innganga fylgjandi:				
Stjórn og nevnd	2.147	2.133	2.147	2.133
Tilsamans	**2.147**	**2.133**	**2.147**	**2.133**
Starvsfólk í føstum starvi hjá SEV	160	161	160	161
Ársverk	**174**	**178**	**174**	**178**

5. SAMSÝNING TIL GRANNSKOÐAN	SAMTAK		MÓÐURFELAG	
Upphæddir í t. DKK	**2020**	**2019**	**2020**	**2019**
Grannskoðan	414	480	352	420
Aðrar váttanir við vissu	132	131	106	105
Aðrar tænastur og ráðgeving	75	312	75	312
Tilsamans	**621**	**922**	**533**	**836**

6. FÍGGJARÚTREIÐSLUR	SAMTAK		MÓÐURFELAG	
Upphæddir í t. DKK	**2020**	**2019**	**2020**	**2019**
Úrslit dóttirfeløg	0	0	1.557	-587
Rentur, lán og bankaskuld	35.820	33.616	34.089	31.723
Stovningarkostnaðir, provisiónir	3.311	2.090	3.311	2.090
Órealiseraður kursvinningur ella -tap	-19.644	127	-19.644	127
Órealiserað javning á avleidd amboð	21.636	817	21.636	817
Annar rentukostnaður	-955	391	-957	389
Tilsamans	**40.167**	**37.040**	**39.990**	**34.559**

7. SKATTUR AV ÁRSÚRSLITI	SAMTAK		MÓÐURFELAG	
Upphæddir í t. DKK	**2020**	**2019**	**2020**	**2019**
Broyting í útsettum skatti	-11.403	-13.194	-11.779	-13.043
Skattur í árinum sambært rakstrarroknskapi	**-11.403**	**-13.194**	**-11.779**	**-13.043**
Avsett til útsettan skatt 01.01	-2.540	-25.087	-1.419	-23.981
Javning undanfarin ár	0	23.981	0	23.846
Broyting í útsettum skatti í rakstrarroknskapi	-11.403	-13.194	-11.779	-13.043
Broyting í útsettum skatti avleidd amboð beinleiðis í eginogn	10.463	11.759	10.463	11.759
Avsett til útsettan skatt 31.12	**-3.480**	**-2.540**	**-2.735**	**-1.419**

Nota 8

8. MATERIELL STØÐISOGN, SAMTAK

Upphæddir í t. DKK	Framleiðsla	Býtisvirkir	Bygningar	Rakstrargøgn	Tils. 2020	2019
Útveganarvirði primo	2.177.879	1.270.538	89.656	221.105	3.759.178	3.564.778
Tilgongd í árinum	732.163	111.288	34.337	10.375	888.164	194.961
Frágongd í árinum	0	0	0	-1.732	-1.732	-562
Útveganarvirði ultimo	**2.910.042**	**1.381.826**	**123.993**	**229.748**	**4.645.609**	**3.759.178**
Av- og niðurskriving primo	-1.207.698	-556.586	-36.995	-177.542	-1.978.821	-1.865.222
Avskrivingar í árinum	-91.689	-34.710	-2.751	-14.000	-143.150	-114.161
Afturførdar avskrivingar	0	0	0	1.732	1.732	562
Av- og niðurskriving ultimo	**-1.299.387**	**-591.296**	**-39.746**	**-189.810**	**-2.120.239**	**-1.978.821**
Roknskaparligt virði ultimo	**1.610.655**	**790.530**	**84.247**	**39.938**	**2.525.370**	**1.780.356**
Roknskaparligt virði ultimo 2019	970.181	713.952	52.661	43.563	1.780.356	
Arbeiði í gerð						
Arbeiði í gerð primo	691.859	118.718	13.396	5.510	829.483	682.126
Tilgongd til arbeiði í gerð í árinum	163.449	128.175	20.963	2.924	315.511	327.784
Liðug arbeiði førd til avskrivingar	-731.143	-103.976	-34.007	-1.727	-870.853	-180.428
Arbeiði í gerð ultimo	**124.165**	**142.917**	**352**	**6.707**	**274.141**	**829.483**
Arbeiði í gerð ultimo 2019	692.604	117.973	13.396	5.510	829.483	
Støðisogn ultimo	**1.734.820**	**933.447**	**84.599**	**46.644**	**2.799.510**	**2.609.839**
Støðisogn ultimo 2019	1.662.784	831.925	66.057	49.073	2.609.839	

Nota 8

8. MATERIELL STØÐISOGN, MÓÐURFELAG

Upphæddir í t. DKK	Framleiðsla	Býtisvirkir	Bygningar	Rakstrargøgn	Tils. 2020	2019
Útveganarvirði primo	2.040.181	1.270.538	89.656	221.105	3.621.479	3.427.080
Tilgongd í árinum	732.163	111.288	34.337	10.375	888.164	194.961
Frágongd í árinum	0	0	0	-1.732	-1.732	-562
Útveganarvirði ultimo	**2.772.344**	**1.381.826**	**123.993**	**229.748**	**4.507.910**	**3.621.479**
Av- og niðurskriving primo	-1.166.314	-556.586	-36.995	-177.542	-1.937.437	-1.834.205
Avskrivingar í árinum	-81.321	-34.710	-2.751	-14.000	-132.783	-103.793
Afturførdar avskrivingar	0	0	0	1.732	1.732	562
Av- og niðurskriving ultimo	**-1.247.635**	**-591.296**	**-39.746**	**-189.810**	**-2.068.487**	**-1.937.437**
Roknskaparligt virði ultimo	**1.524.708**	**790.530**	**84.247**	**39.938**	**2.439.423**	**1.684.042**
Roknskaparligt virði ultimo 2019	873.867	713.952	52.661	43.563	1.684.042	
Arbeiði í gerð						
Arbeiði í gerð primo	687.818	118.718	13.396	5.510	825.442	679.887
Tilgongd til arbeiði í gerð í árinum	93.420	128.175	20.963	2.924	245.482	325.982
Liðug arbeiði førd til avskrivingar	-731.143	-103.976	-34.007	-1.727	-870.853	-180.428
Arbeiði í gerð ultimo	**50.095**	**142.917**	**352**	**6.707**	**200.071**	**825.442**
Arbeiði í gerð ultimo 2019	687.818	118.718	13.396	5.510	825.442	
Støðisogn ultimo	**1.574.804**	**933.447**	**84.599**	**46.644**	**2.639.494**	**2.509.484**
Støðisogn ultimo 2019	1.561.684	832.670	66.057	49.073	2.509.484	

Notur 9–12

9. KAPITALPARTAR Í ATKNÝTTUM OG ASSOSIERAÐUM VIRKJUM

Upphæddir í t. DKK	31.12.20	31.12.19
Útveganarvirði primo	31.750	31.750
Útveganarvirði ultimo	**31.750**	**31.750**
Úrslit dóttirfeløg primo	4.954	4.367
Úrslit dóttirfeløg í árinum	-1.557	587
Javning avleidd fíggjarlig amboð	-2.147	0
Úrslit dóttirfeløg ultimo	1.250	4.954
Bókað virði ultimo	**33.000**	**36.704**

ASSOSIERAÐ OG ATKNÝTT VIRKI:

Upphæddir í t. DKK	Ognarpartur	Eginogn	Ársúrslit	Innroknað virði
P/F Fjarhitafelagið, Tórshavn	50%	62.949	467	2.750
P/F Vindfelagið í Húsahaga	100%	20.867	-406	20.867
P/F Vindfelagið í Neshaga	100%	9.383	-3.298	9.383

Eingin roknskapur hjá P/F Fjarhitafelagið fyriliggur fyri 2020 - upplýstu tølini eru fyri 2019.

10. LÁN VEITT DÓTTIRFELØGUM

Upphæddir í t. DKK	Áramál	Høvuðs-stólur	Salda 31.12.20	Avdráttur komandi ár	Salda um 5 ár
P/F Vindfelagið í Húsahaga	12 ár	75.000	52.166	6.030	27.230
P/F Vindfelagið í Neshaga	10 ár	28.175	17.643	2.781	6.142
Tilsamans		**103.175**	**69.809**	**8.811**	**33.372**

11. AVLEIDD FÍGGJARLIG AMBOÐ, SAMTAK

Upphæddir í t. DKK	Ogn 31.12.20	Skuld 31.12.20	Samlað 31.12.20	31.12.19
Prístrygging olja	0	-17.318	-17.318	13.407
Prístrygging gjaldoyra	0	-35.879	-35.879	7.117
Rentutrygging	14.989	-39.970	-24.981	-40.573
Tilsamans	**14.989**	**-93.167**	**-78.178**	**-20.049**

Avleidd fíggjarlig amboð eru nýtt at tryggja rentugjaldingar og gjaldoyrakurs á lánum, umframt prísstøði og gjaldoyrakurs á oljukeypi. Virðini í notuni omanfyri koma fram sum munurin millum amboðini á statusdegnum í mun til tað roknaða framtíðarvirði.

12. VØRU- OG TÆNASTUÁOGN

Upphæddir í t. DKK	31.12.20	31.12.19
Elskuldarar	110.044	105.948
Aðrir skuldarar	2.515	3.299
Niðurskrivað upp á áogn	-3.338	-2.353
Tilsamans	**109.222**	**106.894**

Nota 13

13. EGINOGN, SAMTAK

Upphæddir í t. DKK	Innskot	Grunnur til avleidd fíggjaramboð	Flutt úrslit	Tilsamans
Eginognaruppgerð 01.01.19 - 31.12.19				
Salda pr. 01.01.19	4.140	-53.840	1.257.423	1.207.723
Broyting í javning avleidd fíggjarlig amboð	0	32.600	0	32.600
Rætting útsettur skattur undanfarin ár *	0	0	42.120	42.120
Ársúrslit	**0**	**0**	**62.379**	**62.379**
Salda pr. 31.12.19	**4.140**	**-21.240**	**1.361.922**	**1.344.822**
Eginognaruppgerð 01.01.20 - 31.12.20				
Salda pr. 01.01.20	4.140	-21.240	1.361.922	1.344.822
Broyting í javning avleidd fíggjarlig amboð	0	-23.078	0	-23.078
Ársúrslit	**0**	**0**	**49.809**	**49.809**
Salda pr. 31.12.20	**4.140**	**-44.317**	**1.411.730**	**1.371.553**

* Grundað á umflokking av skattligum saldum millum rakstrargøgn og bygningar viðvíkjandi undanfarnum árum, er neyðugt at rætta útsettan skatt fyri tíðarskeiðið fram til 31.12.2018. Hetta er gjørt við at rætta 42,1 mió. kr. í eginognini í árinum 2019.

13. EGINOGN, MÓÐURFELAG

Upphæddir í t. DKK	Innskot	Grunnur til avleidd fíggjaramboð	Grunnur til uppskriving innaravirðis-háttur	Flutt úrslit	Tilsamans
Eginognaruppgerð 01.01.19 - 31.12.19					
Salda pr. 01.01.19	4.140	-53.840	4.367	1.253.055	1.207.723
Broyting í javning avleidd fíggjarlig amboð	0	32.600	0	0	32.600
Rætting útsettur skattur undanfarin ár *	0	0	0	42.120	42.120
Úrslit í dóttirfeløgum	0	0	587	-587	0
Ársúrslit	**0**	**0**	**0**	**62.379**	**62.379**
Salda pr. 31.12.19	**4.140**	**-21.240**	**4.954**	**1.356.968**	**1.344.822**
Eginognaruppgerð 01.01.20 - 31.12.20					
Salda pr. 01.01.20	4.140	-21.240	4.954	1.356.968	1.344.822
Broyting í javning avleidd fíggjarlig amboð	0	-20.930	-2.147	0	-23.078
Úrslit í dóttirfeløgum	0	0	-1.557	1.557	0
Ársúrslit	**0**	**0**	**0**	**49.809**	**49.809**
Salda pr. 31.12.20	**4.140**	**-42.170**	**1.250**	**1.408.333**	**1.371.553**

* Grundað á umflokking av skattligum saldum millum rakstrargøgn og bygningar viðvíkjandi undanfarnum árum, er neyðugt at rætta útsettan skatt fyri tíðarskeiðið fram til 31.12.2018. Hetta er gjørt við at rætta 42,1 mió. kr. í eginognini í árinum 2019.

Notur 14–17

14. SKYLDUR

Upphæddir í t. DKK	Skyldug renta	Avdráttur fyrsta árið	Restskuld eftir 5 ár	Skuld tilsamans 31.12.20	Skuld tilsamans 31.12.19
Skuld til fíggjarstovnar	870	0	1.638.143	1.638.143	1.446.277
Tilsamans	**870**	**0**	**1.638.143**	**1.638.143**	**1.446.277**

Eingin avdráttur er fyrsta árið, og verandi lániavtala fellur til gjaldingar innan í miðal 6,3 ár.

15. VEÐSETINGAR OG TRYGDARVEITINGAR 31.12.20

Sum trygd fyri tollkreditti, er ein ábyrgd veitt til TAKS upp á 1,4 mió. kr, og sum trygd fyri vanligum kredittkortum, er veitt ábyrgd upp á 3,7 mió. kr.
Sum gjaldsábyrgd fyri veiting av motorum er veitt trygd á 5,1 mió. kr. Samanlagt hevur SEV veitt trygd fyri 10,2 mió. kr.

16. EVENTUALSKYLDUR

Samtakið er bundið av avtalum upp á tilsamans 4,1 mió. kr. fyri 2021 viðvíkjandi rakstrar- og leiguavtalum hjá dóttirfeløgum.

17. REGULERINGAR

Upphæddir í t. DKK	2020	2019
Rentukostnaðir og líknandi kostnaðir	38.175	36.097
Órealiseraðir rentukostnaðir	1.992	943
Avskrivingar	141.418	113.599
Skattur	11.403	13.194
Tilsamans	**192.988**	**163.833**

Nota 18

18. SUNDURGREINING AV EGINOGN

Upphæddir í t. DKK	Kommunu-innskot	Flutt úrslit og grunnar 2020	Eginogn % 2020	Eginogn 2019
Eiðis	78,6	19.904	1,5	19.599
Eysturkommuna	146,5	57.157	4,2	55.455
Fámjins	23,1	2.220	0,2	2.135
Fuglafjarðar	136,3	40.609	3,0	40.896
Fugloyar	17,5	1.058	0,1	977
Hovs	22,9	2.504	0,2	2.546
Húsavíkar	25,1	2.866	0,2	2.958
Hvalbiar	103,6	17.323	1,3	17.465
Hvannasunds	36,4	10.765	0,8	10.700
Klaksvíkar	537,8	138.040	10,1	135.035
Kunoyar	12,6	3.640	0,3	4.012
Kvívíkar	59,1	16.187	1,2	15.355
Nes / Runavíkar	332,1	145.088	10,6	141.543
Porkeris	51,0	8.235	0,6	8.179
Sands	72,3	13.889	1,0	13.709
Sjóvar	92,9	28.708	2,1	28.010
Skálavíkar	30,8	3.743	0,3	3.704
Skopunar	71,0	11.772	0,9	11.317
Skúvoyar	17,9	1.110	0,1	1.029
Sørvágs	127,5	9.036	0,7	9.208
Sumbiar	81,4	46.831	3,4	46.581
Sunda	177,4	31.496	2,3	31.817
Tórshavnar	1.092,5	577.537	42,2	564.010
Tvøroyrar	255,3	45.153	3,3	44.137
Vága kommuna	169,6	55.247	4,0	54.786
Vágs	218,4	35.910	2,6	34.595
Vestmanna	125,3	32.245	2,4	31.997
Viðareiðis	25,3	9.139	0,7	8.925
Tilsamans	**4.139,9**	**1.367.413**	**100,0**	**1.340.682**

Ársfrágreiðing og
ársroknskapur 2020

Virkisbýti

Samtak / Rakstur

Virkisbýti, framleiðsla og net

RAKSTUR	2020			2019		
Upphæddir í t. DKK	Framleiðsla	Net	Tilsaman	Framleiðsla	Net	Tilsaman
Inntøkur	**358.659**	**191.773**	**550.432**	**328.266**	**180.522**	**508.788**
Oljuútreiðslur	-164.377	-169	-164.546	-143.665	-190	-143.855
Tilfar og tænastuveitingar	-26.104	-33.818	-59.922	-27.590	-29.867	-57.457
Lønir	-39.866	-43.301	-83.167	-38.497	-42.768	-81.265
Úrslit av vanligum rakstri	**128.312**	**114.484**	**242.796**	**118.514**	**107.697**	**226.211**
Avskrivingar	-92.284	-49.133	-141.418	-69.170	-44.430	-113.599
Úrslit áðrenn fíggjarpostar	**36.027**	**65.351**	**101.379**	**49.344**	**63.268**	**112.612**
Fíggjarpostar, netto	-18.434	-21.733	-40.167	-16.476	-20.564	-37.040
Úrslit áðrenn skatt	**17.593**	**43.618**	**61.212**	**32.869**	**42.704**	**75.572**
Skattur	376	-11.779	-11.403	-150	-13.043	-13.194
Ársúrslit	**17.969**	**31.839**	**49.809**	**32.718**	**29.660**	**62.379**

Móðurfelag / Rakstur

Virkisbýti, framleiðsla og net

RAKSTUR	2020			2019		
Upphæddir í t. DKK	Framleiðsla	Net	Tilsaman	Framleiðsla	Net	Tilsaman
Inntøkur	**342.415**	**191.773**	**534.187**	**308.871**	**180.522**	**489.393**
Oljuútreiðslur	-164.377	-169	-164.546	-143.665	-190	-143.855
Tilfar og tænastuveitingar	-20.121	-33.818	-53.939	-21.279	-29.867	-51.146
Lønir	-39.773	-43.301	-83.074	-38.412	-42.768	-81.180
Úrslit av vanligum rakstri	**118.143**	**114.484**	**232.628**	**105.515**	**107.697**	**213.212**
Avskrivingar	-81.917	-49.133	-131.050	-58.802	-44.430	-103.232
Úrslit áðrenn fíggjarpostar	**36.226**	**65.351**	**101.577**	**46.713**	**63.268**	**109.981**
Fíggjarpostar, netto	-16.700	-23.290	-39.990	-14.581	-19.977	-34.559
Úrslit áðrenn skatt	**19.526**	**42.061**	**61.587**	**32.131**	**43.291**	**75.422**
Skattur	0	-11.779	-11.779	0	-13.043	-13.043
Ársúrslit	**19.526**	**30.283**	**49.809**	**32.131**	**30.247**	**62.379**

Samtak / Ognir

Virkisbýti, framleiðsla og net

OGNIR	2020			2019		
Upphæddir í t. DKK	**Framleiðsla**	**Net**	**Tilsaman**	**Framleiðsla**	**Net**	**Tilsaman**
Fastar ognir, elverk v.m.	1.616.386	908.984	2.525.370	976.318	804.039	1.780.356
Íløguarbeiði í gerð	109.161	164.980	274.141	688.642	140.841	829.483
Materiell støðisogn	**1.725.546**	**1.073.964**	**2.799.510**	**1.664.960**	**944.880**	**2.609.839**
Partapeningur	0	2.750	2.750	0	2.750	2.750
Avleidd fíggjarlig amboð	0	14.989	14.989	0	22.111	22.111
Fíggjarlig støðisogn	**0**	**17.739**	**17.739**	**0**	**24.861**	**24.861**
STØÐISOGN TILSAMANS	**1.725.546**	**1.091.704**	**2.817.250**	**1.664.960**	**969.740**	**2.634.700**
Olja á goymslu	20.045	0	20.045	17.403	0	17.403
Tilfar á goymslu	0	17.087	17.087	0	21.870	21.870
Goymslur tilsamans	**20.045**	**17.087**	**37.133**	**17.403**	**21.870**	**39.273**
Elskuldarar	0	109.222	109.222	0	106.894	106.894
Aðrir skuldarar/skattaáogn	249	0	249	126	0	126
Millumrokning Net og Framleiðsla	5.135	194.159	199.294	10.576	147.816	158.392
Onnur áogn/tíðaravmarking	4.238	18.306	22.544	3.089	11.061	14.150
Áogn tilsamans	**9.622**	**321.686**	**331.308**	**13.790**	**265.771**	**279.561**
Tøkur peningur	0	223.854	223.854	0	125.123	125.123
OGN Í UMFERÐ TILSAMANS	**29.667**	**562.627**	**592.295**	**31.193**	**412.764**	**443.957**
OGNIR TILSAMANS	**1.755.214**	**1.654.331**	**3.409.544**	**1.696.153**	**1.382.505**	**3.078.657**

Í Millumrokning Net eru kapitalpartar tkr. 29.000 í dóttirfeløgum, umframt teirra samlaða úrslit frá byrjan í 2016 upp á tkr. 1.250.

Móðurfelag / Ognir

Virkisbýti, framleiðsla og net

OGNIR	2020			2019		
Upphæddir í t. DKK	**Framleiðsla**	**Net**	**Tilsaman**	**Framleiðsla**	**Net**	**Tilsaman**
Fastar ognir, elverk v.m.	1.530.439	908.984	2.439.423	880.004	804.039	1.684.042
Íløguarbeiði í gerð	35.091	164.980	200.071	684.601	140.841	825.442
Materiell støðisogn	**1.565.530**	**1.073.964**	**2.639.494**	**1.564.605**	**944.880**	**2.509.484**
Kapitalpartar	0	33.000	33.000	0	36.704	36.704
Lán veitt dóttirfeløgum	0	69.809	69.809	0	78.428	78.428
Avleidd fíggjarlig amboð	0	14.989	14.989	0	22.111	22.111
Fíggjarlig støðisogn	**0**	**117.798**	**117.798**	**0**	**137.243**	**137.243**
STØÐISOGN TILSAMANS	**1.565.530**	**1.191.762**	**2.757.292**	**1.564.605**	**1.082.122**	**2.646.727**
Olja á goymslu	20.045	0	20.045	17.403	0	17.403
Tilfar á goymslu	0	17.087	17.087	0	21.870	21.870
Goymslur tilsamans	**20.045**	**17.087**	**37.133**	**17.403**	**21.870**	**39.273**
Elskuldarar	0	109.222	109.222	0	106.894	106.894
Millumrokning Net og Framleiðsla	0	163.909	163.909	0	113.862	113.862
Onnur áogn/tíðaravmarking	273	16.264	16.538	113	9.020	9.133
Áogn tilsamans	**273**	**289.395**	**289.668**	**113**	**229.775**	**229.889**
Tøkur peningur	0	223.854	223.854	0	125.123	125.123
OGN Í UMFERÐ TILSAMANS	**20.318**	**530.336**	**550.654**	**17.516**	**376.769**	**394.284**
OGNIR TILSAMANS	**1.585.849**	**1.722.098**	**3.307.947**	**1.582.121**	**1.458.891**	**3.041.012**

Samtak / Skyldur

Virkisbýti, framleiðsla og net

SKYLDUR	2020			2019		
Upphæddir í t. DKK	**Framleiðsla**	**Net**	**Tilsaman**	**Framleiðsla**	**Net**	**Tilsaman**
Innskot	29.000	4.140	4.140	29.000	4.140	4.140
Kapitalkonta	809.307	558.106	1.367.413	788.531	552.151	1.340.682
Eginogn tilsamans	**838.307**	**562.246**	**1.371.553**	**817.531**	**556.291**	**1.344.822**
Eftirløn	0	20.155	20.155	0	19.598	19.598
Útsettur skattur	994	2.734	3.729	1.247	1.419	2.666
Avsetingar tilsamans	**994**	**22.890**	**23.884**	**1.247**	**21.017**	**22.264**
Langfreistað skuld	**724.439**	**904.893**	**1.629.333**	**733.250**	**704.408**	**1.437.658**
Stuttfr. partur av langfreistaðari skuld	8.811	870	9.681	8.619	870	9.489
Skuld til peningastovnar	0	0	0	0	7	7
Inngoldið av ognarum	0	1.166	1.166	0	1.199	1.199
Millumrokning Net og Framleiðsla	169.044	1.250	199.294	129.392	0	158.392
Onnur skuld	11.471	22.582	34.053	6.114	22.311	28.425
Vøru- og tænastuskuld	0	47.415	47.415	0	34.241	34.241
Avleidd amboð	2.147	91.020	93.167	0	42.160	42.160
Skuld tilsamans	**915.912**	**1.069.196**	**2.014.108**	**877.375**	**805.197**	**1.711.571**
SKYLDUR TILSAMANS	**1.755.214**	**1.654.331**	**3.409.544**	**1.696.153**	**1.382.505**	**3.078.657**

Í Millumrokning Framleiðsla eru kapitalpartar tkr. 29.000 í dóttirfeløgum, umframt teirra samlaða úrslit frá byrjan í 2016 upp á tkr. 1.250.

Móðurfelag / Skyldur

Virkisbýti, framleiðsla og net

SKYLDUR	2020			2019		
Upphæddir í t. DKK	**Framleiðsla**	**Net**	**Tilsaman**	**Framleiðsla**	**Net**	**Tilsaman**
Innskot	0	4.140	4.140	0	4.140	4.140
Kapitalkonta	808.057	559.356	1.367.413	788.531	552.151	1.340.682
Eginogn tilsamans	**808.057**	**563.496**	**1.371.553**	**788.531**	**556.291**	**1.344.822**
Eftirløn	0	20.155	20.155	0	19.598	19.598
Útsettur skattur	0	2.734	2.734	0	1.419	1.419
Avsetingar tilsamans	**0**	**22.890**	**22.890**	**0**	**21.017**	**21.017**
Langfreistað skuld	**663.441**	**974.702**	**1.638.143**	**663.441**	**782.836**	**1.446.277**
Stuttfr. partur av langfreistaðari skuld	0	870	870	0	870	870
Skuld til peningastovnar	0	0	0	0	7	7
Inngoldið av ognarum	0	1.166	1.166	0	1.199	1.199
Millumrokning Net og Framleiðsla	105.504	0	105.504	124.438	0	124.438
Onnur skuld	8.846	20.540	29.386	5.711	20.269	25.980
Vøru- og tænastuskuld	0	47.415	47.415	0	34.241	34.241
Avleidd amboð	0	91.020	91.020	0	42.160	42.160
Skuld tilsamans	**777.792**	**1.135.713**	**1.913.504**	**793.590**	**881.583**	**1.675.172**
SKYLDUR TILSAMANS	**1.585.849**	**1.722.098**	**3.307.947**	**1.582.121**	**1.458.891**	**3.041.012**

Samtak / Inntøkubýti

Rakstrarbýti, framleiðsla og net

INNTØKUBÝTI

Upphæddir í t. DKK	**Framleiðsla**	**Net**	**Tils. 2020**	**2019**
Søla	830	553.407	554.236	511.126
Eginframleiðsla v.m.	334.759	-338.564	-3.805	-2.338
Skipanarberandi tænastur v.m.	23.070	-23.070	0	0
Inntøka tilsamans	**358.659**	**191.773**	**550.432**	**508.788**

FRAMLEIÐSLA	**Termisk**	**Vatn**	**Vind**	**Tils. 2020**	**2019**
Inntøkur	282.089	60.129	16.441	358.659	328.266
Olja	-163.460	-917	0	-164.377	-143.665
Tilfar	-15.010	-4.990	-6.104	-26.104	-27.590
Lønir	-29.680	-10.090	-97	-39.866	-38.497
Avskriving	-51.548	-30.313	-10.423	-92.284	-69.170
Rentur	-11.549	-5.151	-1.734	-18.434	-16.476
Skattur			376	376	-150
Framleiðsluúrslit	**10.843**	**8.667**	**-1.541**	**17.969**	**32.718**

NET	**Net u. fyrisiting**	**Fyrisiting**	**Tils. 2020**	**2019**
Inntøkur	-985	192.758	191.773	180.522
Olja	-169	0	-169	-190
Tilfar	-12.311	-21.507	-33.818	-29.867
Lønir	-26.114	-17.187	-43.301	-42.768
Avskriving	-41.607	-7.526	-49.133	-44.430
Rentur	0	-21.733	-21.733	-20.564
Skattur	0	-11.779	-11.779	-13.043
Netúrslit	**-81.186**	**113.026**	**31.839**	**29.660**

Móðurfelag / Inntøkubýti

Rakstrarbýti, framleiðsla og net

INNTØKUBÝTI

Upphæddir í t. DKK	**Framleiðsla**	**Net**	**Tils. 2020**	**2019**
Søla	-20	553.407	553.386	511.126
Eginframleiðsla v.m.	319.365	-338.564	-19.199	-21.733
Skipanarberandi tænastur v.m.	23.070	-23.070	0	0
Inntøka tilsamans	**342.415**	**191.773**	**534.187**	**489.393**

FRAMLEIÐSLA	**Termisk**	**Vatn**	**Vind**	**Tils. 2020**	**2019**
Inntøkur	282.089	60.129	197	342.415	308.871
Olja	-163.460	-917	0	-164.377	-143.665
Tilfar	-15.010	-4.990	-121	-20.121	-21.279
Lønir	-29.680	-10.090	-4	-39.773	-38.412
Avskriving	-51.548	-30.313	-56	-81.917	-58.802
Rentur	-11.549	-5.151	0	-16.700	-14.581
Framleiðsluúrslit	**10.843**	**8.667**	**16**	**19.526**	**32.131**

NET	**Net u. fyrisiting**	**Fyrisiting**	**Tils. 2020**	**2019**
Inntøkur	-985	192.758	191.773	180.522
Olja	-169	0	-169	-190
Tilfar	-12.311	-21.507	-33.818	-29.867
Lønir	-26.114	-17.187	-43.301	-42.768
Avskriving	-41.607	-7.526	-49.133	-44.430
Rentur	0	-23.290	-23.290	-19.977
Skattur	0	-11.779	-11.779	-13.043
Netúrslit	**-81.186**	**111.469**	**30.283**	**30.247**

www.sansir.fo

SEV
Landavegur 92
Postboks 319
FO-110 Tórshavn

+298 34 68 00
www.sev.fo
sev@sev.fo

Roknskaparár: 01.01-31.12
V-tal: 331538